| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 847<br>Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 11. desember 2025 **Kl**. 16:30
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 268-305**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Rúni Reginsson Hammer luttók fyri Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Hermann Mortensen,
Øssur Patursson
David Andresen
Lars L. Black

**LUTTÓKU IKKI:**
Birgir Nielsen

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Birita í Dali

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 268/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 850 |
| 269/25 | 25/05909-18 | Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171 | 852 |
| 270/25 | 25/01675-1 | Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025 | 855 |
| 271/25 | 25/02630-1 | Íbúðir, sum sosiala deild varðar av | 866 |
| 272/25 | 25/10266-1 | Sertannlækni í tannrætting | 876 |
| 273/25 | 25/03549-3 | Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421 | 879 |
| 274/25 | 25/05791-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025 | 882 |
| 275/25 | 25/01100-7 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590 | 889 |
| 276/25 | 25/08465-1 | Sethúsaútstykking í Kirkjubø - 24/01748 | 898 |
| 277/25 | 25/06231-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624 | 901 |
| 278/25 | 25/10113-2 | Stovnan av almannagagnligum bústaðarfelag | 905 |
| 279/25 | 25/03906-2 | Fríøki í Kirkjubø, matr. nr. 20C | 909 |
| 280/25 | 25/08573-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn | 913 |
| 281/25 | 25/04828-9 | Umsókn um broyting av byggisamtyktini á matrikul 250a á Argjaboða | 917 |
| 282/25 | 25/09983-1 | Broyting av ásetingum fyri minst loyvdu grundstykkjavídd í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini | 919 |
| 283/25 | 25/05861-4 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri kampusøkið, matr. nr. 1017d | 921 |
| 284/25 | 25/00828-2 | Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980 | 925 |
| 285/25 | 25/07413-8 | Umsókn um broytan av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 750c, Hoydalsvegur 8, Tórshavn | 927 |
| 286/25 | 25/01096-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak | 931 |
| 287/25 | 25/08052-1 | Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði | 939 |
| 288/25 | 25/00557-1 | Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu - 23/03191 | 941 |
| 289/25 | 25/09733-1 | Útskifting av snildskeltum við vegamótið Sjúrðargøta/Varðagøta - 24/00113 | 943 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 290/25 | 25/03255-10 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin - 15/04352 | 945 |
| 291/25 | 25/09957-2 | Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík - 22/01107 | 948 |
| 292/25 | 25/00241-1 | Asfaltering í Miðbýnum 2023 - 23/03610 | 950 |
| 293/25 | 25/05869-1 | Kloakkarbeiði á Heiðavegi | 952 |
| 294/25 | 25/03822-2 | Innbjóðing frá Umhvørvismálaráðnum at søkja um stuðul til útbygging av landstreymi til skip við bryggju | 955 |
| 295/25 | 25/08712-2 | Umsókn um at leiga vinnuøki á Oyrareingjum | 958 |
| 296/25 | 25/08886-1 | Útskiftan av sløkkiliðsbilum - 24/08064 | 960 |
| 297/25 | 25/09786-1 | Eykajáttan av meirinntøkum 2025 | 964 |
| 298/25 | 25/10008-1 | Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024 - 24/08061 | 968 |
| 299/25 | 25/02131-6 | Umsókn um mentanarstuðul, umsøkjari: Jógvan Elias Jakobsen vegna: Róðrarfelagið Knørrur - 24/08260 | 972 |
| 300/25 | 25/09594-2 | Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027 | 975 |
| 301/25 | 25/10079-1 | Tænastugjald á tóm býli | 978 |
| 302/25 | 25/10427-2 | Hækkan av hýruvognsloyvum frá 37 upp í 40 loyvir fyri hvørja bilstøð | 982 |
| 303/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 984 |
| 304/25 | 25/09621-1 | Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2026 | 988 |
| 305/25 | 25/06140-7 | Umsókn um eitt ikoniskt listaverk á Boðanesi | 989 |

| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 850 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

## 268/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 144/25 | 25/00163-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 177/25 | 25/00163-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 217/25 | 25/00163-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 238/25 | 25/00163-1 |
| 10 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 268/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |

| | Býráðsfundur<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 851<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 269/25 Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 189/25 | 25/05909-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 228/25 | 25/05909-18 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 269/25 | 25/05909-18 |

Spæliplássið Amerika, sum er spæliplássið millum Sankta Frants skúla og viðarlundina, krevur grundleggjandi dagføringar, soleiðis at økið kann brúkast sum spælipláss.

**Lýsing av málinum**
Býarskipanardeildin hevur saman við Mentamáladeildini arbeitt við at gera eitt prosjekt, sum skal fáa spæliplássið Amerika á nøktandi støði. Býarskipanardeildin saman við ráðgeva, Støði, og bygningsdeildini hava prosjekterað spæliplássið hjá Sankta Frans skúla. jr.nr. 25/01675-12, har dentur varð lagdur á fylgjandi viðurskiftir:

- Drening av økinum
- Nýtt góðkent náttúrufallundirlag verður gjørt og aðrar smærri tillagingar verða gjørdar á spæliplássinum
- Gøtan oman gjøgnum økið, inn i viðarlundina verður hækkað, og ein tjørn við uppihaldsstað og gøtu rundanum verður gjørd í núverandi mýrulendinum.
- Einstøk trø og innræsnir runnar verða burturbeindir.
- Mold og eyrur, ið verður grivið burtur á spæliplássinum, verður í so stóran mun sum gjørligt nýtt til at gera skráar og hækka lendið kring tjørnina.
- Fella veik og sjúk trø.

Verkætlanin varð boðin út til tveir arbeiðstakarar, sum vórðu mettir at hava nøktandi royndir við tílíkum verkætlanum.
Tá tilboðini skuldu vera inni, var tað bert eini arbeiðstakari, Hjálpirót, ið kom við einum boði upp á arbeiðið. Tilboðið var áljóðandi kr. 2,3 mió.

Hetta lá væl omanfyri tøku fíggingina áljóðandi tkr. 1.082.
- Bygningsdeildin tkr. 212 (íløgukonto)
- Mentarmáladeildin tkr. 370 (rakstur)
- Býarskipanardeildin tkr. 500 (rakstur)

Írestandi tørvurin á fígging er so statt tkr. 1.218. Írestandi fíggingin áljóðandi kr. 1,3 mió verður fíggjað av eykainntøkunum.

Fyri at skipa verkætlanina á ein skipaðan hátt, so verður mælt til at tøka fíggingin, umframt eykajáttanin verða fluttar á eina samlaða játtan at seta verkætlanina í gongd útfrá. So statt skulu kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, flytast til kt. 4175, Dagføring av skúlum (íløgur), L41019, Skúlar, uttanumøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Upphæddin á kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, er tøk í 2025, og tískil má upphæddin raðfestast í hesum fíggjarárinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 853 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

25/01675, útiøki hjá skúlum, umsóknir og játtan

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**
25/01675-1, Viðger av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022-2025
25/01675-12, Tekningar- verkætlan í Amerika

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | 4175 | L41019 | Skúlar, uttanumøki | Verkætlan í Amerika | Tkr. 500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2,3 mió kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | 2026 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Útreiðsluneutral flyting frá rakstri 2025 til íløgu 2025 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at flyta kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, sum eykajáttan til kt. 4175, Dagføring av skúlum, L41019, Skúlar, uttanumøki, og at beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvør viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

# 270/25 Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2025 | 6/25 | 25/01675-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 37/25 | 25/01675-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 149/25 | 25/01675-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 77/25 | 25/01675-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 219/25 | 25/01675-1 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 270/25 | 25/01675-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 25/01675-1 |

**Upprunin til málið**
Umsóknir verða viðgjørdar og lagdar fyri Trivnaðarnevndina til avgerðar á hvørjum árið tá fíggjarætlanin er samtykt og játtan avsett til útiøkini hjá skúlum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 er kr. 1 mió játtað til úttøkini hjá skúlum, og játtanin er býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Fløtum – fallundirlag | 130.000 |
| Skúlin á Fløtum – Guliskúli | 30.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 400.000 |
| Sankta Frans skúli | 290.000 |
| Velbastaðar skúli | 150.000 |

**Umsóknir um játtan í 2025**
Fimm umsóknir eru um játtan til útiøkini. Umsóknirnar eru hjálagdar.

<u>Sankta Frans skúli</u>
Søkt verður um játtan til skúlagarðarnar. Umframt Amerika eru tríggir skúlagarðar, og skúlin søkir um upphædd svarandi til 100 tkr. til hvønn garð, sostatt verður søkt um 300 tkr.

Í umsókníni stendur m.a., at miðdeildin hevur júst valt næmingaráð, og tey hava ikki skipað seg enn, men ætlanin er, at næmingaráðið ger eina kanning, so næmingarnir fáa høvi at siga sína hugsan um skúlagarðarnar, og hvør tørvurin er. Skúlin fer saman við næmingaráðnum at gera eina ætlan at gera skúlagarðarnar áhugaverdar. Ætlanin er at skapa eitt spennandi og mennandi umhvørvi hjá næmingunum at ferðast í í fríkorterunum.

Lítligarður er garðurin hjá 1. og 2. flokki, og har er hugsanin at umvæla vøllin og asfalti og fáa ein klatrivegg á baksíðuna á fótbóltsvøllinum og góðkent undirlag framvið klatrivegginum.

Stórigarður er garðurin til 3. flokk og miðdeildina. Garðurin er eisini "parkeringspláss" hjá foreldrum sum fara í forskúlan við børnunum um morgunin. Asfaltið er slitið og tørvar umvæling, og málini eru illa farin, kanska tey kunnu umvælast um ikki, so mugu tey skiftast út. Økið millum báðar skúlarnar og við inngongdina í Willumsgøtu, er upplagt øki til annað enn bóltspæl. Tað er serliga har skúlin hugsar, at næmingaráðið skal siga sína hugsan um, hvat skal vera har.

Norðurgarður er garðurin hjá forskúlanum og 3. flokki. ætlanin er, at bóltvøllurin skal fáa undirlag, og at undirlag verður lagt við stóru steinarnar í garðinum, haraftrat er tørvur á útgerð til yngru næmingarnar t.d. smáar trampolinir og klatriveggur.

<u>Skúlin við Løgmannabreyt</u>
Skúlin fer at seta rennistrong upp og søkir um játtan at seta upp og at leingja Forðabreytina. Søkt verður um 300 tkr. til forðabreyt og uppseting.

<u>Eysturskúlin</u>
Skúlin hevur nú í nøkur ár útbygt útiøkið við játtan av upphæddini til útiøkir hjá skúlum, og søkir um 746.236,- kr til eitt punktstorn og eitt tresfit/parkur. Við í kostnaðarmetingini er eisini undirlag og uppseting.

Í umsóknini stendur um punktstornið, at tað er ætlað innskúling og miðdeild og skal setast upp í garðinum mótið Djóna í Geil gøtu. Spæliøkið í grøna økinum oman fyri Alonina verður nógv brúkt, og er ov lítið til øll børnini, so punktstornið fer at lætta um trýstið, sum er í spæliøkinum við A-lonina. Punktstornið er gott fyri grovmotorikkin hjá børnum, og tað er umráðandi at hava góðar møguleikar at mennast grovmotoriskt, tí gransking vísir,at grovmotorikkurin hevur stóran týdning fyri innlæringina hjá børnum.

Tresfit/parkur hevur sama týdning sum tornið, men er serliga ætlað næminginum í miðdeild og hádeild, Henda útgerð fer at lætta um hølisavbjóðingarnar í ítrótti. 15 næmingar kunnu gera venjingar á stativunum í senn. Nám X hevur tvær stórar breytir, har høvuðsinnihaldið er kropslig rørsla/avbjóðing. Í umsóknini stendur m.a.:”Eisini er hetta ein góður máti at flyta undirvísingina út og eggja næmingum til at venja og verða kropsliga virkin.” Útgerðin kann verða brúkt í undirvísing, í fríkorterum og eftir skúlatíð. Spæliøkið í Eysturskúlanum verður nógv brúkt í frítíðini.

<u>Kollafjarðar skúli</u>
Skúlin søkir um 279.858,- kr. til skreiðubana, klintrivegg, klintrinet, stólpar og tog at ganga á. Ætlanin er at seta leikurnar upp í økinum millum skúlan og svimjihøllina.

Í umsóknini stendur m.a.:”Tað, sum vit hugsað, er at seta útileikur í eitt øki, har einki er, men har børnini eisini hava góðar umstøður at spæla. Málbólkurin hesaferð eru teir yngstu næmingarnir. Serliga hugsað vit um innskúlingina og forskúlan, sum skal byrja hjá okkum komandi skúlaár.

Av tí, at staðsetingin liggur ímillum skúlan og svimji- og ítróttarhøllina, vænta vit eisini, at tey verða mong, sum fara at fáa gleði av hesum útileikum, tá tey eru í økinum í øðrum ørindum, enn í skúla.”

<u>Skúlin á Argjahamri</u>
Í sambandi við játtan á 400 tkr. í 2024 hevur býarskipanardeildin hjálpt við at gera eina heildarætlan og kostnaðarmeting fyri menning av útiøkinum. Kostnaðarmetingini fyri 3 øki er 4.493.950,- kr.

Øki 1. Multifótbóltsvøllur og parkour økið, øki 2 uppihaldstaður við kurvabóltvølli, bonkum og bálplássi og øki 3 náttúrulendi, sum bleiv lagt undir mold í sambandi við útbygging, ynski er um at fáa upprunaliga lendið fram aftur.

Um øki 1 skrivar skúlin i umsóknin m.a.,” Nú Barnagarðurin á Hamrinum verður útbygdur, hevur kommunan valt at matrikkulera Fifa vøllin, sum skúlin hevur brúkt hvørt tað einasta fríkorter til barnagarðin. Hetta er ein stórur missur hjá teimum 150 næmingunum í miðdeild, sum hava brúkt vøllin dagliga síðan 2011. Vit meta eisini, at tað tíverri er eitt neiligt signal at senda út til næmingarnar hjá okkum, tá nú næmingaráðið í miðdeild hevur kempa fyri at fáa hegn runt um vøllin.” Skúlin heitir á kommununa at gera eina íløgu í nýggjan vøll niðanfyri skúlan við Tváttá.

Kostnaðarmetingin er 3.5 mió. kr. Víst verður til mál 24/08100 og samtykt í trivnaðarnevndini 31. oktober 2024 at finna fígging á fíggjarætlanini 2025. Harumframt er ætlan um parkour økið á lítla grøna slættanum niðanfyri skúlan, men kostnaðarmeting fyri tann partin fyriliggur ikki enn.

Viðvíkjandi øki 2 arbeiðir skúlin saman við býarskipanardeildini og umboði fyri mentamáladeildina at gera økið vestanfyri skúlan brúkiligt. Arbeiðið er byrjað at gera ein kurvabóltsvøll uttanfyri høllina og at gera uppihaldsøki, bálstað og øki til smáar felagsveltur í grøna skráanum niðanfyri. Kostnaðarmetingin fyri økið 2 er góðar 300 tkr.

Øki 3 - í sambandi við útbyggingina av Høllini á Argjahamri varð hetta økið tyrvt undir í eyri, gróti og mold. Hetta var upprunaliga eitt náttúru vakurt stað við vøkrum og serstøkum hagagróti, og ynski er at fáa vakra hagagrótið undan kavi aftur, so náttúran kemur aftur til sín rætt. Leyslig kostnaðarmeting at beina tilfarið burtur er 400 tkr.

<u>Skúlin á Fløtum</u>
Játtan á 130 tkr til at gera ábøtur á fallundirlag verður nýtt til endamálið. Byrja er við, at Hjálpirót hevur gjørt eina roynd at smyrja eyka lím á skaðar á fallundirlagnum, mett verður um, hvussu hetta riggar, áðrenn farið verður víðari. Nógvir skaðar eru á fallundirløgunum á spæliplássunum kring skúlan, so tørvur verður á framhaldandi ábótum og møguliga á útskiftan av fallundirlag.

Skúlin á Fløtum hevur ikki sent inn umsókn í ár, tí roknað verður við, at aðrir skúlar hava størri tørv. Skúlin hevur tó eina stigvísa heildarætlan fyri planting og kostnaðarmeting liggjandi fyri útiøkið, sum kann setast í verk um játtan er tøk til endamálið. Skjal nr. 21/04532-41

**Umsóknir i 2025 – upphæddir**
Upphædd u/mvg

| | |
|---|---|
| Sankta Frans skúli | 300.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 300.000 |
| Eysturskúlin | 746.236 |
| Kollafjarðar skúli | 279.858 |
| Skúlin á Argjahamri ? | |
| **Tilsamans (- SáAH)** | **1.626.094** |

**Uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 185.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Endurnýggjan/viðlikahald | 143.000 |
| **Tilsamans** | **1.000.000** |

Uppskotið um býti av játtan var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 7. november 2024.

Skúlastjórarnir høvdu sum so ikki viðmerkingar til sjálvt býti av játtan, men ein gjørdi vart við, at gott hevði verið um, hvør skúli hevði eina játtan á uml. 50 tkr. sum var til viðlíkahald ella endurnýggjan av t.d. bonkum og borðum, at mála spøl í garðin og smærri viðlíkahald. Haraftrat varð víst á, at nú byrja fallundirløg at slítast, og tey kosta nógv, so játtanin til endurnýggjan viðlíkahald kundi verið hægri.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er 1.000.000,- kr. settar av á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum. Uppskot og tilmæli eru við tí fyrivarni, at 1.000.000,- kr. verða játtaðar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Loka mál fyri undanfarnu býráðssetu: 21/04532

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| PDF | Umsókn um játtan til útiøki við Kollafjarðar skúla.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn spæliøkið Eysturskúlin .msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn vv útiøki Skúlin á Argjahamri.docx | 30.10.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki 2024.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | umsókn spæliøkið Eysturskúlin 2024.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | 0558_001.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | Spælipláss í Kollafirði.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 4175 | | Dagføring av skúlum | 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | | 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 1.000.000,- kr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini í 2025, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2024:** Útsett.

**Ískoyti:**
Nú fíggjarætlanin fyri 2025 er samtykt, er greitt, at 2 mió kr. eru settar av á 4175 Dagføring av skúlum til útiøkini hjá skúlum. Umsitingin hevur tí dagført uppskotið um býti av játtan. Uppskotið var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 5. desember. Skúlastjórarnir høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

**Dagført uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---:|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Broytingarnar í dagførda uppskotinum eru, at játtanin til Eysturskúlan og játtanin til endurnýggjan/viðlíkahald eru hækkaðar, og at játtan er til Skúlan á Argjahamri.

<u>Eysturskúlin</u>
Eysturskúlin søkti um játtan til punktstorn, ið er ætlað grunddeild og miðdeild og skal setast upp í garðinum móti Djóna í Geil gøtu. Haraftrat søkti skúlin um tresfit/parkur til mið- og hádeild, kostnaðarmetingin fyri tað er 185 tkr. kostnaðarmetingin fyirð punktstornið er 609 tkr. upphæddirnar eru við 6,25% mvg. nú játtanin til útiøkini er hækkað verður mælt til at játta 609 tkr. til punktstorn til útiøkið hjá Eysturskúlanum.

<u>Skúlin á Argjahamri</u>
Í fíggjarætlanini fyri 2025 er játtan ikki sett av til multivøll til Skúlan á Argjahamri, tí verður mælt til at játta 519 tkr. til lítlan sparkivøll í Skúlan á Argjahamri, sum eftir ætlan verður staðsettur omanfyri skúlan. Hesin vøllur verður so til børnini í grunddeild og frítíðarskúla. Hóast upphæddin ikki er nóg høg til liðugt gerð av einum sparkivølli, er hon væntandi nóg mikið til at gera lendisarbeiðið, asfalt og seta girðing um vøllin. Sparkivøllur við grúsi/asfalti og girðing kann takast í nýtslu, og so ber til seinni at taka støðu til, hvat undirlag skal vera á vøllinum, og møguliga finna fígging til undirlag og álegging í 2026.

Plássið omanfyri skúlan er ikki stórt, og fyrispurningur er sendur Býarskipanardeildini um avbjóðingar eru við plassi til lítlan sparkivøll og matrikumarkið millum skúlan og útstykkingina omanfyri.

<u>Endurnýggjan/viðlíkahald</u>

Sum víst varð á á fundinum við skúlastjórar hósdagin 7. november 2024, eru fallundirløg við at slítast. Haraftrat eru neyðugur ábøtur á undirlag í Skúlanum á Fløtum. Mett verður neyðugt at hava eina hægri játtan til endurnýggjan og viðlíkahald, tí er upphæddin í dagførda uppskotinum hækkað til 200 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 2.000.000,- kr. av 4175 dagføring av skúlum, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri

**Eyka trivnaðarfundur 17. December 2024:** Avlýstur

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin hevur umvegis teldupostsamskifti j.nr.21/04532-60 til 64 lagt málið fyri nevndarlimirnar og hevur nevndin tikið undir við málinum. Svarskriv eru síðani send umsøkjarunum fyri ársskifti.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at staðfesta avgerðina hjá undanfarnu Trivnaðarnevnd

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:** Tørvur er á at gera umraðfestingar av játtanum til útiøkini hjá Sankta Frans skúla og Skúlanum á Argjahamri.

Útiøkið hjá Sankta Frans skúla:

Í 2025 er játta 212 tkr. av staðnummar 4175 til útiøkir í skúlagarðinum.
Í 2024 er játta 290 tkr. av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (Ikki til avvatning)
Í 2023 er játta 83 tkr av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (avvatning)
Íalt er játta 585 tkr. og einki er brúkt enn.

Størsta ynski hjá skúlanum er at fáa gjørt nakað við Amerika, tí har eru teir mest spennandi spælimøguleikarnir.

Skúlaleiðslan hevur saman við umboðum frá mentamáladeildini, bygningdeildini og býarskipanardeildini verið á staðnum og umrøtt møguleikarnar. Stóra avbjóðingin er avvatning á spæliøkinum og av vátlendinum omanfyri spæliøkið. Fyrr enn hesin trupulleikin er loystur er ikki ráðiligt at gera stórvegis við undirlagið við útileikurnar á spæliplássinum. Á spæliplássinum er dren lagt oman ígjøgnum lendi og frárensl, men har skal drenast vøl betur og leggjast náttúru undirlag undir leikur har mest slit er. Býarskipanardeildin umhugsar eina loysn har demma verður við einum garði millum spæliplássi og vátlendi, har grava og steinsett verður fyri einum hyli í vátlendinum og lendi hampa rundanum, so vátlendi eisini verður eitt hugnaligt umhvørvið. Avtala var at arbeiða fram ímóti eini felags verkætlan fyri avvatning.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 861 |
| | | Forkvinnunnar merki: |




Mentamáldeildin mælir til at játtanin frá 2024 á 290 tkr. verður umraðfest, so 370 tkr er til avatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum.

Mentamáldeildin trýstir á býarskipanardeildina um teirra møgulleika og vilja at raðfesta fígging til avvatning av vátlendinum.

Útiøkið hjá Skúlanum á Argjahamri:
Í 2025 er játta 519 tkr. av 4175 til sparkivøll til grunddeildina/frítíðarskúlan
Í 2024 er játta 400 tkr. av 4140 til kurvabóltsvøll og uppihaldsstað
Samlaða játtanin er soleiðis 919 tkr.

Av játtanini á 400 tkr. er brúkt 53 tkr. og avtala er við bygningsdeildina um at bjóða lendisarbeiðið út fyri báðar verkætlanirnar.

Bygningdeildin metir at lendisarbeiðið verður kostnaðamiklari enn mett í kostnaðarætlanunum sum liggja til grund fyri játtanunum. Skúlaleiðslan boðar tí frá, at tørvurin á at útbyggja skutaraskúrin fyri 200 tkr (játtan frá trivnaðarnevndini av 4140 j.nr. 24/01464) ikki er so stórur sum undanfarin ár og at tað er

týdningarmiklari fyri trivnaðin hjá næmingunum at raðfesta útiøkið, tvs sparkivøll, basketvøll og upihaldstað.

Mentamáladeildin mælir tí til at broyta samtyktina um játtan á 200 tkr. til skutara skúr og raðfesta játtanina til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (ikki avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 290 tkr. |
| 4140 | Útbygging av skutaraskúri | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41533 Skúlin á Argjahamri (útiøkið) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 200 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at:

- at játtanin frá 2024 til útiøkið hjá Sankta Frans á 290 tkr. verða umraðfestar, so 373 tkr. (játtan frá 2023 og 2024, sí undir ískoyti) er til avvatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum, og

  at broyta samtyktina í mál 24/01464 um 200 tkr, til útbygging av skutaraskúri, til at játta tær 200 tkr. afturat til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at staðfesta samtyktina hjá trivnaðarnevndini 16. januar 2025,har býti av íløgujáttnini á 2 mio kr í 2025 til útiøkir hjá skúlum var deilt út til verkætlanir á fylgjandi skúlum:

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Íløgujáttanin hevur áður verið rakstrajáttan á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum við 1 mío. kr. árliga, men er í 2025 flutt á íløgukontu 4175 og hækkað til 2 mó kr.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | | Dagføring av skúlum | 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | | 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at samtykkja íløgubýti og at leysgeva 2 mió kr. av konto 4175 á nýggja prosjekt konto undir § 4 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin í telduposti 16. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Málið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti:**
Trivnaðarnevndin hevur, í samtykt omanfyri, tann 5. juni 2025 ,umraðfest játtan frá 2024, soleiðis at 370 tkr. er avsett  av konto 4140 til avvatning av spæliplássinum Amerkia hjá Sankta Frans skúla. Mentamáladeildin hevur samskift við leiðsluna í Sankta Frans skúla, sum tekur undir við, at ein játtan til skúlagarðin á 212 tkr. av íløggujáttanini fyri 2025, sum bygningsdeildin umsitur, heldur verður nýtt til Amerika. Bygningsdeildin tekur undir við hesum, um trivnaðarnevndin góðtekur umraðfestingina.

Býarskipanardeildin hevur síðani raðfest 500 tkr. av rakstrinum í 2025 til avatning av mýrulendinum omanfyri spælipláss, við eini lítlari tjørn og uppihaldsstað.

Í alt er sostatt útvega 1.082 tkr til endamálið

Býarskipanaradeildin hevur fíggja ger av eini ætlan fyri samlaða økið Amerika, j.nr. 25/01675-12, sum eftir útbjóðing, vísir seg at krevja eina íløgu á 2.3 mió. kr.

Verkætlanin snýr seg í høvuðsheitum um fylgjandi

- avvatning av økinum upp í Amerika,
- nýtt náttúrufallundirlag verður gjørt og aðrar smærri tillagingar verða gjørdar á spæliplássinum
- Gøtan oman gjøgnum økið, inn i viðarlundina verður hækka og ein tjørn við við uppihaldsstað og gøtu rundanum verður gjørd í núverandi mýrulendinum.
- Einstøk trøð og innrássnir runnar verða burturbeindir.
- Mold og eyrur ið verður grivin burtur á spæliplássinum, verður í so stóran mun sum gjørligt nýtt til at gerða skráar og hækka lendi kring tjørnina.

Írestandi tørvurin á fígging er sostatt 1.218 tkr. og trivnaðarstjórin hevur fráboða at 1.3 mió.kr. verða settar av á íløguætlanini fyri 2026 til endamálið.
Trivnaðarstjórin hevur síðani heitt á mentamáladeildina, byarskipanardeildina og bygningsdeildina um at tryggja, at neyðug fígging er tøk í 2026. j.nr. 25/01675-13
Býarskipanardeildin hevur í hesum sambandi mælt til at 500 tkr. verða fluttar frá rakstrarkonto 6210 hjá býarskipanardeildini til íløgukonto L41019 hjá bygningsdeildini og verður tann parturn av málinum lagdur fyri Byggi- og býarskipnanarnevndina. j.nr. 25/05909/18

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4140 | (41534) | Ætlanir á Skulaøkinum | 4175 | L41019 | Skúlar, uttanumøki | Verkætlan í Amerika | 370 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.3 mió kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Útreiðsluneutral flyting frá rakstri 2025 til løgu 2025 |

**Skjøl:**
25/01675-12 Tekningar -verkætlan í Amerika:
TK_ACG_X_100_STØÐUPLANUR_20250724svrFB
TK_ACG_X_101_PLANTEKNING_20250724svrFB
TK_ACG_D_001_DEILSKURÐIR-SPÆLIPLÁSSI_20250724svrFB
TK_ACG_D_002_DEILSKURÐIR-SERMYNDIR_TJØRN_20250724svrFB
25/01675 SV_ Amerika - Hvussu verður við spæliplássinum, tjørnini v.m. – Samskifti um fígging
25/05909-18 Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til, at samtykkja at flyta 370 tkr frá rakstrakonto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum, til deild 4175, Verkætlan L41019 Skúlar, uttanumøkið, til Verkætlan «Amerika» Eykajáttanin liggur innan fyri íløgukarmin.

Somuleiðis verður mælt til, at samtykkja at umraðfesta 212 tkr. á L41019, játtað til skúlagarðin hjá Sankta Frans skúla, til Verkætlan í Amerika.

At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 271/25 Íbúðir, sum sosiala deild varðar av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.02.2025 | 11/25 | 25/02630-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 08.05.2025 | 27/25 | 25/02630-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 42/25 | 25/02630-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 104/25 | 25/02630-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 150/25 | 25/02630-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 04.09.2025 | 47/25 | 25/02630-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 137/25 | 25/02630-1 |
| 8 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 186/25 | 25/02630-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 76/25 | 25/02630-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 224/25 | 25/02630-1 |
| 11 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 271/25 | 25/02630-1 |

**Upprunin til málið**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á sosialu deild og deildarleiðarin á bygningsdeildini ynskja at fáa mál á skrá til kunning á komandi trivnaðarnevndarfund.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna eigur 28 íbúðir, sum sosiala deild varðar av á tann hátt, at tað er sosiala deild, sum umsitur og visiterar borgarar til íbúðirnar. Tað er bygningsdeildin, sum hevur ábyrgd av viðlíkahaldinum og raðfesting av fígging til tann partin.

Fleiri av borgarunum hava búð í hesum íbúðum í nógv ár, men eru eisini íbúðir, har borgarar búgva í styttri tíðarskeið. Tá tey flyta út, skulu íbúðirnar dagførast, og fleiri av teimum eru í so ringum standi, at tørvur er á eyka fíggingin.

Tørvur er á:
- At lýsa standin á íbúðunum
- At gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at dagføra íbúðirnar
- At gera eina skrivliga lýsing av tørvinum hjá borgarunum
- At gera eina skrivliga leiðbeining (visitatión, leigusáttmála o.a.)
- At endurskoða húsaleiguna

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Viðheft skjal har yvirlit yvir íbúðirnar eru.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla til at málið um sosialu íbúðirnar og tørvin verður kannað og lýst nærri.

At málið kemur aftur í Trivnaðarnevndina til støðutakan tá málið er lýst.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyristandandi, so hevur Trivnaðarnevndin samtykt at málið um sosialu íbúðirnar verður kannað, umframt at tørvurin av sosialu íbúðunum verður lýstur. Omanfyri verður lýst núverandi gongd í málinum.

Bygningsdeildin
Bygningsdeildin er farin í eina tilgongd, har allar íbúðirnar verða screen'aðar, bæði innan og uttan og verður eitt skjal útfylt í hesum sambandi. Á henda hátt fær man eina lýsing av núverandi standi, og um íbúðirnar lúka/ikki lúka neyðug krøv. Arbeiðið verður væntandi liðugt í juni 2025. Kostnaðarmetingin fyri viðlíkahald / dagføring eigur eisini at leggjast afturat, soleiðis at støða kann takast til, um tað loysir seg at dagføra íbúðirnar ella um annað skal gerast.

Um tað eru íbúðir / bygningar, har tað verður mett, at tað fíggjarliga ikki loysir seg at varðveita, so skal tað eisini lýsast.

**Sosiala deild**
Í verandi løtu verður ein skrivlig leiðbeining gjørd, har tað verður hugt eftir undanfarnum vegleiðingum hjá kommununi, umframt við íblástri frá leiðbeiningum hjá Almannaverkinum í smb. við sosialu íbúðirnar tey varða av í samstarvið við Bústaðir. Tað er umráðandi at tað liggur ein dagførd leiðbeining.

Tað eru 28 íbúðir, og tað er javnan at borgarar í Tórshavnar kommunu seta seg í smb. við Sosialu deild, tí tey ynskja at verða skrivaði upp og/ella tosa um møguleikan fyri at kunna leiga eina íbúð. Í teimum flestu íbúðunum hava leigararnir búð í nógv ár, nøkur største partin av teirra lívi. Síðani eru tað nakrar íbúðir, sum hava verið tøkar okkurt tíðarskeið, og tá eru tað ofta stakir uppihaldarar við børnum undir 18 ár, sum hava fingið íbúðirnar. Talan er eisini um borgarar, sum kunnu skrivast upp til sosialar íbúðir í Almannaverkinum.

Í løtuni er ein íbúð í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Uppskot eru gjørd um dagføring av íbúðini, men er talan um eina upphædd á áleið 1,5 – 2 mió, og manglar játtan til hetta. Tað er umráðandi at íbúðin verður dagførd, men støða skal takast til, um dagføringini er ein partur av einari samlaðari dagføring av íbúðunum í Lon, ella um hetta er ein dagføring, sum verður gjørd nú, og so verða sosialu íbúðirnar dagførdar ein og ein, sum fólk flyta út.

**Ynskir frameftir**
Afturat teimum borgarum yvir 18 ár, sum hava tørv á sosialum íbúðum, so setur Barnaverndartænastan (BVT) javnan fyriskipanir í verk, har man stuðlar ungum undir 18 ár eftir *lóg um barnavernd §15, stk. 1, nr. 11) Veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella egnari íbúð.*

Samlað eru 396 aktiv mál í skipanin hjá BVT, 96 av teimum eru ung yvir 16 ár. Síðstu 12 mðr. hevur BVT játtað fíggjarligan stuðul eftir §15, stk. 1, nr.11 til til 16 ung, samlaða upphæddin fyri hetta er 595.305kr. Talan er um húsaleiga fyri kømur og íbúðir, sum verða leigaðar bæði privat og gjøgnum fyritøkur (t.d. Mark), eins og nøkur leiga kamar inni í heimum hjá familjum. Onkuntíð eydnast fyriskipanin væl, men tað eru eisini neiligar royndir, tí tað eru fleiri viðurskiftir, sum skulu vera til staðar fyri at ein slík fyriskipan skal eydnast.

Tá ung fara út at leiga, so er tað oftast tí, at tey ikki kunnu verða búgvandi heima hjá sínum foreldrum. Tey eru ov gomul og/ella ynskja ikki at blíva umsorganaryvirtikin, og tí er hetta ein møguleiki at stuðla teimum í at koma burtur frá umstøðum, sum ikki verða mettar nøktandi. Afturat stuðlan til húsaleigu, so er umráðandi at seta aðrar fyriskipanir í verk, sum kunnu stuðla hesum ungum í teirra trivnað og menning. M.a. seta stuðlar/mentorar, sum kunnu vegleiða hesi ungu til hvussu tey skipa eina dag, læra at halda hús, reingerð, søkja arbeiði, søkja inn á miðnám o.líkn. Umframt stuðla teimum í sambandinum við foreldur/familjuna á ein jaligan hátt, og hesir stuðlar hava ofta eisini samband við foreldrini hjá hesum ungu.

Hyggja vit rundan um okkum í Norðanlondum, so er vanligt at kommunur hava bútilboð til hesi ungu millum 16-20 ár, har námsfrøðingar eru knýttir at við tí endamálið at stuðla teimum í at trívast, mennast og gerast klár til vaksnamannatilveruna. Bútilboðið er eitt heim, har tey eru áleið fýra ungu, sum búgva saman og hava ein gerandisdag, har tey eru partur av einum jaligum felagsskapið og hava atgongd til vaksin, sum kunnu vegleiða og ráðgeva í lívsins viðurskiftum.

Hetta er eitt tilboð, sum avgjørt átti at verið stovnað í Tórshavnar kommunu, og átti at blivið partur av arbeiðinum við sosialu íbúðunum. Tí á henda hátt fær kommunan arbeitt fyribyrgjandi og stuðla ungum, sum ikki hava eins góðar treytir í lívinum, sum onnur javnaldrandi í, at tey eitt nú fáa fólkaskúlaprógv, kunnu koma inn á miðnám og/ella út á arbeiðsmarknaðin og har við megna at standa á egnum beinum.

**Næsta stig**
Í verandi løtu verða screeningar gjørdar av øllum íbúðum, soleiðis at tað gerast greitt hvørjum standi íbúðirnar eru í, hetta verður væntandi lagt fram fyri Trivnaðarnevndina í juni 2025. Sosiala deild heldur á

fram við at gera eina skrivliga leiðbeining, umframt eina týðiliga lýsing av málbólkunum, sum mett verður at íbúðirnar skulu tilskrivast. Her verður dentur lagdur á tey eldur, stakir uppihaldara við børnum undir 18 ár, og so at nakrar íbúðir og/ella hús verður sett av til ung millum 16-18 ár, sum ikki kunnu búgva heima orsaka av heimligu viðurskiftunum.

Tørvur er eisini á at hoyra hvørjar hugsanir býráðið hevur til sosialu íbúðirnar, og hvat skal takast við til víðari arbeiðið hjá fyrisitingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini at umrøða málið um sosialu íbúðirnar.

**Trivnaðarnevndin 08. mai 2025:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Á trivnaðarnevndarfundinum t. 08/05-25 varð niðurstøðan av screeningunum av sosialu íbúðunum í Tórshavnar kommunu løgd fram. Screeningin vísti, at íbúðirnar eru í ymsum standi, men meirilutin av sosialu íbúðunum lúka ikki krøvini í smb. við brunatrygd. Á trivnaðarnevndarfundinum varð umrøtt og dentur lagdur á, at trygdin skal koma uppá pláss, harafturat skal støða takast til hvørjar íbúðir skulu varðveitast, og um tað eru íbúðir, har ein ætlan fyri avvikling skal gerast. Borgarar búgva í øllum íbúðum, og verður mett at nakrar íbúðir ikki skulu varðveitast, so skulu hesir borgarar koma í annan bústað. Í smb. við gjøgnumgongdina av íbúðunum vóru tað eisini íbúðir, har mett varð at leigarin átti at fingið bjóðað vegleiðing um aðrar tænastur, tí tað sást avbjóðing í m.a. at halda hús.

Ætlanin skal væntast at fevna yvir eitt tíðarskeið á 2-5 ár. Ætlanin fyri økið er at endurskoða verandi sosialar íbúðir, og miðja eftir at nøkta tørvin hjá ávísum málbólkum, sum eru lýstir omanfyri. Tað eru m.a. ung í aldrinum 15-18 ár, sum eru á gáttini til vaksna lívið. Tørvurin er mettur til at vera ein ella tveir búfelagsskapir við tilsamans 4-6 kømrum og felagsøki, og síðani útslúsing til egnan bústað, til endamálið kundu nakrar íbúðir í Lon verði nýttar til hetta í eitt ávíst tíðarskeið. Við at kunna veita ungum eitt námsfrøðiligt tilboð saman við einum bústaði, hevði avgjørt økt um møguleikar í smb. við íverksetan av fyriskipanum, sum tørvur er á.

Ætlanin inniber eisini at fimm sethús: Kannuberg, Yvirlærarahúsi, Skræddaragøta, Kjælneshúsini og Læknahúsið í Nolsoy møguliga verða seld. Møguliga kann eitt ella tvey av teimum umbyggjast til omanfyrinevnda búfelagskap. Sølurnar av sethúsum eiga at innganga í fíggingina av búfelagsskapum og umvælingum av íbúðum.

Í fyrsta umfarið verður mett at hendan ætlan er kostnaðarneutral í mun til at fáa neyðugu hølini til vega. Alt eftir hvussu tað gongur at visitera íbúgvar aðrar vegir kann ætlanin taka 2-5 ár at gjøgnumføra.

Ætlanin eigur eisini at fevna um eitt samstarv um inspektión og reingerð sum Bygningsrakstur kann standa fyri, og umsorganarvitjanir í íbúðum og stuðlar í búfelagsskapum, sum Sosiala Deild kann standa fyri. Ein slík tænasta merkir, at tað er neyðugt at uppnormera raksturin á báðum deildum.

Afturat hesum skal skal tað liggja ein dagførd leiðbeining har greiðar mannagongdir er fyri eitt nú leigusáttmálum, visitering, árligt uppsýn, húsaleigu o.líkn.

Tað eru tilsamans 16 íbúðir í Lonunum og Barakkini, sum skulu umvælast og dagførast. Mælt verður til, at kommunan setur fígging av til at umvæla og dagføra hesar íbúðir. Tað verður byrja við at brunatryggja allar 16 íbúðir og umvæla ta einu íbúðina í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Síðani kann kommunan dagføra íbúðirnar, so hvørt sum tað er møguligt og/ella, tá borgarar m.a. flyta. Sum íbúðirnar verða dagførdar kunnu nakrar av teimum minnu íbúðunum oyramerkjast til ung, sum hava tørv á egnari íbúð eitt tíðarskeið.

Bygningsdeildin hevur gjørt fylgjandi kostnaðarmeting:

- Tann eina íbúðin í Lon má høvuðsumvælast og dagførast, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunavardar = 3,0 mió. játtan í 2025.
- Barakkin í V.U. Hammershaimbs gøtu verður brunavard í 2026 = 1,5 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57016 | Golf | 2575 | Nýggj verkætlan | Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum | Stovna nýggja verkætlan undir sosialu deild | 3.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini til at taka undir við at;

- Tann eina íbúðin í Lon, sum hevur staðið tóm verður høvuðsumvæld og dagførd, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunatryggjaðar. Kostnaðarmetingin fyri at gera hetta arbeiði er mett til 3.0 mió

- At fluttar verða 3 mió av 5775 L57016 Golf til nýggja verkætlan “Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum” sum sosiala deild varðar av

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Ein meiriluti, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Kári Johansen legði fram eitt broytingarupppskot um at taka undir við tilmælinum við tí broyting at fíggingin verður tikin av konto 6110.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, tekur ikki undir við broytingaruppskotinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við broytingaruppskotinum.

Ein annar minniluti, Heðin Mortensen, atkvøddi blankt.

Broytingaruppskotið varð felt við 7 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og einari blankari.

**Ískoyti:**
Síðani málið um sosialu íbúðirnar kom á skrá í feb. 2025, hevur tað verið arbeitt við fylgjandi punktum, sum vórðu nevnd fyrst í málslýsingini:

- At lýsa standin á íbúðunum
- At gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at dagføra íbúðirnar
- At gera eina skrivliga lýsing av tørvinum hjá borgarunum
- At gera eina skrivliga leiðbeining (visitatión, leigusáttmála o.a.)
- At endurskoða húsaleiguna

Bygningsdeildin hevur lýst standin á øllum íbúðunum, umframt gjørt eina kostnaðarmeting í smb. við dagføring av íbúðunum. Víst verður til lýsingina omanfyri frá trivnaðarnevndarfundinum t. 08/05-25.

Tað eru gjørdar skrivligar lýsingar ígjøgnum alt tilmælið av metta tørvinum hjá borgarunum í Tórshavnar kommunu.

Arbeitt hevur verið við einari reglugerð í smb. við sosialu íbúðirnar, og er tað uppskotið liðugt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini at taka undir við reglugerðini fyri sosialu íbúðirnar og beina víðari í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við reglugerðini at beina í býráðið um fíggjarnevndina. Harumframt samtykt at fara í tilgongd at tillaga leigukostnaðin og at endurskoða bygningarnar í skipanini. Málið at beina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við reglugerðina og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Av tí at atkvøðast skal um tvey ymisk mál í sama máli, verður atkvøtt soleiðis:

Fyrst skal atkvøðast um 2. viðgerð um eykajáttan á 3 mió. til dagføringa av sosialu íbúðum sí. oman fyri í hesum máli. Málið var samtykt við 1. viðgerð á býráðsfundi 18. juni 2025.

Síðan skal atkvøðast um sjálva reglugerðina fyri sosialu íbúðirnar sí skjal nr. 2. Málið um reglugerðina var samtykt í trivnaðarnevndini 4. september og viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini tann 10. september 2025.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Fyrst varð atkvøtt um 2. viðgerð um eykajáttan á 3 mió. til dagføringa av sosialu íbúðum:

Einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um um sjálva reglugerðina fyri sosialu íbúðirnar:

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Húsaleigan í sosialu íbúðunum hjá Tórshavnar Kommunu er ikki hækkað í útivið 25-30 ár. Umsitingin er biðin um at koma við tilmælið um, hvussu húsaleigurnar kunnu hækka og hvørja ávirkan tað fær á leigaran.

Sambært §8 í reglugerðini fyri sosialu íbúðirnar, sum varð samtykt á Býráðsfundinum 18. september 2025, kann húsaleigan regulerast soleiðis:

- **Prístalsjavning,** ið verður framd sjálvvirkandi 1. januar hvørt ár, bygd á brúkaraprístalið
- **Árlig** hækking **eftir tilmæli,** ið krevur politiska viðgerð.

Reglugerðin ásetur, at fyrsta prístalsjavning skal gerast 1. januar 2026. Hetta letur seg ikki gera í praksis, tí málið skal viðgerast í Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini, og leigarar skulu fáa boð í rímiligari tíð sambært leigulógini. Mælt verður tí til, at húsaleigan hækkar tað, sum verður samtykt eftir hesum tilmælið og verður prístalsjavna fyrstu ferð pr. 1. januar 2027.

**Søguliga gongdin av húsaleigunum**
Einaferð eftir aldarskiftið, varð avgjørt í kommununi, at húsaleigan fyri sosialar íbúðir framyvir skuldi verða kr. 500,- m2 um árið fyri nýggj leigumál. Somuleiðis varð avgjørt, at allar tøkar íbúðir skuldu umvælast nøktandi, áðrenn nýggjur leigari varð funnin.
Fyri tað, varð húsaleigan ásett eftir hvørjum standi íbúðin var í, tá leigumál byrjaðu. Meting varð tá gjørd um íbúðin var í standi 1,2,3,4 ella 5. Sostatt bleiv munur á kostnaðinum millum gomul leigumál og nýggj. Hesin munur er ongantíð reguleraður og gomlu íbúðirnar eru heldur ikki hóskandi umvældar.

Sosiala deild hevur gjøgnum árini mælt til at hækka húsaleigurnar. Undirtøka hevur ikki verið fyri hesum.

**Húsaleigurnar hjá Bústaðir og bústaðarfelagnum Mark**
Í arbeiðinum við at endurskoða húsaleigurnar á sosialu íbúðunum, hevur umsitingin hugt eftir kostnaðarstøðinum fyri íbúðirnar hjá Bústaðir og bústaðarfelagnum Mark.
Húsaleigurnar hjá teimum eru ymiskar, alt eftir hvat tær kostaðu at byggja, umframt onnur atlit.
Niðanfyristandandi tøl eru tí vegleiðandi miðaltøl. Tølini koma frá heimasíðunum hjá Mark og Bústaðir.

**Miðalprísir hjá TK, Bústaðir og Mark (vegleiðandi):**

- TK: 500 kr./m²/ár (umframt el og hita)
- Bústaðir: Úr 1.214 – 1.492 kr./m²/ár (umframt el og hita)
- Mark: Úr 1.351 – 1.722 kr./m²/ár (umframt el og hita)

  *Mark hevur nakrar íbúðir uppi í Marknagili har húsaleigan er, íroknað ljós og hita, sum niðanfyri:*
    - *30 m² - 2 rúms íbúð - 2230 kr./m²/ár = 5.575 kr./mðr.*
    - *40 m² - 2 rúms íbúð – 2074 kr./m²/ár = 6.914 kr./mðr.*

**Standur og tørvur á umvæling**
Sosialu íbúðirnar hjá TK treingja til ábøtur og nakrar hava bráðfeingis tørv á umvæling og nøktandi brunatrygging.

Fyri at tryggja, at peningur er til at umvæla íbúðirnar frameftir – aftaná heildarumvæling - verður mett skilagott, at innkomin húsaleiga framyvir verður oyramerkt til umvælingarnar.

Fyrst er tó neyðugt at heildarumvæla íbúðirnar, so hvørt onkur flytur út. Til hetta arbeiði krevst beinleiðis játtan á fíggjarætlanini hjá TK.

**Atlit at taka tá TK ásetir húsaleigu og hækkar leiguna**
Fleiri av íbúðunum treingja til stórar ábøtur. Herundir eru fleiri illa bjálvaðar og av tí saman er olju nýtslan høg fyri at íbúðina heita, sum leigarin rindar fyri.

Í mun til áseting av húsaleigu, so verður mælt til at leigukostnaðurin endurspeglar, at talan er um sosialar íbúðir.

**Tá TK velur at hækka húsaleigurnar, eigur at havast í huga:**

– At íbúðirnar eru ætlaðar borgarum við sosialum avbjóðingum og avmarkaðari fíggjarorku. Tí eigur húsaleigan framvegis vera væl undir marknaðarprísinum
– At fleiri íbúðir treingja til ábøtur og fleiri eru illa bjálvaðar
– Havast skal eisini í huga, at húsaleigan eigur at endurspegla rakstrarkostnað og tørv á umvæling, so TK frameftir kann fíggja umvælingarnar við húsaleiguni

– Verður leigan hækkað, skal leigari, sambært Leigulógini §13, hava skrivliga fráboðan um hetta 4 mánaðir frammanundan. Av tí at leigan ongantíð áður er hækka, er helst skilagott, at fyrstu ferð hon hækkar, skulu leigararnir fáa skrivliga fráboðan 6 mánaðir frammanundan.

**Hvussu ávirkast húsaleigan – nøkur dømi**
Húsaleigan er í dag 500 kr./$m^2$/ár. Niðanfyristandandi talva vísir hvussu ein møgulig hækkan til 550, 600, 700 ella 800 **kr./$m^2$/ár** ávirkar húsaleiguna.

| | | | Uppskot 1 \| 550 kr./m2/ár | | Uppskot 2 \| 600 kr./m2/ár | | Uppskot 3 \| 700 kr./m2/ár | | Uppskot 4 \| 800 kr./m2/ár | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Leigunr. | Húsaleiga/mðr. 01.10.25 | M2 (2025) | Mðr. leiga | Øking pr. mðr. | Mðr. leiga | Øking pr. mðr. | Mðr. leiga | Øking pr. mðr. | Mðr. leiga | Øking pr. mðr. |
| L701111 | 1.133 | 29 | 1.247 | 114 | 1.360 | 227 | 1.587 | 454 | 1.813 | 680 |
| L759924 | 1.792 | 47 | 1.971 | 179 | 2.150 | 358 | 2.508 | 716 | 2.867 | 1.075 |
| L716107 | 2.033 | 53 | 2.237 | 204 | 2.440 | 407 | 2.847 | 814 | 3.253 | 1.220 |
| L701110 | 2.175 | 64 | 2.393 | 218 | 2.610 | 435 | 3.045 | 870 | 3.480 | 1.305 |
| L732003 | 3.292 | 80 | 4.446 | 1.154 | 4.850 | 1.558 | 5.658 | 2.366 | 6.467 | 3.175 |

Legg til merkis, at húsaleigan er umroknað til mánaðarliga leigu.

Legg eisini til merkis, at nakrir leigarar gjalda í dag minni enn tær 500 kr./$m^2$/ár. Mælt verður til, at øll framyvir gjalda sama grundprís pr. $m^2$, ið verður roknað sum kr./$m^2$/ár - innvendig mát.

Støddin á íbúðunum er upplýst í teimum nýggjastu leigukontraktunum. Um tilmælið viðv. hækkan av húsaleigunum verður samtykt, má byggideildin máta tær íbúðirnar upp, har $m^2$ - innvendig mál - ikki er skrásett.

**Tilmæli frá Sosialu deild - Til umrøðu og støðutakan**

A. **Mælt verður til, at hækka húsaleigurnar nú. Her eru 4 uppskot at taka støðu til?**
   1. Uppskot 1: Sera varin hækking til 550 kr./$m^2$/ár
   2. Uppskot 1: Varin hækking til 600 kr./$m^2$/ár
   3. Uppskot 2: Miðalhækking til 700 kr./$m^2$/ár
   4. Uppskot 3: Hægri hækking til 800 kr./$m^2$/ár

Eitt leigumál - L741206 – krevur serliga nógvar ábøtur. Mælt verður ikki til at hækka húsaleiguna í hesum leigumálið í hesum umfarinum, men at fara undir eina tilgongd, har leigumálið verður umvælt.

B. **Mælt verður til at leingja fráboðanina um hækking**
   Leigari hevur sambært leigulógini rætt til at fáa fráboðan um húsaleiguhækkan minst fýra mánaðar frammanundan. Mælt verður tó til, at freistirnar hesaferð verða longdar til seks mánaðir. Tí verður mælt til, at ein møgulig húsaleiguhækkan verður sett í gildi 1. august 2026, ella skjótast til ber eftir at viðkomandi nevndir og býráðið hava samtykt hækkingina.

C. **Mælt verður til**, at býráðið tekur undir við, at innkomin húsaleiga framyvir verður oyramerkt til at fíggja framtíðar umvælingar.

   **Mælt verður til**, at býráðið setur játtan av á fíggjarætlanini til umvælingar av íbúðunum, so hvørt onkur flytir út.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Samtykt at taka undir við uppskoti 3 á 700 kr./$m^2$/ár, tó so at íbúðir størri enn 75 $m^2$ hækka við uppskoti 2, sum er 600 kr./$m^2$/ár.

Gildiskoma er 1. august 2026 og síðani verður leigukostnaður prístals viðgjørdur frá 1. januar 2027 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Høgni Vilhelmsen legði fram broytingaruppskot, um at fermetrarprísurin hvørt ár hækkar frá 500 til 600 kr.

Uppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Atkvøtt var síðani um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

# 272/25 Sertannlækni í tannrætting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 75/25 | 25/10266-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 225/25 | 25/10266-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 272/25 | 25/10266-1 |

**Upprunin til málið**
Í 2011 tá sertannlækin í tannrætting seinastu mongu árini gavst, bleiv avgjørt at skipan ein nýggjan leist fyri tannrættingarøki. Ynskiligt var at kommunan sjálv loysti hesa uppgávuna.

**Lýsing av málinum**
Sum tað fyrsta vóru hølir innrættað í nýggja Skúlanum við Løgmannabreyt. Í øðrum lagi var farið í holt við at seta fólk í starv til ortodontiina. Ein sertannlækni byrjðaði í starvinum tá hølini vóru klár 1 okt. 2012. Umframt sertannlæknan vóru eisini tríggir tannrøktarar á niðursettum brøki settir í starv. Longu ári eftir segði sertannløknin seg úr starvinum og til bar ikki at fastseta nýggjan sertannlækna tí ongin var tøkur til starvið.

Síðani í 2013 hevur tannrættingin í Tórshavnar kommunu ongan fastsettan ortodontist havt á klinikkini. Í 2012/13 bleiv avtala gjørd við føroyskan ortodontist sum búði í Danmark, um at átaka sær at vera konsulentur í tannrætting. Sertannlæknin er 6. hvørja viku í Føroyum og og tekur sær av viðgerðarætlanum og viðgerðum. Hetta hevur latið seg gjørt, tí starvsfólkini vóru væl upplærd og hava arbeitt við tannrætting í áravís. Tað var ein broyting í tí ætlaða gerandisdegnum, ikki at hava sertannlækna á klinikkini dagliga. Hetta førdi eisini við sær eina stóra og økta ábyrgd hjá teimum starvsfólkunum, sum dagliga tóku sær av uppgávunum.

Skipanin hevur fungerað væl og tannlækna stjórin sigur at tey hava verið sera nøgd við loysnina og samstarvið. Tó eru trupulleikar við skipanini, m.a at serfrøðin manglar í gerandisdegnum. Tað er eisini torført at rekruttera starvsfólk sum hava serførleikar innan tannrætting. Tannrøktararnir, sum dagliga arbeiða á klinikkini, síggja seg ikki førar fyri at upplæra nýggj starvsfólk, tá ongin sertannlækni er til staðar í dagligdegnum. Tað vikuna sertannlæknin  er í Føoyum, er úr at gera og ikki stundir til upplæring. Hetta er eitt serøki, sum krevur serkunnleika, eisini í upplæringini.

Ortodontiin strekkir seg yvir fleiri ár. Vanligar viðgerðir eini 2-3 ár og meira kompliceraðar viðgerðir væl  longri tíð.
Ortodontiin er deild upp í tvey tíðarskeið:

1. Aktivt tíðarskeið, har tenn og bit verða flutt
2. Passivt tíðarskeið, har tenn og bit verða hildin í nýggju støðuni

Mett verður at  uml 30-35%  av hvørjum árgangi hevur tørv á tannrætting.

Verandi skipan í Tórshavnar kommunu dekkar øll børn og ung í kommununi, umframt øll børn og ung í Sandoynni. Í restini av landinum er støðan tann, at ein ortodontistur býr og arbeiðir í Klaksvík og rekur privata klinikk har. Til klinikkina har hoyra børn í Norðoyggjum, Eystur, Fuglafjarðar, Sørvágs, og Vága kommunum. Harafturat vaksin yvir 18 ár.  Skálafjørðurin og Sundalagið hava konsulentskipan og somuleiðis hevur Suðuroyggin eisini konsulentskipan.

Mett verður at brøkur á 0,8 er nøktandi til at røkja tørvin av skipanini sum hon er í dag.

Verandi starvsfólkahópur er tilkomin, og væntast kann at tær fara frá innan stutta tíð. Skipanin er tí sera sárbar og  neyðugt er at tryggja skipanina. Tannlæknastjórin mælir til at søkt verður eftir sertannlækna í

fast starv 4 dagar um vikuna at røkja uppgávuna og samstundis avtaka konsulentskipanina. Fyrimunir eru við at seta sertannlækna í fast starv. Vit at seta fastan sertannlækna verður hesin til staðar í dagliga arbeiðinum hvørja viku. Tað verður møguleiki at upplæra nýggj starvsfólk. Arbeiðsgongdirnar vera munandi smidligari, har avgerðir kunnu takast- og viðgerðir tillagast leypandi. Hartil verður tættari samstarv við tannlæknarnar. Við at hava ein sertannlækna í føstum starvi ger tað tannrættingina minni sárbara fyri broytingum í starvsfólkahópinum og samstundis verður mett at til ber at skipa eina betri og støðufasta tænastu. Mælt verður til at søkja eftir sertannlækna í ortodonti til setan í august 2026. Tað er átroðkandi at fáa upplært nýggj fólk at manna sertannlæknastovuna.

Stórur partur av at seta sertannlækna í fast starv 4 dagar um vikuna kann fíggjast av verandi skipan við konsulenti. Ein meirkostnaður er á 331.000 kr. árliga. Hetta merkir at fyri fíggjarári 2026 verður meirkostnaðurin áleið 140.000 kr. um starvið verður sett í aug/sept. 2026. Fígging fyri ári 2026, kann finnast innanfyri verandi karmar fyri 2026, men má takast við í fíggjarætlanina við fullum meirkostnaði í 2027.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og tannlæknastjórin mæla trivnaðarnevndini til at

- taka undir við at lýst verður eftir og settur verður sertannlækni í tannrætting í fast starv at byrja aug/sept. 2026.
- At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

## 273/25 Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 157/25 | 25/03549-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.11.2025 | 67/25 | 25/03549-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 261/25 | 25/03549-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 188/25 | 25/03549-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 90/25 | 25/03549-3 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 273/25 | 25/03549-3 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til upprunaligu málslýsingina fyri mál nr. 23/02421, Framtíðar byggilendi í Kollafirði, sí j. nr. *25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*.

Málið byrjaði upprunaliga við, at borgarar vístu sína ónøgd við, at bygdin manglaði bústaðir, og at ung fólk ikki høvdu møguleika fyri at seta búgv í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Í tilgongdini hevur verið arbeitt við at samráðast við Búnaðarstovuna og festara um lendi í Norðreki, matr. nr. 313a.

Avtalað varð í desember 2023 gjørd við festaran Gunvør Dam Jensen um lendi, og er eitt krav í avtaluni, at kommunan endurrindaði fyri seyðahúsið á matrikklinum. Fleiri mátar eru at náa hesum kravinum, men av tí at tað ikki hevur verið púra greitt, hvar atkoman til økið skal verða, so er eingin endaliga avgerð tikin um júst hetta kravið. Tað verður ikki mett ráðiligt at endurrinda seyðahúsið, fyrr enn tað er heilt vist, hvussu atkoman til lendið verður og farið verður undir at planleggja ítøkiligu bygginga.

So statt hevur tað verið týdningarmikið fyri umsitingina at fáa neyðugu atkomuna til lendið. Samráðingar hava verið við eigararnar av matr. nr. 159, 80a um møguliga atkomu til økið. Sí skjal nr. *25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*, har tvær vegaloysnir verða vístar. Umsitingin mælti til vegaloysn A umvegis bæði matr. nr. 159 og 80a. Eigararnir av matr. nr. 159 og 80a vóru hvørki glaðir fyri loysn A ella B, men vístu á møguleikan, at vegurin varð fluttur út til ánna á matr. nr. 107a.
Víst verður til mál nr. *25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*, har fundir hava verið við eigararnar um atkomuviðurskiftini.

Síðani fundir við eigararnar áðrenn summarferiuna, hevur málið ligið stilt, og fyri at koma víðari við eini loysn, varð málið um vegaloysn lagt fyri ferðslunevndina, sí mál nr. *25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður.*
Ferðslunevndin er samd um, at allir tíggir møguleikar kunnu nýtast, men at loysn A gjøgnum matr.nr. 80c, Kollafirði, er ferðsluliga best hóskandi.
So statt verður málið lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd til endaliga støðutakan um atkomuvegin til matr. nr. 313a, Kollafirði.

Tá endalig avgerð fyriliggur viðv. atkomuvegnum, verður neyðugt at fáa viðurskiftini formliga upp á pláss, og helst skal vegurin somuleiðis gerast. Tá hetta er avklárað er klárt at fara undir útbjóðing av lendinum til bústaðarbygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

*25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*
*25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
*25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*
*25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Enn eru fíggjarligu avleiðingarnar av hesum málinum ikki kendar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at staðfesta vegaloysn A sum atkomuveg til matr. nr. 313a, og at heimila umsitingini at fara undir formligu viðurskiftini fyri at fáa vegaloysnina avgreidda við avvarðandi partar,
Og tá atkomuviðurskiftini eru avgreidd:

- at skipanin av økinum verður boðin út til ráðgeva at koma við boð upp á eina alternativa bústaðarbygging í økinum, og at skipanin hereftir verður boðin út til arbeiðstakara at gjøgnumføra.
- at endalig avtala við festaran um seyðahúsið verður avgreidd.
- at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, treytað av at hetta verður boðið út alment.

Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út í kommununi.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

**Tekniska nevnd 03. november 2025:** Anja Weyhe tekur undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út til arbeiðstakarar í Tórshavnar kommunu.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:**
Annfinn Brekkstein skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd. Tað varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

**Atkvøddu fyri:** Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttorm í Skála, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í allari viðgerðini av málinum.

Bergur Robert Dam Jensen luttók ikki í viðgerðini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum, men hevði ynskt, at endalig avtala fekst við festaran áðrenn.

Bergur Robert Dam Jensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Tikið av skrá.

# 274/25 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 105/25 | 25/05791-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 107/25 | 25/05791-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 188/25 | 25/05791-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 190/25 | 25/05791-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 244/25 | 25/05791-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | | | 25/05791-1 |
| 9 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 274/25 | 25/05791-1 |

**Upprunin til málið**
Rakstrarjáttanin kt. 6510, kirkjugarðar, hevur verið undir stórum fíggjarligum trýsti seinastu árini.

Yvirskipað eru fleiri grundir til fíggjarliga trýstið, og niðanfyri síggjast nakrar av orsøkunum:
- Størri krav til røktina á kirkjugørðunum
- Slátturin av grasinum verður í størri mun boðin út. Síðani 2020 er allur sláttur boðin út.
- Fleiri og størri kirkjugarðar at røkja.
- Fleiri jarðarferðir
- Lønarviðurskiftini
- Leiga av amboðum

Ynski er at fáa standin og raksturin á kirkjugørðunum at verða raðfestan, soleiðis at kirkjugarðarnir í kommununi verða røktaðir við tí tign og virðing, sum verður kravt av teimum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 varð játtanin hækkað við kr. 1.700.000, sí mál nr. *24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*, umframt at kr. 900.000 vórðu játtaðar sum eykajáttan til kt. 6510. Í 2023 hevði kontan eitt hall á kr. 380.000, sum hendan eykajáttanin somuleiðis mátti dekka.

Í máli nr. 24/01618 varð somuleiðis samtykt, at umsitingin skuldi venda aftur í nevnd við einum uppskoti um, hvussu raksturin í kirkjugørðunum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini.
Hetta varð ongantíð gjørt, og nú eru kirkjugarðarnir komnir aftur undir býararkitektin og Býarskipanardeildina. Í hesum sambandi hava býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum gjøgnumgingið virksemið og játtanina fyri fíggjarárið 2025.

Lønarviðurskifti
Lønarviðurskiftini eru í einari fastari og støðugari legu og kemur lønarjáttanin fyri 2025 tískil væntandi at halda

Dagføringar av amboðum og rakstrargøgnum:
- Amboðini á kirkjugørðunum verða í høvuðsheitum leigaði frá Verkstaðnum. Onkur eldri amboð eru tó uttanfyri hesa leiguskipan, og verða nú tí tørvur er at skifta tey út, koyrd undir somu leiguskipan. Hetta gevur hægri útreiðslur til leigu, men framtíðar útreiðslurnar til viðlíkahald koma at lækka.
- Ítøkiliga fevnir hendan útskiftingin um stóru og lítlu gummigedina og ein arbeiðsbil.
- Samanlagt kosta hesar dagføringarnar fyri árið 2025 kr. 253.660 afturat í leigukostnaði.

Grundrakstur:

- Harumframt verður játtanin brúkt til keyp av vørum og tænastum til at fremja grundleggjandi rakstrarlig arbeiðið á kirkjugørðunum, sum t.d. fevnir um:
    - Olju-nýtsla
    - El-nýtsla
    - Keyp av vørum (klæðir, nummarpelar til gravir, formar til gravir osfr.)
- Samanlagt kemur hesin parturin av játtanini at kosta uml. kr. 666.000, harav játtanin til hendan partin liggur á kr. 1.090.000, sostatt eru einans uml. kr. 424.000 eftir til uttanhýsis røktina.

Grøna røktin/slátturin á kirkjugørðunum:
- Býarskipanardeildin bjóðaði fyrr í vár grønu røktina út á kirkjugørðunum. Uttanhýsis veitararnir hava latið tilboð inn, og liggur røktin samanlagt á áljóðandi kr. 2.729.864 pr. ár.
- Av tí at partur av árinum 2025 er farið, so krevst einans fígging til ein part av hesum tilboðunum áljóðandi kr. 1.999.076.
- Røktin fevnir um sláttur á teimum 13 kirkjugørðunum í kommununi, umframt røkt av runnum.
- Í 2024 kostaði uttanhýsis røktin kr. 1.231.500, harav kr. 162.500 ikki vórðu goldnar í fíggjarárinum 2024, men eru goldnar í ár 2025.
- Tøka játtanin til hetta arbeiðið er kr. 424.000 *(sí omanfyri standandi punkt "Grundrakstur")*, og sostatt mangla kr. 1.575.000, fyri at játtanin skal halda.

Játtanin fíggjarárið 2025 til kt. 6510, kirkjugarðar, er áljóðandi **kr. 6.005.000**.

Út frá kendu útreiðslunum, lýstar omanfyri, umframt eini meting av hvat raksturin fyri økið annars kemur at verða í 2025, so er støðan tann, at játtanin má hækkast við tilsamans **kr. 1.895.221** fíggjarárið 2025. Sí skjal *j.nr. 25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*, sum lýsir útreiðslurnar.

Ítøkilig fevnir hendan økingin um:
- Øktur leigukostnaður í samb. við átroðkandi útskifting av amboðum á áleið kr. 253.660.
- Tørvur til uttanhýsis røktina á kr. 1.575.000 hægri enn verandi játtan rúmar.

Partur av hesi upphæddini, kr. 1.183.000, kann fíggjast av *kt. 6575, L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*. Fyri íløguna, *L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*, merkir hetta, at arbeiðið at seta gróðursetingar- og innbúgvsætlanina í verk ikki verður raðfest í 2025, eins og *mál nr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum*, lýsir.

Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, verður mælt til at játta av meirinntøkunum fyri 2025, ella í øðrum lagi at støða verður tikin til hetta seinni í heyst.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Dagligi raksturin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu fevnir um tilsamans 13 kirkjugarðar, har kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, sum er nógv víðkaður og útbygdur hesi seinastu árini, er nógv tann størsti kirkjugarðurin í kommununi.

Hinir kirkjugarðarnir liggja spjaddir í ymsu bygdunum, ið eru komnar upp í Tórshavnar Kommunu gjøgnum árini. Eisini er onkur nýggjur kirkjugarður komin afturat, t.d. nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík.

Í kjalarvørrinum av hesi gongdini er umsitingin, røktin og viðlíkahaldið av kirkjugørðunum vorðin rættiliga umfatandi, men játtanin til konto 6510, Kirkjugarðar, hevur ongantíð verið dagførd samsvarandi hesi gongdini, og tískil er neyðugt at virða, at ásetta játtanin ikki røkkur til veruliga raksturin og neyðuga viðlíkahaldið.

Seinastu nógvu árini hevur konta 6510, Kirkjugarðar, havt árligt hall/meirnýtslu. Niðanfyri sæst yvirlit yvir meirnýtsluna á kontuni síðani 2015.

| Kirkjugarðar | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 2.917 | 3.270 | 3.397 | 4.395 | 4.569 | 4.616 | 4.698 | 4.082 | 6.005 |
| Hækkan í % | 2% | 12% | 4% | 29% | 4% | 1% | 2% | -13% | 47% |
| Framflutt | -707 | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 |
| Broytt framflyting frá ymiskum kontum | | 1.229 | | 100 | 300 | | | 900 | |
| Eyka játtan | | | 172 | | | | 3.500 | 1.700 | |
| Játtan í alt | 2.210 | 3.233 | 3.397 | 4.421 | 4.573 | 3.872 | 5.678 | 6.302 | 5.903 |
| Nýtsla | 3.476 | 3.405 | 3.471 | 4.717 | 5.317 | 6.392 | 6.058 | 6.404 | |
| Avlop/Meirnýtsla | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 | |

Mælt verður til, at hædd verður tikin fyri hesi gongdini í sambandi við gerð av Fíggjarætlanini 2026, og at játtanin verður stillað samsvarandi ítøkiligu metingunum fyri rakstrarjáttanina.

Leiðarin av kirkjugørðunum og býararkitekturin hava gjørt eina meting av árliga kostnaðinum at reka kirkjugarðarnar í kommununi, soleiðis at kirkjugarðarnir frameftir verða riknir við tí tign og virði, ið hoyrir til henda raksturin. Metingin tekur støði í búskettinum fyri 2024-25 og sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*.

Búskettið fyri raksturin er sett upp við støði í kostnaðum frá 2024-25, og er lønin sett at vera tann sama í komandi ári, hóast lønarútreiðslurnar helst hækka nakað samsvarandi árligu stillingunum.

So statt eigur framroknaða játtanin 2026 í skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026,* at taka hædd fyri møguligum prísvøkstri, umframt natúrliga lønarvøkstrinum í samb. við ger av fíggjarætlanini 2026.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
jnr. 24/01618, Umbøn um eykajáttan til konto 6510
jnr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verkstaðið vísir á, at verandi amboð/maskinur, sum ikki eru í leiguskipanini, eru í so mikið ringum standi, at tørvur er at skifta tey út, longu í 2025.

**Skjøl**
*24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*
*25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*
*25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6575 | L65008 | Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum | 6510 | | Kirkjugarðar | | 1.183.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.183.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.183.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 1.183.000 av kt. 6575, L65008, Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar,
- at játtan til írestandi kr. 787.779 verður tikin til viðgerðar seinni í heyst.
- og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt var fyrst um at beina málið aftur í fíggjarnevndina eftir uppskoti frá Annfinni Brekkstein.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri at taka undir við tilmælinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Samtykt varð við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari at taka undir við tilmælinum og beina málið víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tróndur Sigurðsson skeyt upp sum broytingaruppskot, at býráðið skuldi hava eina frágreiðing fíggjarstøðuna og reglusemi, áðrenn eykajáttan verður latin jakstrarstaðnum.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: Ongin

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 8 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið:
Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddi: Ongin

Samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

**Ískoyti:**
Upprunin til málið er, at raksturin á kirkjugørðunum hongur ikki saman í mun til játtanina fyri 2025. Víst verður til skjal nr. *25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025.*

Árið er meiri enn hálvrunnið, og eru ongar broytingar í væntaðu útreiðslunum. Fram til dags dato hava tað verið 109 jarðarferðir í kommununi. Hetta er áleið tað sama, sum fyri 2024, og tískil kann væntast at tað verður áleið sama tal av jarðarferðum samanlagt í 2025 sum í 2024.

Í dag starvast 3 arbeiðsmenn á kirkjugarðinum í føstum mánaðarløntum starvi, umframt leiðarin fyri kirkjugarðarnar. Harumframt eru tað 2½ arbeiðsmenn í tímaløntum starvi.

Røktin, sum fevnir um grassláttur og viðlíkahald av runnum osfr., í teimum 13 kirkjugørðunum er øll boðin út til privatu vinnuna, og liggur røktin fyri allar kirkjugarðarnar í 2025 á kr. 2.700.000.

Fyrr var røktin gjørd av arbeiðsmonnunum í kirkjugarðinum, men síðani fólkatalið er økt, og harvið eisini talið av jarðarferðum, hava arbeiðsmenninir ikki havt stundir til somuleiðis at taka sær av røktini. Tískil verður røktin boðin út til privatu vinnuna.

Ein møguleiki er sjálvandi at seta fólk í starv at taka sær av røktini í kirkjugørðunum. Upphæddin á kr 2.700.000 hevði upplagt verið til at fíggja eini 5 starvsfólk umframt til keyp av plantum og innbúgvi til kirkjugarðarnar.

Á seinasta býráðsfundi vórðu kr. 1.183.000 játtaðar afturat rakstrarjáttanini á kr. 6.006.000. Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, skal tí fíggjast, um játtanin ikki skal fara í trot, tá árið er liðugt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eykajáttan | ☒ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 887<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6510 | | Kirkjugarðar | |

| **Upphædd** |
|---|
| 787.779 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 787.779 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.895.221+6.006.000 |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 787.779 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar.
  og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein minniluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til viðkomandi viðgerð á býráðsfundi um at ein næri frágreiðing skal fyriliggja, áðrenn støða kann verða tikin til málið.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið til tvær viðgerðir í býráðnum, eisini verður heitt á umsitingina um at koma frágreiðing áðrenn býráðsfundin og uppskotið um, hvussu raksturin av kirkjugørðum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini til næsta fíggjarnevndarfund.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fáa óheftan løgfrøðing at kanna um nakað skeift er farið fram.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen

Síðani varð atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at gera eina óhefta kanning av fíggjarstøðuni og regluseminum.
Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og eini blankari atkvøðu.

Atkvøddu fyri: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer, Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Atkvøddu ímóti: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Atkvøddu blankt: Heðin Mortensen

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

# 275/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 183/25 | 25/01100-7 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 275/25 | 25/01100-7 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið snýr seg um at endurskoða byggisamtyktina fyri Kirkjubø og hevur sín uppruna í máli um Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri allar bygdirnar í kommununi, sí *45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*

Fyri fleiri av bygdunum, harímillum Kirkjubø, eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar í síni heild, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar torskildar og truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Hetta málið er harumframt eitt framhald av málinum *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø,* j.nr. *22/00590,* sum ítøkiliga snýr seg um endurskoðanina fyri byggisamtyktina í Kirkjubø, sí *Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*

**Lýsing av málinum**
Kirkjubøur er saman við Velbastað fevnt av byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað, ið varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur og Velbastaður fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar eru samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C1A: Vinnuendamál
D: Havnarøki
D 1: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss
H: Frílendi
H 1: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki

B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

- B: Sethúsaøki er broytt til A: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A: Vinnuendamál eru broytt til B2: Vinnuøki.
- Tey bæði havnarøkini D: Havnarøki og D 1 : Ferjuhavn, eru broytt til B1: Havnarøki.
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til D2: Almennir stovnar og mentan.
- G: Neyst og bátapláss er broytt til E: Neyst.
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og H 1 : Friðað øki eru broytt til D1: Frílendi.
- J: Bóndahús er broytt til G: Bóndahús.
- K: Landbúnaður er broytt til 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ítøkiligu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Upprunaliga uppskotið (sí skjal *25/01100-14, Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*) varð samtykt í býráðnum 21. mars 2024 og lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum millum 22. novembur og 29. januar 2025. Kommunan móttók fimm hoyringarskriv (sí *Viðmerkingar og broytingaruppskot)* umboðandi borgarar í Kirkjubø og Tjóðsavnið, og verða allar viðmerkingarnar viðgjørdar niðanfyri.

Samanumtikið snúgva viðmerkingar seg um at verja dámin, og at leggja fleiri økir út til sethúsaøki. Eitt møguligt neystaøki eigur at endurhugsast í øðrum staði. Mótstríðandi sjónarmið eru um miðstaðarøkið í bygdini, har ynskið annaðhvørt er, at økið skal mennast til ferðavinnuendamál, ella nýtast sum nýtt bústaðarøki. Tjóðsavnið vísir á týdningin, at møgulig bygging í Kirkjubø verður framd varliga og í samráð við friðingarmyndugleikar.

- **Øki C og øki G, sambært uppskotinum, skal kunna nýtast sum ferðavinnuligt øki**

Bygningsleivdir o.a. vitjunarvert í økinum skal kunna gagnnýtast av festinum í ferðavinnuligum samanhangi bæði nú og framyvir. Øki C, sambært uppskotinum, er egnað til útbygging og nýbygging av ferðvinnuvirksemi. Víst verður á, at gamla fjósið (í uppskotinum í øki G) ikki longur er egnað til landbúnaðarligt virksemi, og at tað er meira skynsamt, at bygningurin verður dagførdur við ferðavinnuligum endamálum. Byggisamtyktin skal stuðla og ikki forða framtíðar útbygging og umvæling av bygningum til hesi endamál.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Eftir nærri viðgerð í umsitingini verður mett óhóskandi at útbyggja bøin omanfyri Gamla veg. Mett verður, at fløtan eigur at verða varðveitt, soleiðis at dámur og sýnið heim í gomlu bygdina verður tryggjað.*

*Umsitingin er samd í, at gamla fjósið kann mennast og endurnýtast til ferðavinnuligt endamál, og hevur gjørt eitt nýtt uppskot, har ásetingar fyri miðstaðarøkið vera galdandi millum fjósið og havnarlagið. Partur av óbygda bønum eystanfyri verður broyttur til D1 øki (frílendi).*

**Til tess at tryggja, at bygging í øki C verður framd við fyriliti til serstaka økið, metir umsitingin, at tað er neyðugt at rætta punkt 2 í øki C, sum nú sigur:**

*"Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki. "*

soleiðis at tað ístaðin stendur:

*"Bygging verður einans loyvd sambært heildarætlan, sum sýnir, hvussu økið verður skipað, og sum verður góðkend sum serstakt skjal av býráðnum og avvarðandi myndugleikum."*

- **Fleiri bústaðarøkir**

Í broytingaruppskotið (10 undirskriftir) verður grundgivið fyri at leggja fleiri nýggj bústaðarøkir afturat. Sambært viðmerkingini er tað av alstórum týdningi at veita møguleika at byggja fleiri bústaðir skjótt, soleiðis at yngri fólk leggjast afturat og bygdin verður framtíðartryggjað. Hesi ítøkiligu broytingaruppskot verða nevnd:

- **Mælt verður til at øki C (miðstaðarøki) sambært uppskotinum verður broytt til øki A (sethús).**

Hetta økið kann sambært viðmerkingini leggjast til bústaðarbygging á ein skjótan og ómakaleysan hátt, av tí at tekniskar leiðingar liggja tætt við. Víst verður eisini á, at nógv orka hevur verið løgd í at menna ferðavinnuna í Kirkjubø seinastu árini, og er hendan broytingin tískil ein tiltrongd umraðfesting.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til viðmerking omanfyri metir umsitingin, at økið hevur týdning sum óbygt frílendi, og verður frámælt at byggja nýggjar bústaðir so tætt at søguliga økinum, ið telist millum mest vitjanarverdu býlingar í landinum.*

- **Fleiri sethús í Lágabø**

Mælt verður til, at sethúsaøkið í Lágabø verður økt, soleiðis at møguleiki verður at byggja eitt hús hvørjumegin vegin, við innkoyringina til býlingin, umframt at vegurin verður longdur, soleiðis at pláss verður fyri umleið fýra sethúsum vestanfyri.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin er jalig fyri møguleikanum at víðka sethúsaøkið, og hevur tillagað uppskotið samsvarandi broytingaruppskotinum, soleiðis at býlingurin hevur møguleika at veða víðkaður í framtíðini. Byggisamtyktarøkið verður víðkað sambært eini ætlan, har mælt verður til grundstykkjavíddir á uml. 400m$^2$, umframt at pláss verður lagt av til parkering.*

- **D1 økið millum Geilina og Ovaraveg skal broytast til A (sethús)**

Mælt verður frá at áseta frílendi, har galdandi F økið sambært uppskotinum verður broytt til D1 (partur av matr. nr 25b). Spælipláss við fótbóltsvølli er staðsett nærhendis, og sambært grundgevingini er bygdin mestsum eitt stórt frílendi. Ístaðin átti hetta økið at verið broytt til sethúsaøki.

Síðani hoyringsfreistin er farin, hevur kommunan samskift við eigarar av matr. nr. 25b, (sí mál mál nr. J.nr. 25/06086) og ynskja tey somuleiðis, at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at fríøkið framyvir verður broytt til sethúsaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Staðsetingin av matr. nr 25b er miðskeiðis í bygdini, har fleiri vegir renna saman, og er eingin beinleiðis atkomuvegur til økið. Tískil eru umstøður, ið tala fyri, at økið verður ment sum fríøki ella spælipláss fyri*

*bygdina. Hóast ásetingar fyri F-alment fríøki hava verið galdandi síðani áðrenn kommunusamanleggingina, er henda ætlanin ongantíð framd, og ístaðin er spælipláss staðsett á matr. nr 20c.*

*Mælt verður til at ganga viðmerkingini á møti, so at sethúsaøkini omanfyri Geilina og Ovaraveg hava møguleika at verða knýt saman í framtíðini. Sambært matrikkullógini § 17 stk 8, kunnu matriklar ikki býtast frá, uttan við atgongd til almennan veg, og er menning av økinum tískil treytað av, at eigari tryggjar nøktandi vegatkomu.*

- **A økið vestan fyri "Inni á Fjósi 6" verður broytt til C øki**

Ynskið er ikki, at Kirkjubøur skal mennast sum ein long og "óbygdaslig" bygd. Økið vestan fyri Inni á Fjósi 6 eigur heldur at verða lagt av til íbúðarbygging, sum kann tryggja, at eldri borgarar í Kirkjubø fáa møguleika at selja hús og flyta í minni íbúð. Hetta kann skapa umstøður, so yngri familjur fáa gagnnýtt hús í bygdini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan er omanfyri 300 m langur geiri avsettur til sethúsabygging omanfyri grúsvegin vestan fyri Inni á Fjósi 6. Henda ásetingin hevur verið galdandi síðani 80'ini, uttan at útstykking er framd. Umsitingin er samd í, at tað ikki er ynskiligt at menna kirkjubø sum eina avlanga og smala bygd.*

*Umsitingin metir tó ikki, at íbúðarbygging hóskar til dámin í Kirkjubø, og mælir tískil frá at leggja økið av til C-miðstaðarbygging. Ásetingar til miðstaðarbygging hava til endamáls at skipa tætta og fjølbroytta bygging miðskeiðis í bygdini.*

*Mælt verður til at strika nevnda byggilendið, og at støða kann takast til nýtslu, snið o.a. í samband við eina ítøkiliga bygdaætlan.*

- **Leggja áseting afturat, sum tryggjar, at sethús hava mønureising, eru svørt/myrk og hava hvít ella reyð vindeygu.**

Ynskið er at gera ásetingar, sum tryggja dámin, tá bygdin í framtíðini verður ment.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Verandi dámur, har flestu sethúsini hava mønureising, eru svørt, hava reyð ella hvít vindeygu, er staðbundin siður, ið hevur ment seg uttan treytir í byggisamtyktini. Av tí at talan er um serstakt arkitektoniskt brigdi fyri Kirkjubø, sum umsitingin metir er vert at verja, er uppskot um áseting lagt afturat, sum hevur til endamáls at verja henda dámin framyvir.*

*Umsitingin gongur viðmerkingini á møti við at strika møguleika at byggja sethús við einvegis takhalli, og leggur niðanfyristandandi orðing afturat ásetingum galdandi fyri umráðispart A:*

*"10. Dámurin skal varðveitast í samsvari við føroyskan byggisið. Framsíður og skjøldrar skulu vera úr viði og skulu vera svørt ella myrk. Vindeygu skulu vera hvít ella reyð. Tekjur skulu vera svartar, grønar ella flagaðar."*

- **Óheppin hæddarbroyting í sethúsaøki**

Mest loyvda hædd til mønu í sethúsaøkjum hækkar úr 8 m upp í 9 m, og hetta kann føra til óhóskandi hús í bygdarmyndini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Av tí at galdandi áseting tekur útgangstøði í miðaljørðildi, so merkir tað í veruleikanum, at hús í brøttum lendi, og í ávísum førum kunnu byggjast upp um 9 m. Dømir eru um, at hús eru bygd hægri enn 8 m í Kirkjubø. Uppskotið tekur útgangstøði í, at mátað verður frá planeringskotu, og er betri í samsvari við bygging, har innleggingar so sum ventilatión er millum hæddirnar.*

*Broytingin merkir tó, at í sløttum lendi sleppa hús hægri enn í verandi áseting, men av tí at onki nýtt sethúsaøki er lagt út upp at søguligu húsunum, metir umsitingin ikki at henda ásetingin viðførir týðandi broytingar í bygdamyndini.*

- **Ynskið um at tryggja íbúgvum úr Kirkjubø fyrsta rætt til nýggj grundstykkir**

Ynskið er, at skipan verður sett í verk, sum hevur til endamáls at tryggja, at borgarar búsitandi í Kirkjubø koma í fyrstu røð, tá ið nýggj grundstykkir vera útlutaði. Lagt verður afturat, at borgarar við tilknýti til bygdina (t.d. tey, ið eru uppvaksin í Kirkjubø) koma í aðru røð.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Treytir í sambandi við útlutan av grundøkjum hoyra ikki til ásetingar í byggisamtykt.*

*Býráðið hevur í 2023 samtykt reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, og stríðir broytingaruppskotið ímóti reglugerðini, sum raðfestir borgarar við skrásettum bústaði í Tórshavnar kommunu, umframt føroyingar í lestrarørindum. Ynskjast aðrar treytir fyri Kirkjubø, verður mælt til at taka málið upp í serstøkum málið, sum í fyrstu atløgu skal takast upp í staðbundnu nevnd.*

- **Bústaðarskylda**

Bygdin er lítil og tað hevur stóran týdning, at hús ikki standa tóm. Mælt verður til bústaðarskyldu, og at tryggja langtíðarleigumál, soleiðis at hús ikki vera bygd ella keypt við stutttíðarútleigu (summarhús) sum endamáli.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Ein býarskipanarlig avbjóðing í allari kommununi er at fyribyrgja, at býlingar standa tómir, og er tað ynskiligt, at hetta framyvir í størri mun verður skipað í summarhúsaøkjum (F øki í byggisamtyktini). Umsitingin hevur í hesi løtu ikki heimild at seta krøv um bústaðarskyldu í byggisamtykt, men hevur áður heitt á landsmyndugleikar at fáa møguleikar til tess. Umsitingin hevur eisini heitt á landsmyndugleikar um at fáa heimild at avmarka stutttíðarleigu.*

- **Staðseting og ásetingar fyri neystaøkið**

Eigari av neystagrund matr. nr 17 vísir á, at økið sambært uppskotinum verður innan fyri øki C, har byggi- og nýtslustigi er ávikavist 0,25 og 0,5, og ynskir at hendan ásetingin verður broytt, soleiðis at byggjast kann út í mark, sum vanligt er í neystagrundum.

Í einum øðrum hoyringsskrivi sigur sami borgari, at staðseting av neystaøkinum sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum er óheppin, tí at um økið verður nýtt til nýggja neystabygging fer tað at hava neiliga umhvørvisliga ávirkan á fugla- og djóralívið.

Mælt verður ístaðin til at leggja neystaøkið á Gomlurætt, har tað er somuleiðis er møguleiki at menna eitt øki til frítíðarlív kajakk/seyðaberg o.a.

Tjóðsavnið vísir somuleiðis á, at tað sambært uppskotinum verður møguligt at byggja neyst upp í 7 m, og at hendan hæddin er alt ov dominerandi. Sambært Tjóðsavninum er tað er óheppið, um frítíðarhús verða bygd fram við fjøruni – serliga í Kirkjubø.

Tað verður **staðfest**, at tað helst er **ein feilur**, at uppskotið loyvir frítíðarhús í neystum, tí býráðið samtykti tað øvugta, sí mál mál (*J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*).

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin er samd í viðmerkingini frá Tjóðsavninum viðv. neystabygging, ið loyvir frítíðarbústøðum í Kirkjubø, og er talan um ein feil, tá útgávan við hesi áseting varð løgd til almenna hoyring. Umsitingin gongur mótmælunum frá borgara og Tjóðsavninum á møti við at gera nýtt uppskot, har neysatøkið fram við fjøruni verður broytt til D1-frílendi.*

*Gomlu neystagrundirnar (matr. nr. 17, 11, 14 og 26) kunnu annaðhvørt flytast í einum møguligum makaskifti, ella byggjast uppaftur í verandi staðseting, men um tað seinna verður gjørt er, sum víst á í viðmerking omanfyri, neyðugt at loyva bygging út í mark (tvs. eitt byggistig á 1), og eitt tilsvarandi nýtslustig. Umsitingin mælir til, at varðveita C øki, men at leggja viðkomandi áseting og tabel afturat, sum loyvir einum øktum nýtslu- og byggistigið í takt við minkandi matrikkulvídd. Tá ið matrikkulvíddin er 50m$^2$ ella minni, verður byggistigið og nýtslustigið 1. Endamálið við tílíkari áseting er, at møguleiki verður at byggja bygningar við íblástri frá gomlu neystarøðini upp aftur, og at hesir í framtíðini eisini kunnu brúkast til miðstaðar endamál. Áseting um, at bygging einans verður loyvd sambært góðkendari heildarætlan í øki C, hevur til endamáls at tryggja, at ein møgulig bygging á matr.nr 17, 11, 14 og 26, verður framd við virðing fyri søguliga nærumhvørvinum.*

*Møguleiki er at skipa neystabygging í leingjan av einum frítíðardepli á Gomlurætt. Tó metir umsitingin, at tað er skilabest, at møgulig byggisamtyktarbroyting í hesum sambandi eigur at veða gjørd, eftir at umstøður fyri hesum eru betri kannaðar, og ein møgulig ætlan fyriliggur.*

- **Óheppin broyting av lendingini til byggiøki (B1)**

Sambært uppskotinum verður **lendingin og grótkastið broytt til B1-øki**, og er **møguleiki at byggja á økinum**. Hetta verður mett sum **óhóskandi**, hóast 12 m frástøða frá bryggjutrom er ásett.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
Sambært uppskotinum kann ikki byggjast nærri enn 12 m frá bryggjutromini, og verður tískil fyribyrgt at byggjast kann í økinum. Tó staðfestir B1 ásetingin at økið verður tilskilað virksemi, ið hevur við havnarøki at gera, og metir umsitingin at ásetingin tískil er hóskandi.

- **Ógreið og mótsigandi áseting um landbúnaðarøki (G)**

Gamla J-økið (“Bóndahús”) er broytt til G-øki, men **ásetingin er ógreið**. **Stóra fjósið** frá 1800-talinum liggur í hesum øki og hevur mentanarligan týdning**.**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til fyrstu viðmerking og svar frá umsitingini, er ásetingin í fyrsta uppskotinum sannlíkt ikki hóskandi, og verður økið í nýggjum uppskotið lagt til C miðstaðarbygging, sum rúmar møguleika fyri meira fjølbroyttum virksemi.*

- **Avtøka av friðaðum øki (H1) – uttan samráð við Tjóðsavnið**

Verandi **H1-øki (friðað fornminnaøki)** verða sambært uppskotinum tikin burtur og løgd sum D1-øki (frílendi).

Hetta er **óhóskandi**, tí H1-økini vóru gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið fyri at tryggja fornminni. Slík broyting **eigur at verða viðgjørd saman við Tjóðsavninum** áðrenn. Tá fornminnaøkini **ikki eru sjónlig á kortinum**, er vandi fyri, at tey **verða yvirsædd í framtíðar byggiplanum**.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin hevur atgongd til kort, sum lýsa fornminnir, og er tað týdningarmikið, at hesi eru dagførd, almenn og eftirfarandi, í sambandi við viðkomandi málsviðgerð av byggisamtyktum og broytingum av býarplanum. Umsitingin metir ikki, at tørvur á at áseta friðað økir í serligum umráðisparti, sum núgreinar orsøk fyri, at eitt øki verður lagt til frílendi, tá ið D1 økið lýkur hesa treyt.*

*Umsitingin ásannar tó, at serlig lendiseyðkennir og fornminnir kunnu gerast meira sjónlig á talgiltum kortum, til tess at gera tað lættari at síggja, hvørji og hví ávís økir í framtíðini krevja viðgerð og hoyring hjá friðingarmyndugleikum.*

- **Ov víðgongd bygging í miðstaðarøki (C)**

Verandi E-øki (almennir stovnar) verður víðkað og broytt til **C-øki (miðstaðarbygging)** heilt oman í fjøruna. Ásetingin loyvir **handlum, gistingarhúsum og matstovum**, sum **ikki hóskar til bygdina ella til fornminnaøkið**.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin metir, at virksemi so sum handil, matstova og gistingarhús kann hóska til bygdina, um hetta verður bygt og umsitið við serligum atliti til søguliga dámin og verandi virksemi. C økisparturin verður mettur at hóska til bæði farstøðina og parkeringsplássi, sum tænir gomlu bygdini og øllum virkesminum har.*

- **B2 økið hóskar ikki á matr. nr 3b og part av matr. nr. 3a**

Økið við vakstrarhúsið norðan fyri Gomlurætt, sum í løtuni er lagt av sum C1A øki, vinnuvirki, ið hevur við matvøruframleiðslu at gera, verður broytt til B2 øki, vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt. Tjóðsavnið viðmerkir, at talan er um eina stóra broyting, har farið verður frá landbúnaðarvirksemi til vinnuvirksemi yvirhøvur.

Náttúrufriðingarnevndin (og síðani yvirfriðingarnevndin) kann geva loyvi til bygging uttangarðs í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Um økið verður broytt til at kunna rúma annað virksemi, má hetta í øllum førum til viðgerðar sambært náttúrufriðingarlógini. Tjóðsavnið heldur tað vera skeivt at leggja vinnuligt virksemi úti í náttúruni. Sambært uppskotinum kann byggjast upp til 10 m hædd í B2 økjum, og er hetta sambært Tjóðsavninum alt ov nógv í einum tílíkum lendi. Tað eigur ikki at vera loyvd hægri bygging enn verandi. Tjóðsavnið skjýtur upp, heldur at broyta ásetingina fyri økið til at vera 4. grundumráði.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Viðkomandi øki verður nýtt til vinnuligt virksemi, og er B2 samsvarandi áseting í uppskotinum um at endurskoða byggisamtyktina. Umsitingin ásannar, at um alt økið, soleiðis sum tað er ásett í uppskotinum, verður víðkað til vinnuligt virksemi, umframt at bygt verður í 10 m hædd, er talan um eitt ógvusligt inntriv.*

*Í nýggjum uppskotið verður markið broytt til økið kring bygningin, og tryggjar hetta, at tað ikki verður møguligt at byggja hægri enn verandi bygning.*

- **Ógreiðleikar og ósamsvar í byggisamtyktini og býarskipanini**

At enda vísir Tjóðsavnið á, at umráðispartar (D2 og F) eru **nevnd í byggisamtyktini**, men **síggjast ikki á kortinum (býarplaninum)**. Hetta ger tað **torført at fáa greiðu á, hvat í veruleikanum verður broytt.**

***Umsitingin hevur hesar viðmkeringar:***
*Tað er rætt, at ásetingar verða nevndar í uppskotinum um nýggja byggisamtykt, sum ikki eru at síggja í kortinum (býarplaninum), og ásannar umsitingin, at hetta kann tykjast ógreitt. Orsøkin til hetta er, at tað verður mett hóskandi, at nýggja byggisamtyktin fevnir um møguligar ásetingar, sum eru galdandi fyri aðrar bygdir í kommununi, soleiðis at tað er møguligt at brúka hesar ásetingar til hóskandi økir í býarplaninum í framtíðini, um tørvur er til tess. Hetta er leisturin, sum varð samtyktur í samband við málið um at endurskoða allar bygdirnar í kommununi (mál nr: 20/04243).*

***Samanumtikið***
Nýtt uppskot um byggisamtykt fyri Kirkjubø er orðað og sæst í skjalinum *Uppskot um almenna byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*. Samanumtikið eru sethúsaøkini (A) á kortinum broytt: Geirin vestanfyri inni á Fjósi 6 er strikaður. Bústaðarøkir eru løgd afturat fram við Lágabø og millum vegirnar Í Geilini og Ovara veg, samsvarandi við hoyringsskrivum. Og ein nýggjur geiri er teknaður í matr. nr. 15a oman fyri Ovaraveg. Staðbundna nevndin hevur borið mál fram um at finna fleiri sethúsastykkir (sí mál 25/04052), og eru hesar broytingar í samsvari við hetta mál.

Treytir um, at nýggj sethús skulu hava sama dám, eru skrivaðar í byggisamtyktina. Neystaøkið (E) og Bóndahús (G) økini eru tikin burtur úr uppskotinum, og eru ásetingar fyri miðstaðarøki (C) broyttar, soleiðis at markið er rættað og fevnir um gamla fjósið, meðan bøurin millum spæliplássið og bussterminalin í stóran mun er lagdur sum frílendi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *J. nr. 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*
- *J.nr. 21/03382 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*
- *J.nr. 25/06086 Umsókn um broyting av fríøkið matr. nr. 25b, Ovarivegur 16, Kirkjubøur*
- *J.nr. 25/04052 Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3)

Byggimáldeildin setti eisini spurnatekin við, um heimild er at loyva/sýta ávísa vegetatión, soleiðis sum orðað í innleiðandi tekstinum undir yvirskriftini “Endamál”. Innleiðandi teksturin í byggisamtyktini er tikin úr galdandi byggisamtykt, og er ynskiligt at varðveita tekstin, áðrenn ein nýggj bygdaætlan er dagførd fyri Kirkjubø. Upprunaliga brotið, sum sipar til planting av trøum og runnum kring vegir og býlingar er tó fyribils tikið úr, vísandi til viðmerking um væntandi heimild at kunna krevja/sýta ávísa vegetatión.

At enda viðmældi byggimálsdeildin at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologiskt fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Býarskipanardeildin vil taka hesa viðmerking til eftirtektar í eini komandi dagføring av byggisamtyktini.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
- *J.nr. 20/04243-1 45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 25/01100-14 - Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*
- *J.nr 25/01100-14 – Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*
- *J. nr. 25/01100-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kirkjubøur kort - áðrenn broyting*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J. nr. 25/01100-13 Almenna byggisamtyktin - Kirkjubøur - Við markeraðum broytingum*
- J.*nr.* 2*5/01100-13 Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting*
- *j.nr. 25/01100-13 Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, eini atkvøðu ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 276/25 Sethúsaútstykking í Kirkjubø - 24/01748

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 22.09.2025 | 16/25 | 25/08465-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 184/25 | 25/08465-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 276/25 | 25/08465-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin fyri Velbastað og Kirkjubø heitir á kommununa um at fáa sett á skrá sethúsaútstykking í Kirkjubø. Víst verður til upprunaligu málslýsingina fyri málið j. nr. 25/08465-2, *"Uppruna málslýsing_Sethúsaútstykking í Kirkjubø_24_01748"*.

**Lýsing av málinum**
Tað er samtykt í Byggi- og býarskipanarnevndini 03.06.2024, at umsitingin ger yvirskipað uppskot til hvussu útstykking kann skipast á matr. nr. 201a. Men grundað á manglandi tilfeingi,
so hevur umsitingin ikki havt neyðugu orkuna at lyfta málið enn, tí aðrar uppgávur hava verið raðfestar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 201a liggur í byggisamtyktini fyri Kirkjubø sum B-øki, sum er ætlað bústaðarbygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mál nr. 25/01100, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590, hevur ligið til hoyringar í tíðarskeiðinum 22. november 2024 til 29. januar 2025. Kommunan hevur móttikið fleiri viðmerkingar/mótmælir, og er viðgerðin av innkomnu viðmerkingunum enn ikki endaliga liðug, men verður málið lagt fyri staðbundnu nevndina til kunningar, tá viðgerðin er liðug.

Á borgarafundi í Kirkjubø, í samb. við hoyring av byggisamtyktini, gjørdu borgarar í Kirkjubø vart við, at teir ynskja at størri partur av haganum fram við Ovara vegi verður lagdur av til bústaðarlendi. Hetta somuleiðis við tí endamálið at stykkja út til fleiri sethúsastykkir.

Á borgarafundinum kom somuleiðis týðuliga fram, at tað ikki er semja millum borgarnar hvørs teir ynskja fleiri sethúsaútstykkingar ella ikki.
Tó kann vísast til mál nr. 25/04052, Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø, sum er mál, har stabundan nevndin fyri Kirkjubø vísir á týdningin av at raðfesta fleiri sethúsastykkir í Kirkjubø. Sí j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø".*

Umsitingin ynskir at raðfesta málið, so skjótt stundir er til tess.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/01748 Sethúsaútstykking í Kirkjubø
25/04052 Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø"*
j.nr. 25/08465-2, *"Uppruna málslýsing_Sethúsaútstykking í Kirkjubø_24_01748"*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 22. september 2025:** Kunnað varð um málið. Arbeitt verður víðari við broyting av byggisamtyktini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til, hvar byggjast kunnu fleiri sethús í bygdini.
Sí j.nr. 25/04052-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

***Økið í Geilini*** verður mett at vera væl egnað til útstykking. Frammanundan er lagdur breiður vegur í sambandi við undanfarnu útstykking omanvfyri vegin, og tí verður mett, at tað er skilagott at útbyggja á óbygda økið niðan fyri vegin. Talan er um eitt øki á um 2.464 m², sum rúmar sambært tekningini 5 grundstykkjum á uml. 435 m². Á tílíkum stykkjum kunnu byggjast hús á uml. 130 m² í grundarvídd.

***Økið í Lágabø*** verður somuleiðis mett væl egnað til útstykking. Í hesum økinum verður mælt til, at leingja verandi veg, soleiðis at pláss fæst til seks "ella fleiri" grundstykkir á uml. 435 m² hvørt framvið vegnum. Grundstykkjavíddin loyvir húsum á uml. 130 m² í grundarvídd. Framvið verandi vegi er somuleiðis møguligt at gera tvey grundstykkir, eitt niðanfyri vegin og eitt omanfyri vegin.

***Omanfyri Ovaraveg*** er somuleiðis møguligt at útstykkja eini seks grundstykkir á uml. 414 m² við húsi á uml. 130 m² í grundarvídd. Samlaða víddin er 4.160 m². í hesum økinum verður tó mælt til, at verandi vegur verður breiðkaður, soleiðis at hann gerst betur atkomuligur.

Sí viðhefta skjalið: j.nr. 25/04052-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin skal vísa á, at eingi av nevndu lendum eru kommunal, og tískil verður neyðugt at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna, um støða verður tikin til at fara undir at útstykkja í Kirkjubø.

Einasti festari, sum er hoyrdur í hesum málinum, er Dorthea Winther, sum varðar av matr. nr. 21a (Økið í Geilini). Sonur hennara, sum eftir ætlan skal yvirtaka festi frá mammuni, hevur víst á ynski at byggja bóndahús á økinum.
Sambært galdandi byggisamtykt liggur økið í økisásetingini B, sum er ætlað sethúsum. Hetta merkir, at sambært verandi byggisamtykt, er ikki loyvt at byggja bóndahús á økinum.

Grundin til, at allir festarar ikki eru hoyrdir í hesum málinum er, at hetta einans er uppskot til møguligar sethúsaútstykkingar. Staðsetingarnar eru valdar út frá einum býarskipanarligum vinkli, og við tí í huga, hvar tað gevur bestu meining at útstykkja til fleiri sethús í bygdini.

Alt eftir hvat politiski viljin er í mun til at útstykkja til fleiri sethús, so verða Búnaðarstovan og festarin tikin við í tilgongdina.

**Skjøl**
j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø"*
j.nr. 25/04052-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til,
- at støða verður tikin til, um farast skal víðari við ætlanini at útstykkja til fleiri sethús í Kirkjubø,
- og um tað verður samtykt at fara víðari við málinum, at tikið verður undir við at byrjað verður við økinum í Geilini.
- og at málið verður beint í staðbundnu nevndina fyri Velbastað og Kirkjubø til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið beinleiðis í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd. Broytingaruppskotið fall við átta atkvøðum ímóti og fimm atkvøðum fyri.

Atkvøddu fyri: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Atkvøddu ímóti: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið, nágreinandi at økið, ið útstykkingin fevnir um, er á síðu 5 í fylgiskjali 3. Málið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 277/25 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 107/25 | 25/06231-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.06.2025 | 42/25 | 25/06231-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 108/25 | 25/06231-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 155/25 | 25/06231-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 182/25 | 25/06231-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 226/25 | 25/06231-2 |
| 7 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 277/25 | 25/06231-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta mál er framhald av máli nr. 21/02624, Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.
Gamla málslýsingin sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c.*

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 203c bleiv í 2021 boðin út til raðhúsa- og/ella íbúðarbygging. Eitt tilboð varð móttikið, og varð tað samtykt at selja tilboðsveitara stykkið til raðhúsa- og íbúðarbygging. Men samráðingarnar rukku ikki á mál, og tí varð tilboðið avlýst.

Síðani varð økið boðið út í tveimum umførum í 2022, men grundað á, at eingi tilboð komu inn, varð samtykt at skipa økið til sethús, umframt at keypa nakað av lendi frá grannaognunum, soleiðis at sethúsaútstykkingin kundi skipast við grundstykkjum á 400 fermetar. Samráðingarnar við grannaognirnar komu væl ávegis, og økið varð boðið út til sethús.

Kommunan móttók tvey tilboð upp á at gera útstykkingina. Hallur Hansen, entreprenørur sp/f, vann útboðið, men grundað á, at kostnaðurin á sethúsastykkjunum gjørdist ov høgur, varð samtykt í býráðnum, at selja grundstykkini fyri kr. 500.000 pr. stk, og at játta kr. 2.500.000 fyri at fíggja írestandi fígging, sum kom at mangla í.

Kommunala eftirlitið tók málið upp og kom til ta niðurstøðu, at kommunur ikki kunnu fara undir útstykkingar, um tað frammanundan er greitt, at útstykkingin ikki kemur at hanga saman fíggjarliga og tær tí koma at áleggja skattgjaldaranum eyka útreiðslur

Samtyktin í býráðnum er tí ikki í samsvari við niðurstøðurnar frá kommunala eftirlitinum. Av hesi orsøk verður mælt til, at útboðið verður annullerað, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum mótvegis Tórshavnar kommunu, og møguligt endurgjald veitt honum í hesum sambandi.

Á várið 2025 varð arbeiðsbólkur settur at vísa á 7-10 átøk, sum kunnu gera sítt til at fremja málið um, at fleiri bústaðir verða bygdir komandi árini. Í hesum arbeiðinum lýsti átak E, at kommunur skuldu fáa loyvi til partvís at rinda fyri byggibúning. Tí verður mælt til, at farið verður aftur til upprunaætlanina við økinum, og harvið undir enn eina roynd at bjóða matr. nr. 203c út til bygging av raðhúsa- og/ella íbúðarbygging, har kommunan antin áðrenn ella samstundis luttekur í at skipa og gera vegin í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, tá ætlanin fyri økið er góðkend, og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið eigur at verða lagt fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði til kunningar, tá tað er samtykt í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Í núverandi støðu eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verandi útboð til sethúsaútstykking verður avlýst, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald verður latið.
- At nýtt útboð fyri matr. nr. 203c verður skipað til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjørdar verða keypsavtalur við ognararnar av matr. 209a, 308 og 309, og at játta upp til kr. 410.000 alt eftir endaligu fermetrunum íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022 útstykking Lygnnes.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við ymisku eigararnar av lendi niðanfyri matr. nr. 203c, Kollafjørður.

Viðvíkjandi matr.nr. 308
Søla av uml. 68 $m^2$, sum verður lagt afturat matr.nr. 308.
Keyp av uml. 418$m^2$, sum verður lagt afturat matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: netto 350 $m^2$ x 350 kr/$m^2$ = 122.500 kr.
Samstundis søkir eigari av matr.nr. 308, um sundurbýti av einum grundstykki á 500 $m^2$ burturav matr.nr. 308.

Viðvíkjandi matr. nr. 309
Keyp av uml. 971 $m^2$ av matr. nr. 309, sum verður lagt saman við matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: 971$m^2$ x 350 kr/$m^2$ = 339.850 kr.

Samlaður netto keypsprísur: 122.00 kr + 339.850 kr = **462.350 kr.**

Neyðugt verður harumframt at leggja upp fyri útreiðslum til matrikulering og tinglýsing v.m., mettar útreiðslur.

Leyslig útrokning av kostnaði til matrikulering:

| | |
|---|---:|
| Grundgjald | 4.000,00 |
| 3. frábýttir lutir ( 3.000 x 3 ) = | 9.000,00 |
| Gjald fyri virði 2 % av 1.427 $m^2$ á 350 kr. $m^2$ = | 9.989,00 |
| Tilsamans | 22.989,00 |

Tinglýsingargjald:
Tinglýsing: 1 % + kr. av hvørjum skeyti

Torført er at meta um, hvussu hetta ítøkiliga málið verður avgreitt, men talan verður helst um 3 skeytir.

Samlaður mettur keypsprísur 462.350,00 kr. x 1 % = 4.623,50 kr.+ 3.000 kr. = 7.623,50 kr.

Samlaður mettur kostnaður verður hereftir uml. **492.962,5 kr.**

Møgulig onnur sakargjøld og møguligar endaligar víddir kunnu víkja frá, og verður tí søkt um at fáa eina fígging til vega á kr. 500.000 til avgreiðslu av hesum málinum.

Á býráðsfundinum 18. juni varð samtykt at játta upp til kr. 410.000, alt eftir endaligu fermetrunum, íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes. Nú tá samráðingarnar eru komnar á mál, so er tørvur á nakað hægri fígging til at fremja endaliga keypið. Sí journal nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*, sum sýnir, hvat ítøkiliga keypið fevnir um.

**Skjøl**
Journal.nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*

**Tilmæli**

Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at hækka játtanina til keyp av lendinum við kr. 90.000 á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at játta kr. 200.000 til at fremja keyp av matr.nr. 308, 309 og 209a á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winher Poulsen, tekur undir tilmælinum og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

## 278/25 Stovnan av almannagagnligum bústaðarfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 238/25 | 25/10113-2 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 278/25 | 25/10113-2 |
| 3 Býráðsfundur | | | 25/10113-2 |

**Upprunin til málið**
Samgongan hevur í samstarvsskjalinum skrivað, at fólkið skal hava lættari atgongd til bústaðir, og at samgongan vil stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna og Bústaðir ætla í felag at stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum skal yvirtaka verkætlanina við Dalavegin (*Dalabú*). Hetta nýggja almannagagnliga bústaðarfelagið verður eigari av íbúðunum, meðan dagligi raksturin og umsitingin av leiguíbúðunum verður framd av Bústøðum sambært eini umsitingaravtalu, ið verður gjørd millum Bústaðir og felagið. Endamálið er at fáa fleiri leiguíbúðir á bústaðarmarknaðin.

Bústaðarpolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu leggur upp til at fleiri leigubústaðir verða bygdir. Seinastu árini eru lutfalsliga nógvar íbúðir bygdar í kommununi, flestar av teimum til eigaraíbúðir. Av tí at tað er tryggast og lættast at umseta eigaraíbúðir, so tykist tað serliga avbjóðandi hjá íleggjarum og byggiharrum at raðfesta leigubústaðir til fólkið.
Sostatt manglar kommununi fleiri leigubústaðir fyri at tryggja eina fjølbroytta fólkasamanseting.

Bústaðir fór undir verkætlanina við Dalavegin í 2023, og stóðu 44 lidnar íbúðir klárar at taka í nýtslu fyrst í 2025. Bústaðir hava eftirfylgjandi grundað á fíggarviðurskiftini í verkætlanini roynt at selja íbúðirnar sum lutaíbúðir. Áhugin fyri íbúðunum er stórur, men tað vóru ov fá, sum ynsktu at keypa ein lut. Heldur vóru tað fólk og feløg, sum høvdu áhugað í at keypa íbúðir við tí fyri eyga, at leiga út til stutttíðarleigu.

Tórshavnar kommuna og Bústaðir hava seinastu árini samstarvað um eitt nú Finsen verkætlanina, sum er bygt til lestrarbústaðir. Og nú er tíðin so komin til enn einaferð at fara undir eitt samstarv, sum hevur til endamáls at fáa fleiri leigubústaðir til kommununa.

Samstarvið er grundað í Løgtingslóg um Húsalánsgrunn § 5, sum sigur, at kommunan og Bústaðir hava heimild at stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum hevur til endamáls at útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um Húsalánsgrunnin (*Løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 29. mai 2024*).

**Upplýsingar frá umsitingini**
<u>Stjórnarskrivstovan</u>:
Sambært grein § 5 d í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (hereftir lógin) hava kommunan og Bústaðir heimild at stovan eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum hevur til endamáls at útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu.

Hendan heimild loyvir kommununi brúka kommunalar ognir og/ella kapital til leigubústaðir.

Sambært § 5 d, stk. 2 í lógini skal kommunan seta kapital í felagið svarandi til í minsta lagi 10% og í mesta lagi 20% av samlaða útveganarkostnaðinum. Hetta innskot kann latast sum peningur, lendi ella

byggibúning, og verður roknað sum eitt rentu- og avdráttarfrítt innskot, sum kommunan fær sína lutfalsligu ognarlut aftur av, um felagið einaferð verður avtikið.

Húsalánsgrunnurin skal minst seta sama upphædd inn, og við hesum verður eginpeningurin í felagnum ongantíð minni enn 20–40%, har restin verður fíggjað við lántøku við veð í ognum felagsins.

Fíggingin verður løgd til rættis við eini samanseting av kommunalum innskoti, innskoti frá Húsalánsgrunninum og eksternum láni.

Tá fíggingin er fingin til vega, verða viðtøkur felagsins gjørdar. Viðtøkurnar skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum sambært § 5 d, stk. 3, og skulu ítøkiliga áseta stýris-/nevndarskipan, roknskap, grannskoðan, reglur um útlutan av íbúðum og áseting av leigu.

Ein umsitingaravtala verður gjørd millum felagið og Bústaðir, har dagligi raksturin og umsitingin av leiguíbúðunum verður framd av Bústøðum sambært eini umsitingaravtalu.

Tá fíggingin er fingin til vega og viðtøkur felagsins endaliga góðkendar, verður felagið stovnað har kommunan og Húsalánsgrunnurin eiga sínar lutfalsligu kapitalpartar. Felagið fær egna nevnd, har kommunan og Húsalánsgrunnurin velja síni umboð, og verður felagið síðani rikið eftir viðtøkunum og almennum reglum fyri leigubústøðir.

Tá felagið er virkið, kann tað ogna sær íbúðir, ið skulu verða leigubústaðir í kommununi. Íløgan kann annaðhvørt vera nýbygging ella keyp av verandi bygningi. Bústaðir umsitur vegna felagið síðani leigu, viðlíkahald og rakstur. Í verkætlanum á Dalavegnum verður umsitingin løgd til rættis við eini serstakari umsitingaravtalu millum felagið og Bústaðir, sum tryggjar professionellan rakstur og tann serkunnleika, sum longu er í verandi skipan .

Verður felagið einaferð avtikið, skulu ognirnar sambært § 5 d, stk. 6 býtast millum kommununa og Húsalánsgrunnin í sama lutfalli, sum teirra innskot vóru.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
<u>Býarskipanardeildin</u>:
Seinastu árini hevur tað verið stórur fólkavøkstur í kommununi, og hevur hetta havt stórt trýst á bústaðarmarknaðin.

Tað sæst í størri mun, at spekulatión ávirkar bústaðarmarknaðin, og at vanligi borgarin harvið í minni mun hevur møguleikar at seta búgv í kommununi.

Tískil er tað av stórum týdningi fyri kommununa, at arbeitt verður við at skapa ein fjølbroyttan bústaðarmarknað, har bústaðarskylda verður lýst og har bústaðirnir ikki verða brúktir til stutttíðarleigu.

Tað er eyðsæð, at fyri at hava ein livandi og fjølbroyttan bý/kommunu, so er týdningarmikið at tryggja, at fólkið býr í býnum/kommununi og bústaðirnir ikki standa tómir stóran part av árinum.

Ætlanin at seta á stovn eitt almannagagnligt bústaðarfelag gevur í hesum samanhanginum góða meining, og verður mett neyðugt fyri at tryggja, at fleiri leigubústaðir verða bygdir í kommununi. Kommunan má luttaka í hesum partinum av bústaðarmarknaðinum, tí royndirnar siga og vísa, at privati íleggarin/byggiharrin hevur lættari við at avseta eigarabústaðir uttan bústaðarskyldu og krøvum um at avmarka stutttíðarleigu.

<u>Sosiala deild</u>:

Sosiala deild varar av 28 íbúðum, og tað er javnan at borgarar søkja um bústað hendanvegin. Talan er um borgarar, sum á ein ella annan hátt hava skerdar førleikar til at finna og/ella rinda fyri leiguíbúðir hjá eitt nú Bústøðum ella Mark, umframt at húsaleigan á privata marknaðinum eisini er ov høg.

Sosiala deild er áhugað í at hava 2-3 íbúðir til hendan málbólkin – afturat teimum 28, ið deildin varðar av frammanundan. Víst verður til reglugerðina, sum varð samtykt heystið 2025 í smb. við sosialu íbúðirnar. Tørvur er á íbúðunum, sum hava lægstu og/ella eina rímiliga leigu, sum ein einligur forsyrgjari kann rinda fyri – eisini um viðkomandi fær almannaveiting.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/10113-12: “*Framløga 25. nov 25, Dalabú*”
25/10113-12: “*Standard leigusáttmáli*”
25/10113-12: “*Tilboð uppá fígging av Dalabú - Føroya Banki*”
25/10113-12: “*Umsitingaravtala við Bústaðarfelagið við Dalabú*”
25/10113-14: “*Uppskot til viðtøkur fyri almannagagnligt bústaðarfelag*”

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | Almannagagnligt bústaðarfelag |

| Upphædd |
|---|
| 20 mio kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 20 mio kr |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at:

1. stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag saman við Bústøðum,
2. at góðkenna uppskotið til viðtøkur fyri felagið,

3. at góðkenna umsitingaravtaluna millum felagið og Bústaðir,
4. at kommunan tryggjar sær 3 leiguíbúðir í felagnum til sosiala økið,
5. at flyta kr. 20 mio sum innskot í felagið,
6. og at innskotið verður goldið av konto 6175 *Keyp og søla*.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.
Ein annar minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur ikki støðu fyrr enn á býráðsfundinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Annfinnur Brekkstein legði broytingaruppskot upp um at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti og fimm fyri.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Síðani bleiv atkvøtt fyri málinum við tí broyting um at hækka talið av nevndarlimum frá trimum til fimm í viðtøkunum fyri felagið.

Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og trimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer

## 279/25 Fríøki í Kirkjubø, matr. nr. 20C

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 25.03.2025 | 6/25 | 25/03906-2 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.06.2025 | 11/25 | 25/03906-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 22.09.2025 | 15/25 | 25/03906-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 139/25 | 25/03906-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 185/25 | 25/03906-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 227/25 | 25/03906-2 |
| 7 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 279/25 | 25/03906-2 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin ynskir at málið um fríøkið matr nr. 20c verður tikið upp til viðgerðar.
Evni at umrøða er, um Tórshavnar kommuna kann standa fyri at gera fríøkið liðugt, at halda fríøkið, og møguliga eisini at víðka ætlanina til eisini at umfata eitt ordiligt felagshús.

**Lýsing av málinum**
<u>Sparkivøllurin:</u>
Í 2006 tók staðbundna nevndin í Kirkjubø stig til at fáa graslíkisvøll í Kirkjubø. Avgjørt varð, at matr. nr 20c varð sett av til endamálið, og varð stig eisini tikið til at skipa fríøkið á sama stað. Byggisamtyktin varð broytt, soleiðis at økið varð lagt undir økisáseting, sum hóskar til virksemið. Á fundi í staðbundnu nevndini 26. okt 2011, og í Byggi- og býarskipanarnevndini 7. okt 2011 varð samtykt at fara undir at gera sparkivøllin og varð hann tikin í brúk í 2014.
Vøllurin vísti seg at vera sera vátur, í ringum standi og runutur, og varð í 2022 stig tikið til í samráð við staðbundnu nevndina at drena rundanum vøllin, og graslíki varð skift.

<u>Fríøkið í Kirkjubø:</u>
Mannagongdin fyri at gera fríøki og spæilipláss í Tórshavnar kommunu, lýst niðanfyri, varð eisini nýtt, tá ið áhugafelagið/grannabólkurin í Kirkjubø søkti um játtan til at gera frí- og spæliøki í Kirkjubø.
Tey gjørdu eina heildarætlan, og mettu, at alt fríøkið fór at kosta uml. 2 mió kr.
Játtan á 250.000,-kr. varð latin í 2016, 300.000,-kr. í 2018 og 200.000 í 2019 til at fríðka og menna fríøkið í Kirkjubø.
Í 2019 søktu tey eisini um, at Tórshavnar kommuna tekur sær av røktini av fríøkinum. Hendan umsóknin varð ikki gingin á møti, tí at ein av treytunum fyri játtanini er, at áhugafelagið tekur sær av at halda økið.

Staðbundna nevndin ger enn einaferð vart við, at arbeiðsmegin at taka sær av at gera og halda fríøki er avmarkað, og ynskir, at Tórshavnar kommuna tekur sær av tí.

Eisini vísir staðbundna nevndin, at ynski um bygging av felagshús í Kirkjubø eigur at verða sett á breddan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
<u>Fríøki og spæilipláss í kommununi:</u>
Mannagongdin fyri at gera fríøki og spæilipláss í Tórshavnar kommunu er tann, at eigarafeløg/grannaløg søkja um játtan til eina ætlan. Eigarafelag/grannalag skal tryggja, at ætlanin svarar til ynski í grannalagnum.
Ætlanin í umsóknini verður síðani viðgjørd og tillagað so hon svarar til játtanina, ið verður givin til ætlanina, og eigarafelag/grannalag tekur sær av at fáa ætlanina framda.

Játtan til endamálið verður givin við teirri treyt, at økið er til almenna nýtslu, at eigarafelag/grannalag tekur sær av at fáa ætlanina framda, og tekur sær av at halda trygdina og økið.
Eigarafeløg/grannaløg verða eggjað til at skipa fyri arbeiðsdøgum, so peningurin í høvuðsheitum fer til tilfar, og arbeiðsmegin kemur frá eigarafelag/grannalagi.
Hetta stimbrar undir trivnaðin í økinum, og tryggjar at tað ið verður bygt, svarar til ynskini í grannalagnum, og gevur eina betri ábyrgdarkenslu hjá borgarum at ansa eftir og at halda økið.

Umsitingin mælir til, at gerð av fríøki í Kirkjubø og hinum smærru bygdunum skulu gerast av eigarafeløgum/grannaløgum ella um tað skal skipast øðrvísi, soleiðis at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu tekur sær av at standa fyri, at fríøkini/trivnaðarøkini verða gjørd, og at Rakstrarstøðin tekur sær av viðlíkahaldinum/rakstrinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*J.nr 22/01866 Skifting av graslíki Norðasta Horn og í Kirkjubø.*
*J.nr 15/03437 Áheitan vegna Kirkjubøfólk um at matr. nr. 20c Kirkjubø átti at verið gagnnýtt betur.*
*J.nr 16/04360 Umsókn um stuðul til arbeiðið at fríðka og menna fríøkið í Kirkjubø.*
*J.nr 19/01576 Umsókn um stuðul til fríøkið í Kirkjubø fyri 2020.*
*J.nr 19/00505 Umsókn um stuðul fyri 2019 til fríøkið í Kirkjubø.*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Skriv frá staðbundnu nevndini er soljóðandi:

> *Eitt, ið eigur at verði tikið upp aftur, er fríðøki í Kirkjubø.*
>
> *Ein ætlan var fyri nøkrum árum síðan, men stígur kom í, einki hevur veri gjørt í nógv ár, og økið er liggur enn, minni enn hálvliðugt.*
>
> *Gongd kom á málið fyri 7 – 8 árum síðan, tá TK játtaði eina upphædd til øki. Tað var so lagt út bygdafólkið at fáa sum fragast burturúr. Hetta hevði TK góðar royndir við í onkrum grannalagi í Hoyvík.*
>
> *Ein bólkur í bygdini, tók stig til at projektera og keypa tilfar, nógv arbeiði bleiv eisini gjørt av summum.*
>
> *Men uppgávan var í so stór, til tær kreftirnar ið vóru tøkar, og innsatsurin fánaði. Úrslitið er, at ikki bar á mál at fáa verkætlanina lidna og tað gagn av økinum man hevði ímyndað sær. Sparkivøllurin, sum treingir til ábøtur, verður tó brúktur av børnunum.*
>
> *Kirkjubøur kann ikki samberast 1 til 1 við eitt grannalag í Hoyvík. Tí má annar háttur finnast at gera økið liðugt, har TK tekur meira aktivan lut við arbeiðsmegi.*
>
> *Helst skal øll verkætlanini endurskoðast, og evt. gerast nógv størri við einum ordiligum felagshúsi.*

*Viðfest eru myndir av økinum sum tað sær út nú, og ein einkult frá 2018, sí jnr 25/03906-3 myndir frá staðbundnu nevndini – fríøki.*

**Skjøl**
*Sí jnr 25/03906-3 myndir frá staðbundnu nevndini – fríøki.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Staðbundna nevndin ynskir málið á skrá at umrøða:

- um fríøki í Kirkjubø skal gerast av áhugafelag/grannalagi í Kirkjubø, ella um tað skal skipast øðrvísi, soleiðis at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu tekur sær av at standa fyri at gera fríøkið/trivnaðarøkið, og um Rakstrarstøðin skal taka sær av rakstrinum.
- ynski um felagshús í Kirkjubø skal gangast á møti.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 25. mars 2025:** Útsett.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. juni 2025:** Málið varð umrøtt. Umsitingin ger uppskot til samstarvsavtalu. Sveinur Zachariassen er lokalt umboð í Kirkjubø. Avtalan verður løgd fyri á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til samstarvsavtalu ísv liðugtgerð og hald av fríøkinum.
Hetta uppskotið leggur upp til,

- at staðbundin toghaldari kannar tørv og ynski í sambandi við liðugtgerðina av fríøkinum, so raðfestingin hóskar til staðbundin ynski
- at skipað verður fyri árligum arbeiðsdegi, har staðbundin fólk saman við Lendisdeildini hjá Tórshavnar kommunu fríðka um og uppraðfesta økið.

Sí jnr *25/03906-8 uppskot til samstarvsavtalu*

Um ein dagur er nóg mikið er treytað staðbundna luttøku.
Staðbundin toghaldari fær ábyrgdina av at halda eyga við økinum og fráboðar tørv á røkt hareftir.

Um hetta verður leisturin fyri røkt av fríøkinum í Kirkjubø, eigur at verða umrøtt, um hetta skal vera leisturin fyri fríøkini í øllum bygdunum.

Mett tíð hjá Lendisliðnum til hesa loysnina, tó treytað staðbundna luttøku, er 3 fólk 8 tímar, 3-4 ferðir árliga. Tvs uml 72-96 manntímar pr bygd ella uml 570-770 manntímar fyri allar bygdirnar.
Uttanhýsis veitari má røkja bóltvallirnar.
Um økið skal bjóðast út til uttanhýsis veitara at halda, er mettur kostnaður góðar 100.000,- kr árliga fyri Kirkjubø, og uml. 550.000,- kr árliga fyri allar bygdirnar.
Sí skjal *J 25/03906-7 Fríøki kostnaðarmeting í bygdunum.*

Heitt verður á nevndina um at umrøða hendan leistin fyri røkt av fríøkinum í Kirkjubø, við atliti at avleiðing fyri somu loysn í hinum bygdunum. Og um so er, at tikið verður undir við tí, at leggja málið fyri til politiska støðutakan í Býráðnum umvegis Byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevnd, so fígging verður fingin til endamálið í 2026.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 912<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Heitt verður á nevndina um at umrøða hendan leistin fyri røkt av fríøkinum í Kirkjubø, við atliti at avleiðing fyri somu loysn í hinum bygdunum. Og um so er, at tikið verður undir við tí, at leggja málið fyri til politiska støðutakan í Býráðnum umvegis Byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevnd, so fígging verður fingin til endamálið í 2026.

**Skjøl:**
*Jnr 25/03906-7 Fríøki kostnaðarmeting í bygdunum*
*Jnr 25/03906-8 uppskot til samstarvsavtalu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitektur mæla til:

- at staðbundna nevndin umrøður samstarvsavtaluna hvørt tey hava viðmerkingar til avtaluna.
- at málið verður lagt fyri til politiska støðutakan hvørt kommunan skal átaka sær viðlíkahald og rakstur av fríøkjum og bóltvallum í bygdunum, og at raksturin á kt. 6212 verður hækkaður samsvarandi í fíggjarætlanini.
  at málið verður beint í Býráðið umvegis Byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 22. september 2025:** Staðbundna nevndin viðmælir framløgdu samstarvsavtaluna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at byrja við Kirkjubø, har einki felagsøki/-hús er.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við samstarvsavtaluni um røkt av fríøkinum í Kirkjubø grundað á, at talan er um almennt friøki og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og fýra atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

# 280/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.09.2025 | 124/25 | 25/08573-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 212/25 | 25/08573-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 280/25 | 25/08573-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ætlanina um at menna Tórshavn sum lestrarbý er stórur tørvur á at fáa til vega lestrarbústaðir í býnum – serliga í økinum nær sjálvum kampusøkinum.

Eitt av átøkunum í hesum sambandi er at umbyggja Eirargarð 2 til lestrarbústaðir.

Teir 3 ovaru blokkarnir, Eirargarður 4, 6 og 8, liggja sum A2 øki til høga bústaðabygging, meðan tann niðasti, Eirargarður 2, liggur sum D3 øki til almenna bygging, í sambandi við at hann hevur verið nýttur til ymiska almenna fyrisiting, umframt til sjúkraflutningstænastuna. Uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at Eirargarður 2 verður lagdur afturat A2 økinum, liggur til viðgerðar, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum*.

Í § 6, stk. 2 í almennu byggisamtyktini er ásett, at útstykking í A2 økjum einans er loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

So statt verður mælt til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd, ið skipar økið við teimum 4 høgu bygningum til íbúðarbygging, vegaføring, parkering, fríøki v.m. Harafturat skal vera rúm fyri, at vinnuligt virksemi í umhvørvisflokki 1-2 kann vera í økinum, treytað av at hetta ikki spillir dámin á økinum sum bústaðarøki. Serstaka byggisamtyktin skal somuleiðis tryggja, at verandi lógligt virksemi kann halda áfram í bygningunum. Økið, ið uppskotið til serstøku byggisamtyktina í fyrsta umfari er galdandi fyri, er A2 øki, ið sæst á skjali *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting.*

**Lýsing av málinum**
Á viðhefta áhugakorti sæst, hvørji býarskipanarlig áhugamál eru í økinum, sum atlit skulu takast til, tá økið verður skipað, sí skjal *Áhugakort - Eirargarður*. Her sæst m.a., at økið er partur av einum varðveitingarverdum grønum øki og býarumhvørvi. Harafturat er ein miðingarlinja, frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran á Argjum, sum atlit skal takast til.

<u>Býarumhvørvi</u>
Eirargarður 2 er partur av 4 bústaðarblokkum, sum vórðu bygdir í 60'unum og m.a. vórðu nýttir til bústaðir til sjúkrasystralesandi. Mitt í 90'unum ella í seinnu helvt av 90'unum fluttu sjúkrasystrarnar út og Heilsumálaráðið inn í Eirargarð 2, og bygningurin hevur líðandi verið tillagaður tí virksemi, sum hevur verið í bygninginum.

Hesir 4 bygningarnir, sum eru millum hægstu bygningar í landinum, vórðu bygdir sum ein eind og býarskipanarliga framstanda teir eisini sum ein eind, tá hugsað verður um natúrliga avmarkaða økið, snið, dám og nýtslu. Teir eru somuleiðis partur av tí størru eindini av bygningum á Eirargarði, og hava teir sama dám, tilfar og snið sum hesir, tó so at hæddin á hinum bygningunum er lægri.

<u>Grønt øki</u>
Økið millum bygningarnar og vegirnar a Eirargarði er lutfalsliga órørt, og lyngur eru í stórum parti av økinum, og hesin grøni, "órørdi" dámurin eigur at verða varðveittur í størst møguligan mun.

Miðingarlinja
Tað er ikki ætlanin at fremja útvendigar broytingar í bygningunum, og tískil ávirkar hetta ikki miðingarlinjuna frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran.

Annað
Tað er ikki ætlanin, at bygningarnir skulu vaksa í vavi. Tað merkir, at hædd og vídd í fyrsta umfari verður órørd, tó so at rúm skal vera fyri minni útbygging eftir tørvi. Allir bygningarnir eru í 6 hæddum, og hvør hæddin er millum 350-450 $m^2$ til víddar – samlaða gólvvíddin er uml. 9600 $m^2$.

Parkering verður skipað sum partur av eini heildarloysn fyri alt sjúkrahúsøkið. Parkeringin verður so statt skipað í eini heildarloysn fyri økið, og nevnast kann, at Landsverk hevur víst á, at 11 parkeringspláss verða løgd til sjúkraflutningstænastuna. Somuleiðis vísir Landsverk á, at arbeitt verður við eini nýggjari heildarætlan fyri parkering og ferðslu á Eirargarði, og fara Landsverk í 2026 at taka upp samskifti við Tórshavnar kommunu um nýskipan av teimum viðurskiftunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Uppskot um at broyta ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini verður viðgjørt, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum*. Niðanfyri standa ásetingarnar fyri A2 øki, og tað, sum er skrivað við reyðum, er tað sum sambært uppskotinum verður lagt afturat ásetingunum fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini.

§ 6. Ásetingar fyri umráðispart A2 í 3. grundumráði

1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt øki.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25,
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
6. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er, at hendan serstaka byggisamtyktin seinni skal vaksa til at fevna um alt sjúkrahúsøkið í Eirargarði og niðanfyri J. C. Svabosgøtu. Landsverk skrivar soleiðis í umsókn síni:

> "*Sbrt. Heildarætlanini fyri Eirargarð frá 2012 var ætlanin at fáa gjørt eina serstaka byggisamtykt fyri økið í síni heild. Landsjúkrahúsið, Heilsumálaráðið og Landsverk eru byrjaði uppá innleiðandi greiningar í hesum sambandi og koma innan nakrar mánaðir at taka upp samskifti við Tórshavnar kommunu hesum viðvíkjandi.*
>
> *Tørvur er á, at gera nærri greiningar og framskrivingar av tørvinum hjá Landssjúkrahúsinum komandi mongu árini áðrenn søkt verður um at gera eina serstaka byggisamtykt fyri hesar matriklarnar: 1000a, 1000b, 1000e, 969i, 969a, 976 og neyst."* Sí alla umsóknina í skjali *Umsókn til TK ísv. Byggisamtyktar broyting Eirargarður* og heildarætlanina frá 2012 í skjali *Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum,* journal nr. 25/08524

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*Áhugakort – Eirargarður,* journal nr. 25/08573-2
*Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn,* journal nr. 25/08524-3
*Umsókn til TK ísv. Byggisamtyktar broyting Eirargarður,* journal nr. 25/08573-4
*Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 25/08524-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd sambært leistinum lýstur omanfyri, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, Kári Johansen, setir sum treyt, at nýggjur atkomuvegur til sjúkraflutningstænastuna verður við í verkætlanini.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykt 18. September 2025, at serstøk byggisamtykt verður gjørd sambært leistinum lýstur omanfyri. Vanliga hevur umsitingin praktiserað líknandi støður soleiðis, at tá ítøkiliga serstaka byggisamtyktin ikki hevur verið liðugt orðað áðrenn nevndarviðgerðin byrjar, at viðurskiftini hava verið lýst í málslýsingini, og síðani hava byggi- og býarskipanarnevndin og býráðið samtykt at serstøk byggisamtykt verður gjørd sambært leistinum lýstur omanfyri. Og eftir nevndar- og býráðsviðgerðina hevur umsitingin eftirfylgjandi gjørt ítøkiligt uppskot til serstaka byggisamtykt og lagt hana til hoyringar.

Umhvørvismálaráðið hevur í heyst víst á, at hendan mannagongdin ikki er nøktandi, tí ítøkiliga serstaka byggisamtyktin skal vera samtykt av býráðnum, áðrenn ráðið kann góðkenna hana. Tvs. At tað er ikki nokk, at *«byggisamtyktin verður gjørd eftirfylgjandi sambært omanfyri standandi leisti»*, men skal býráðið hava sæð og samtykt ítøkiligu serstøku byggisamtyktina.

Uppskot til serstaka byggisamtykt er gjørt, og tískil verður hendan løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina og býráðið til samtyktar. Víst verður til skjal nr. 25/08573-12, Serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð.

**Skjøl:**

- *Serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð,* journal nr. 25/08573-12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býrararkitekturin mæla til, at uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Eirargarð verður samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. desember 2025 í telduposti:** Einmælt samtykt og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 281/25 Umsókn um broyting av byggisamtyktini á matrikul 250a á Argjaboða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 180/25 | 25/04828-9 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 281/25 | 25/04828-9 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 250a, á Argjaboða, Argir, hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri økið frá 4. grundumráði til A1 øki, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*. Ynski hansara er at stykkja út til uml. 5 eindir, sí skjal *Skipanaruppskot.*

**Lýsing av málinum**
Tilfarið, ið er latið inn í smb. við umsóknina er ikki á einum slíkum støði, at til ber at granska, um hon tekniskt ber til, men um hugt verður eftir hæddarmuninum ber til at siga, at tað er sera ósanlíkt, at tað ber til at fáa vegatkomu til økið frá Argjaboðagøtu. Somuleiðis kann nevnast, at á tekningini, ið er løgd við, sýnast einstøku grundstykkini ikki nóg stór í mun til krøvini í almennu byggisamtyktini, umframt at skrivað verður, at tvey av grundstykkjunum eru til bygging í 3 hæddum, og hetta ber smb. ásetingunum fyri A1 øki ikki til. So statt hevði umsøkjari væntandi fingið minni burtur úr økinum enn væntað.

Havandi í huga omanfyri nevndu viðurskifti, umframt at ein tílík broyting, sum umsøkjari ynskir, ikki verður mett at hóska inn í eina yvirskipaða heildarplanlegging hjá kommununi, verður mælt frá at ganga umsóknini á møti.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir til eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
- Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Seinastu tíðina hevur Umhvørvismálaráðið víst á, at broytingar av byggisamtyktum fyrst og fremst eiga at verða grundaðar á yvirskipaðu heildarplanlegging kommununnar, og ikki grundaðar á umsóknir frá einstøkum borgarum. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu er yvirskipað samd í, at broytingar av byggisamtyktum eiga at verða grundaðar á yvirskipaða heildarplanlegging, tó so at mett verður, at incitamangið til broytingar kann koma frá einstøkum borgarum, um so er, at broytingin er við til at føra út í verk ætlanir og politikkir kommununnar.

Henda umsóknin verður ikki mett at hóska inn í eina yvirskipaða heildarplanlegging hjá kommununi, og tískil verður mælt frá at ganga umsóknini á møti.

Somuleiðis kann upplýsast, at aðrar íbúðarbyggingar í økinum hava havt við sær stóra mótstøðu frá íbúgvunum í grannalagnum, hetta grundað á, at Argjaboðagøta ikki verður mett at kunna taka eitt hægri ferðslutrýst.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarverkfrøðingurin hevur viðmerkt, at vegatkoman er sera ósannlík. av tí at promillan gerst ov høg.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting*, journal nr. 25/04828-10
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, journal nr. 25/04828-10
- *Skipanaruppskot*, journal nr. 25/04828-10

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkiteturin mæla frá at ganga umsóknini á møti, grundað á:
- at ein tílík broyting ikki er grundað á yvirskipaða heildarplanlegging.
- at vegatkoma til ætlaða byggiøkið er ósannlík, av tí at promillan gerst ov høg.
- at ætlaðu grundstykkini eru ov smá

og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Bergur Robert Dam Jensen.

# 282/25 Broyting av ásetingum fyri minst loyvdu grundstykkjavídd í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 164/25 | 25/09983-1 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 282/25 | 25/09983-1 |

**Upprunin til málið**
Eingin minst loyvda grundstykkjavídd er ásett fyri grundøki í 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í økjum, har ongar ásetingar eru um minstu grundstykkjavídd, er matrikkullógin, § 17, stk. 4 galdandi, og hendan ásetir, at har góðkend byggisamtykt ikki hevur ásett minstustødd fyri byggigrundir ella urtagarðar, mugu hesi ikki leggjast við minni vídd enn 500 $m^2$.

**Lýsing av málinum**
Ein óheppin ótilætlað avleiðing av, at eingin minsta grundstykkjavídd er ásett í 1. og 2. grundumráði er, at til ber ikki at fremja ummatrikuleirngar av verandi grundøkjum, uttan so at nýggju matriklarnir gerast min. 500 $m^2$. Hetta er ikki í samsvari við dámin á 1. og 2. grundumráði, sum eru tey økini í býnum, ið hava minstu grundstykkini og eru tættast bygd – dømi um tílík øki eru undir Ryggi og Tróndargøta. Grundstykki, sum eru 500 $m^2$ ella størri, eru beinleiðis í stríð við ynskta dámin í økinum, serstakliga sethúsaøkjum í miðbýnum, og avleiðingin av manglandi ásetingini er sum heild avmarkandi fyri menningina av miðbýnum.

Umsitingin metir ikki, at nøkur minsta grundstykkjavídd eigur at vera í 1. og 2. grundumráði, men av tí at matrikkullógin sigur, at har eingin minsta grundstykkjavídd er, skulu grundstykkjavíddirnar vera min. 500 $m^2$, er neyðugt at áseta eina vídd. Mælt verður til, at hendan verður 50 $m^2$, sum er ein lág, men rímilig vídd, tá hugsað verður um smáu grundstykkjavíddirnar í miðbýnum. Soleiðis verður ynskti dámurin í økinum varðveittur, og ein ynsktur smidleiki í menningini av økinum verður tryggjaður. Hóast minsta grundstykkjavídd verður sett lágt, verður mett, at veruligar minstu grundstykkjavíddir avmarka seg sjálvar, av tí at víddin framvegis skal vera hent í mun til nýtsluna av grundøkinum, og ásetingar sum t.d. mest loyvda byggistig og frástøða til mark framvegis skulu haldast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,6.
- Hús skulu vanliga vera samanbygd við framsíðu í veglinjuna ella í byggilinjuna, har ein tílík er løgd.

Ásetingar fyri 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 2. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging.
- Hús skulu vanliga standa fyri seg og verða sett í veglinju, har ein tílík er løgd. Tó kann verða loyvt at samanbyggja hús, tá ið umstøðurnar eftir meting býráðsins gera tað ráðiligt.

Løgtingslóg nr. 64 um matrikulering og sundurbýti ásetir m.a.:
- § 17. Við sundurbýti má lutur ikki verða lagdur í sovorðnum skapi, at hann er óhentur til endamálið. Harundir má partur í felagseigindómi uttangarðs altíð hoyra til ávísan fastan eigindóm í somu markatalsbygd.
- § 17, stk. 4. Í økjum, har góðkend byggisamtykt ikki hevur ásett minstustødd fyri byggigrundir ella urtagaðrar, mugu hesi ikki leggjast við minni vídd enn 500 $m^2$. Sethúsabyggigrundir kunnu ikki leggjast við størri vídd enn 3000 $m^2$.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Ásetingar fyri 1. og 2. grundumráði*, journal nr. 25/09983-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av ásetingum fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, soleiðis at minsta grundstykkjavídd verður 50 $m^2$, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og trimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Tveir býráðslimir greiddu ikki atkvøðu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

# 283/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri kampusøkið, matr. nr. 1017d

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 163/25 | 25/05861-4 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 283/25 | 25/05861-4 |

**Upprunin til málið**
Í 2018 varð Strategisk Kampusætlan gjørd fyri Fróðskaparsetur Føroya, sí journal nr. 25/05861-9, “*2018.12. Færøernes Universitets Strategiske Campusplan”*. Ætlanin leggur upp til at savna allar deildir og alt virksemi hjá Fróðskaparsetrinum í økinum Nóatún, Debesartrøð, og á Frælsinum við parkering undir jørð á Frælsinum, soleiðis at lítil og ongin sjónlig parkering verður í økinum, og fólkaferðsla, uppihald, rørsla og trivnaður tí kann verða raðfest høgt. Ætlanin tók støði í, at Venjingarskúlin á Frælsinum 20 varð burturbeindur, og at lestrarbústaðir vórðu bygdir í økinum. Hetta er seinni broytt, soleiðis at Venjingarskúlin verður høvuðsumvældur og transformeraður til eitt modernað universitet.

Ætlaðu lestrarbústaðirnir, ið skuldu byggjast á Frælsinum 20, verða eftir ætlan bygdir uttan fyri Kampusøkið, ásannandi at økið helst ikki ber meir enn útbygging av sjálvum Fróðskaparsetrinum og teim verandi bygningunum.

Økið liggur í D3 øki í almennu byggisamtyktini, og skal øll bygging og útstykking í økinum gerast sambært serstakari byggisamtykt. Umframt økið, sum Kampus-ætlanin fevnir um, verður restin av sama D3 øki partur av serstøku byggisamtyktini, sí kort *Økið.* Soleiðis fevnir serstaka byggisamtyktin somuleiðis um t.d. Skúlan á Trøðni, Fólkaháskúlan og Ellisheimið.

**Lýsing av málinum**
Landsverk hevur sent kommununi tilfar, sum lýsir ætlanirnar hjá landinum í samb. við bygging av Fróðskaparsetrinum á Frælsinum, sí journal nr. 25/05861-3,*”Fylgiskjal 1 – Tilfar í samb. við Serstaka byggisamtykt”,* sí somuleiðis *PROJEKTUPPSKOT A3 (2)_reduceret, journal nr. 25/05861-9.*

Á viðhefta áhugakorti sæst, hvørji býarskipanarlig áhugamál eru í økinum, sum atlit skulu takast til, tá økið verður skipað, sí journal nr. 25/05861-5, *“Áhugakort – Kampus”*. Her sæst m.a., at økið er partur av einum varðveitingarverdum grønum øki og býarumhvørvi, og at varðveitingarverdir bygningar eru í økinum. Harafturat er ein miðingarlinja, frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran á Argjum, sum atlit skal takast til.

<u>Býarumhvørvi</u>
Økið er í Tórshavnar býaratlassið skrásett sum eitt varðveitingarvert býarumhvørvi.

Í atlassinum stendur um økið:
*Hóast teir [bygningarnir] eru ymiskir í skapi og settir á ymiskan hátt, summir uppi á høvdini og aðrir meira afturundir, og hóast so ymiskligir bygningar eru sum tey svørtu timburhúsini á Háskúlanum, gamla Lansbókasavnið úr føroyskum gróti og teir stoyptu bygningarnir hjá Sjómansskúlanum og nýggja Landsbókasavninum, so kennist økið kortini sum ein partur av einari heild við serliga opnum og grønum lendi í tí tættari bygda býnum uttanum. Ein komandi útbygging her, eigur at virða hesi grønu eyðkenni.*

Í serstøku byggisamtyktini verða byggifelt teknað á kortið, soleiðis at tað verður greitt, hvørji øki skulu varðveitast órørd, og grøni dámurin í økinum verður varðveittur.

<u>Bygningar</u>
Í økinum eru seks bygningar, sum eru skrásettir í Tórshavnar býaratlassi. Talan er um bygningarnar:
- J. C. Svabosgøta 14, gamla gróthúsið, sum upprunaliga var Landsbókasavn. Varðveitingarvirði 2.
- V.U. Hammershaimbs gøta 22, sum í dag húsar Føroyamálsdeildini. Varðveitingarvirði 5.

- V.U. Hammershaimbs gøta 9 og 11, sum í dag húsar Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Varðveitingarvirði 4.
- V.U. Hammershaimbs gøta 7, Ellisheimið. Varðveitingarvirði 4.
- Háskúlavegur 14, Háskúlin. Varðveitingarvirði 3.
- Háskúlavegur 18, Háskúlin. Varðveitingarvirði 4.

Í serstøku byggisamtyktini verður ásett, at bygningar, ið eru skrásettir við varðveitngarvirði 1-6 í Tórshavnar býaratlassi, skulu ikki broytast ella takast niður uttan serloyvi frá byggivaldinum.

Grønt øki – skógfriðað
Eystari partur av matr. nr. 1017d er skógfriðaður, og tískil skal bygging í økinum og 300 m frá hølinum fáa loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

Miðingarlinja
Tað er ikki ætlanin, at bygningurin, sum liggur á miðingarlinjuni, skal hækkast, og tískil ávirkar hetta ikki miðingarlinjuna frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran.

Parkering
RÁÐ gjørdi í 2023 eina lýsing av parkeringsviðurskiftunum við Kampusøkið, sí journal nr. 25/05861-3, *“Fylgiskjal 3 – Parkering ved Kampus 12.10.2023”*. Sambært rapportini eru uml. 311 parkeringspláss í Kampusøkinum, tá eru fyribils parkeringsøkini á vøllinum á Frælsinum tald við. Tørvurin á parkeringplássum økist, so hvørt meir bygging verður í økinum, og sambært rapportini verður tørvurin í 2033 800 pláss, um normurin í BK17 verður fylgdur.
Fleiri av verandi parkeringplássunum verða somuleiðis tikin burtur, av tí at byggjast skal á økinum, og soleiðis økist munurin millum tøk parkeringspláss og kravd parkeringspláss.

Ein partur av Kampusætlanini er ein parkeringskjallari, ið fer at rúma 3-400 parkeringsplássum. Ein leys meting av parkeringsplássunum við kampusøkið, tá økið er fult bygt, er, at tað verða 500 parkeringspláss í økinum. Hesi eru í parkeringskjallaranum, á Frælsinum og Handan Á. Í mun til krøvini í BK17 mangla so statt uml 300 parkeringspláss.

Rapportin vísir á, at normurin í BK17 er nógv tann hægsti, tá samanborið verður við líknandi øki í Norðurlondum. T.d. um samanborið verður við normin í Lund, sæst, at kravið er 140 parkeringspláss og 487,5 í Horsens, sum er tað økið, ið hevur næst hægst norm. Rapportin mælir so statt til, at normurin verður endurskoðaður, og at man so hvørt økið verður bygt, metir um hvør veruligu tørvurin er. Somuleiðis liggur økið sentralt, og góðir samferðslumøguleikar eru í økinum, og eigur hetta at minka um tørvin á parkeringsplássum.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu mælir til, at ásett verður í serstøku byggisamtyktini, at parkeringspláss verða skipað sum partur av eini heildarloysn fyri økið. Heildarloysnin verður dagførd fyri hvørt byggimál sær, av tí at tað er ikki fyrr enn í sjálvum byggimálinum, at tað gerst greitt, hvør ítøkiligi tørvurin er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin hevði nakrar formligar viðmerkingar til uppskotið til serstøku byggisamtyktina, sí skjal *Viðmerkingar frá byggimálsdeildini*. Hesar verða rættaðar í skjalinum, sum verður lagt fyr býráðnum 11. Desember 2025.

Økið er skógarfriðað og verður sent friðingarmyndugleikanum til góðkenningar.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Áhugakort – Kampus,* journal nr. 25/05861-5
- *Fylgiskjal 1 – Tilfar í samband við Serstaka byggisamtykt,* journal nr. 25/05861-3
- *Fylgiskjal 3 – Parkering ved Kampus_12.10.2023,* journal nr. 25/05861-3
- *Áhugakort – Kampus,* journal nr. 25/05861-5
- *PROJEKTUPPSKOT A3 (2)_reduceret,* journal nr. 25/05861-9
- *2018.12. Færøernes Universitets Strategiske Campusplan,* journal nr. 25/05861-9
- *Serstøk byggisamtykt fyri Kampus*, journal nr. 25/05861-11
- *Yvirlit yvir bygningar,* journal nr. 25/05861-10
- *Viðmerkingar frá byggimálsdeildini*, journal nr. 25/05861-12

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Av tí at tað gerast fleiri brúkarar av økinum, kann væntast, at tað verða avleiddar verkætlanir í sambandi við meir bygging í økinum. Tað kann t.d. vísa seg at verða tørvur á at gera broytingar í undirstøðukervinum í økinum, og kann hetta fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Á tí støðinum, sum skipanin av økinum er í verandi løtu, ber ikki til at áseta ítøkiliga upphædd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Kampus, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið bleiv samtykt við tíggju atkvøðum fyri, eini atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Kári Johansen og Rúni Reginsson Hammer.

## 284/25 Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 179/25 | 25/00828-2 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 284/25 | 25/00828-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur um sundurbýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv, varð í desembur 2024 frámælt av umsitingini, m.a. tí at matrikulin lá í 4. grundumráði, sí skjal *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024.* Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti í tí sambandi m.a. at broyta byggisamtyktina fyri útstykkingina, sum matr. nr. 1341d er partur av.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1341d er partur av útstykking, ið varð gjørd í seinnu helvt av 80'unum. Tá útstykkingarætlanin varð skipað, lá økið sum sethúsaøki í byggisamtyktini. Í sambandi við ætlanir um innkomuveg oman fyri økið, varð ovari partur av økinum í 90'unum broytt til 4. grundumráði. Ætlaninar við innkomuvegnum eru sum kunnugt broyttar, og neyðugt er tískil ikki at halda fast í vegalinjuni, ið varð løgd í 90'unum.

Av tí at talan er um útstykkingarætlan, ið varð góðkend av býráðnum í øki, sum lá í sethúsaøki, umframt at linjuføringin av innkomuvegnum varð broytt, verður mett ráðiligt at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at øll útstykkingin liggur í A1 sethúsaøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan eigur tveir av matriklunum í útstykkingini, matr. nr. 1341c og 1341e. Í samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevdnini frá 11. desember 2024, mál 24/08980, varð, umframt at broyta byggisamtyktina fyri økið, eisini samtykt, at kommunan skuldi fara undir at kanna, um til bar at fremja makaskifti, soleiðis at kommunan kundi fáa matr. nr. 1341h og 1341m í býti við stykkini, sum kommunan eigur. Hetta verður mett vera skynsamt í mun til eina framtíðar víðkan av vegnum undir Krákugjógv. Mælt verður til, at stjórnarskrivstovan stendur fyri samráðingum hesum viðíkjandi, og at hetta verður lýst í nýggjum máli um makaskifti.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 926<br>Forkvinnunnar merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn*, journal nr. 24/08980.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1982,* journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1996*, journal nr. 25/00828-4.
- *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024,* journal nr. 24/08980.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1341f, 1341d, 1341e, 1341c, 1341b og 1341g frá 4. grundumráði til A1 øki.
- at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** atkvøtt varð um tilmælið, ið bleiv samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson

## 285/25 Umsókn um broytan av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 750c, Hoydalsvegur 8, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 160/25 | 25/07413-8 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 285/25 | 25/07413-8 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 750c, Hoydalsvegur 8, hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin, soleiðis at hann kann byggja hægri, enn hann kann í dag. Ognin er fevnd av ásetingunum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjari nevnir ikki, hvat ynskið ítøkiliga er at broyta byggisamtyktina til, men einans at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at ynskta byggingin verður loyvd.

Einki øki er í almennu byggisamtykini, sum rúmar vavinum av byggingini í verandi og ynsktum líki. Einastu økini í almennu byggisamtyktini, ið loyva at tílík bygging verður loyvd smb. serstakari byggisamtykt, eru 1. og 2. grundumráði og A1 øki. Tískil hevði einasta møguliga loysn verið at broytt almennu byggisamtyktina fyri økið til 1. grundumráði, 2. grundumráði ella A3 øki, umframt at gjørt eina serstaka byggisamtykt fyri økið. Til hetta verður økið mett at vera alt ov lítið, til at gera eina heildarplan fyri, umframt at tað ikki er í samsvari við eina yvirskipaða ætlan fyri býin.

Umsitingin metir, at tann loysnin, ið býarskipanarliga er mest hóskilig, er at broyta økið til 2. grundumráði. Ein størri geiri av 2. grundumráði kundi verði víðkaður niðan móti SMS, hetta fyri at knýta SMS til miðbýin. Um so var, átti ein heildarmeting – ella heildarætlan at verði gjørd fyri økið frá Steinatúni, niðan eftir Niels Finsens gøtu og Hoydalsvegnum, til Oman Pisuvarða og niðan til SMS. Hetta er í samsvari við yvirskipaðar ætlanir um at tætta býin og møguliga at vaksa um 2. grundumráði í býnum sum heild.

Hetta er ein longri tilgongd, ið er sera orkukrevjandi, og politisk støða má takast til, nær hetta eigur at verða raðfest.

Vísast skal somuleiðis á, at byggingin á matr. nr. 750a fer frammanundan út um tað, ið loyvt er smb. ásetingunum fyri økið. Um so var, at økið varð broytt til 2. grundumráði, hevði eigarin smb. ásetinginunum fyri 2. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fingið loyvi at byggja meir, men í praksis fær hann ikki loyvi at byggja meir á síni ogn, av tí at byggingin frammanundan er bygd ov nógv.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 2. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,7. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m$^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 2 vísir.




Mynd 2

- Hús við vanligari mønureising skulu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5. [t.e. byggistig, nýtslustig og hæddir].

Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.




Mynd 3

- Hús við vanligar mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Byggingin á ognini fer frammanundan út um ásetingarnar um bygging í A1 øki og í 2. grundumráði:

| | Ásetingar A1 | Ásetingar 2. Gr. | Verandi bygging | Umsókn |
|---|---|---|---|---|
| Byggistig | 0,3 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| Nýtslustig | 0,75 | 0,88 | 1,23 | 1,42 |
| Hædd | 6 m | 8 m | >9 | 9,9 |

Eigarin av matr. nr. 750c hevur tríggjar ferðir søkt um frávik frá byggisamtyktini til at sleppa at byggja meir, enn byggisamtyktin loyvir, men hevur fingið noktandi svar. Orsøkin til noktandi svarini er, at bygningurin frammanundan fer út um ásetingarnar um byggi- og nýtslustig og hæddir.

Umsøkjari vísir í umsóknini um byggiloyvi á, at grannaognir hava fingið frávik frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Frávikið, sum umsøkjari vísir á, varð givið hóast umsitingin mælti frá at geva frávikið, og verður tað tí ikki mett at kunna nýtast sum fordømi. Umsitingin viðmerkir í tí sambandi:
*"Umsitingin metir framvegis, at kommunan hevur givið frávik [til byggiloyvi á grannaognini] sum ikki rúmast innan fyri ásetingarnar í almennu byggisamtyktini um frávik, og at tí áttu tey ikki at verða givin. Vanliga*

*gevur kommunan ikki so stór frávik, og tí verður mælt frá at brúka hetta mál sum fordømi til onnur mál, tað er sum grundreglu fyri at viðgera líka mál eins."* Sí mál *Umsókn um byggiloyvi til umbygging á matr. nr. 750c, Hoydalsvegur 8, Tórshavn* og *fyrispurningur um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 751c, Tinghúsvegur 47.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
fyrispurningur um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 751c, Tinghúsvegur 47, journal nr. 22/03262
Umsókn um byggiloyvi til umbygging á matr. nr. 750c, Hoydalsvegur 8, Tórshavn, journal nr. 25/01707

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Stokholm_umsokn_TK.pdf,* journal nr. 25/07413-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti, men vísa á, at byggisamtyktini møguliga kann verða broytt í framtíðini, um so er at arbeiðið at víðka um 2. grundumráði vísir seg at fevna um matr. nr. 750c. Arbeiðið við uppskotinum at víðka um 2. grundumráði niðan til SMS er ikki raðfest í løtuni, tá tað liggja aðrar neyðugar broytingar/tillagingar fyri framman áðrenn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, samtykti at taka undir við tilmælinum, tó so, at tá umsøkjarin verður kunnaður um avgerðina, fær hann vegleiðing um møguleikan at søkja um frávík í sambandi við umsókn um byggiloyvi.

Ein minnluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, taka ikki undir við tilmælinum, men mæla til at geva frávik frá byggisamtyktini.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Samtykt varð at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen.

# 286/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 17.03.2025 | 4/25 | 25/01096-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 186/25 | 25/01096-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 286/25 | 25/01096-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Kaldbak viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kaldbak, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethúsabygging
B: Almenn endamál
C: Havnar – og vinnuendamál
D: Miðstaðarøki

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús

G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru D1: Frlendi, E: Neyst, F: Frítíðarhús, G: Bóndahús og 4. grundumráði komin afturat. Økið til Havnar- og vinnuendamál er koyrt í hvør sítt øki.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum Kaldbak ásetingar – áðrenn og eftir broyting, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum Kort - áðrenn broyting og Kort - eftir broyting.

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Kaldbak verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Kaldbak er ein minni bygd, og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 m2. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Kaldbak verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Kaldbak og verandi víddir á grundstykkjum í Kaldbak.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir vera, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum, og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí verður ynskt, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak,* journal nr. 22/04935

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak sambært skjølunum Kaldbak – endurskoðað 11.01.24 og Kort – eftir broyting og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 02. apríl 2024:** Kunnað var um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Kunnað verður um, at byggisamtyktin er løgd til hoyringar.

**Kaldbaksnevndin 23. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kaldbaksnevndin hevur biðið um at fáa málið á skrá. Uppskot um nýggja almenna byggisamtykt fyri Kaldbak hevur ligið til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 18. september til 30. oktober 2024. Kommunan hevur móttikið fleiri viðmerkingar. Hesar viðmerkingar verða viðgjørdar, og eitt tillagað uppskot verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina, tá ið uppskotið er klárt.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2025:** Býararkitekturin greiddi frá, at málið hevur verið til hoyringar og nógvar viðmerkingar eru komnar. Málið verður lagt fyri í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar og viðgjørt eftir vanligu mannagongdini.

**Ískoyti:**
Í hoyringstíðarskeiðnum millum 18. september og 30. oktober 2024 móttók kommunan 9 viðmerkingar, sum vísa á ymsar vansar við uppskotinum og broytingaruppskot (sí skjal *25/01096-8 Viðmerkingar og brytingaruppskot*).

Grundleggjandi ósemja er, um økir í bygdini skulu leggjast afturat sum byggilendi ella varðveitast sum landbúnaðarjørð.

Búnaðarstovan mælir ítøkiliga til, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a verður varðveitt sum landbúnaðarjørð ella verður broytt frá byggilendi til landbúnaðarjørð, eitt øki svarandi til omanfyri 12.500 $m^2$.

Ein borgari leggur somuleiðis dent á, at innleiðandi orðing frá galdandi byggisamtykt, skal varðveitast, har tað m.a. stendur *«Kaldbak er ein bóndabygd, og bøurin eigur í størst møguligan mun at varðveitast sum hann er. Tó hava bygdafólkini loyvi at byggja í sjálvari bygdini, men skal tá ansast eftir, at sum minst verður tikið av bønum, og at býlingsdámurin verður varðveittur.»*

Umboð frá kaldbaksnenvdini vísir hinvegin á fleiri økir, sum sambært broytingaruppskoti ikki eru væl egnað til landbúnaðarendamál, og tískil eiga at vera løgd afturat sum møguligt sethúsaøki. Á henda hátt kann bygdin mennast sambært siðbundnum byggimynstri. Bøur kann annaðhvørt varðveitast til landbúnað ella brúkast sum byggilendi, og er talan um ósambærilig endamál.

Umsitingin mælir til at gera eitt nýtt uppskot, sum í størri mun er varðveitandi, og er orsøkin til tilmæli, at bygdin á henda hátt varðveitir verandi dám í samsvari við søguligu menningina. Støða kann takast til at víðka byggilendið, eftir at ein bygdaætlan er gjørd fyri bygdina í samráð við staðbundnu nevndina og borgarar í bygdini.

Niðanfyri er ein samanumtøka og viðgerð av viðmerkingunum:

- ***Spískisteinur eigur at friðast***

Í tveimum mótmælum verður heitt á kommununa, at friða Spískastein, sum sambært uppskotinum verður innan fyri nýtt A øki (sethús).

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin metir, at serlig eyðkennir í lendinum eiga at verða vird og varðveitt, har tað er møguligt, og fer at mæla til nýtt uppskot, har økið kring Spískastein framyvir ikki verður byggilendi.*

- ***Dvørgasteinur skal friðast***

Dvørgasteinur er í útnyrðingshorninum av D økinum (D2 økinum, sambært uppskotinum), sum er vestan fyri høllina og oman fyri kirkjuna.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til viðmerking um Spískastein, verður uppskotið somuleiðis tillagað, soleiðis at Dvørgasteinur kemur at standa uttan fyri byggiøki.*

- ***Stykkið vestan fyri høllina og omanfyri Kirkjuna (partur av matr. 22a) skal friðast***

Í tveimum mótmælum verður víst á týdningin, at kirkjan frá 1834 sleppur at standa frítt. Sipað verður til løgtingslóg nr 19 frá 1948 um friðan av fornminnum, sum ásetur, at umliggjandi øki innan fyri 100 m frá friðaðum bygningum (kirkjuni) kann verða lagt undir friðing.

Búnaðarstovan mælir somuleiðis frá at byggja í hesum økinum, av tí at økið verður dyrkað og hevur landbúnaðarligan týdning.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Kirkjan stendur lutfalsliga frítt og er omanfyri 50 m frá nærmasta sethúsi. Verandi D byggiøki (sambært uppskotinum D2, ætlað almennum stovnum og mentan) er omanfyri Korssgøtu, beint yvir 20 m norðanfyri kirkjuna. Ongar ítøkiligar byggiætlanir fyrileggja, men hevur ætlanin verið at byggja frítíðarskúla í økinum omanfyri høllina.*

*Í viðmerking mælir umboð frá umsitingini vegna Børn og Ung til, at nýggjur stovnur verður bygdur til námsfrøðiliga virksemið, og at námsfrøðiliga er skilabest, um hølisviðurskiftini fyri barnagarð og frítíðarskúla vera atskilt.*

*Mælt verður til at broyta verandi D øki til miðstaðarbygging fyri part av matr. nr 22a til 4. grundumráði, í samsvari við varðveitandi grundhugsanina, og soleiðis at lendið kring kirkjuna verður verandi óbygt. Og mælt verður til at partur av matr.nr. 11a  (við svingið niðan móti á Soylugørðum) verður varðveitt sum byggilendi til framtíðar stovn (D2), sum í upprunaliga uppskotinum.*

- **Matr nr. 34, á Soylugøðum 50, skal vera bústaðarøki (tvey mótmælir)**

Ætlanin er at høvuðsumvæla húsini, ið eru millum elstu sethús í Kaldbak, í uppruna stand. Eigarar vísa á, at tað er sera umráðandi, at húsini framvegis eru staðsett í sethúsaøki. Matrikkulin er omanfyri 26.000 $m^2$, og skotið er upp at gera eitt 500$m^2$ stórt bústaðarøki kring húsini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Mælt verður til at ganga viðmerkingni á møti, og at tillaga uppskotið, tó soleiðis at 400$m^2$ bústaðarøki (A1) verður galdandi kring húsini. Hetta er minst loyvda grundstykkjavídd, sambært uppskotinum, og verður hetta mett ráðiligt, tá talan er um smá og eldri hús. Broytingin verður gjørd, til tess at lógliggera verandi bygging, men áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Partur av matr. nr 36a skal ikki vera sethúsaøki**

Festari mótmælir, at byggilendi er ásett fyri part av matr. nr 36a. Grundgevingin er, at stykkið er gamalt og væl veltur slátturbøur, ið ber nógv gras og er grundarlag undir fóðrinum til mjólkarframleiðslu. Økið verður eisini nýtt sum atkomuvegur til restina av bønum tilhoyrandi garðin, og lagt verður afturat, at ábendingar eru um fornar toftir í bønum.

Búnaðarstovan frámælir somuleiðis, at bygt verður á hesum økinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Talan er um eitt galdandi bústaðarøki, sum í uppskotinum verður varðveitt sum sethúsaøki. Umsitingin er sinnað út frá nevndu grundgevingum at rætta uppskotið, soleiðis, at A økið verður broytt til 4. grundumráði.*

- **Mælt verður til at varðveita og virða orðing í innleiðandi tekstinum, um at Kaldbak er bóndabygd**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin mælir til, at orðingin, sum er frá upprunaligu byggisamtyktini, verður varðveitt í uppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt fyri Kaldbak, undir innleiðandi brotinum «Endamál», tó við broyting, soleiðis at tað ikki verður skilt millum bygdafólk og aðrar borgarar í kommununi*

- **Mótmælt, at øki sett av til búnaðarbrúk, verður broytt til bústaðarøki.**

Mótmælið snýr seg sum heild um, at óbygd økir gerast til bústaðarøkir sambært uppskotinum, og at hetta er ódámligt at fremja, meðan bóndur bíða eftir, at landið fær lendið skrásett. Serliga verður víst á broytingina av parti av matr.nr. 10 og 8, har fjós, hoyggjhús og úthús eru broytt til bústaðir í uppskotinum, tí hetta forðar bóndaskapinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin ger nýtt uppskot, har størri partur av lendinum á Kaldbak verður lagt av til landbúnaðarjørð, og er tað best, um lendið verður skrásett, so avgerðir um nýtslu av lendinum kunnu takast á hollum vitanargrundarlagi. Í mun til matr. nr 8 og 10 (býlingurin Við Á) er talan um býling við bústøðum og landbúnaði. Umsitingin metir, at tað hóskar seg at gera ein nýggjan umráðispart (A2), sum verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk. Endamálið er at staðfesta, at í hesum býlinginum er hóskandi framhaldandi at fremja virksemið, sum hevur við landbúnað at gera. Ásetingar fyri nýggja A2 økispartin, sum einans verður galdandi í býlinginum Við Á, er soleiðis:*

§. Ásetingar fyri umráðispart A2
*1 Umráðisparturin verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk*
*2 Sethúsini skulu lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri umráðispart A1.*
*3 Bygging í samband við djórahald og jarðarbrúk skal lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri*
*4. grundumráði.*

- **Broyta matr. nr 68 til neystaøki**

Mjólkargøta 14 (matr.nr. 68) er ein neystagrund, og hava eigarar fingið loyvi at byggja neyst, tá ið byggisamtyktin er endurskoðað. Sambært broytingaruppskotinum er økið tó lagt út sum økið í C, miðstaðarbygging v.m., og er ynskið tískil at broyta ásetingarnar fyri matr. nr 68 til øki E neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Nýtt uppskot verður gjørt, har matr. nr. 68 er neystaøki, og metir umsitingin, at hesar ásetingarnar hóska seg til økið.*

- **Ivamál um matr. nr 86**

Bygningurin á matr. nr. 86 er ikki eitt neyst, og hevur ongantíð verið eitt neyst. Tó er bygningurin sambært uppskotinum endaður í øki E, neystaøki. Víst verður á, at henda nýtslan kann gerast ein avmarking.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í løtuni er bygningurin í sama grundumráði sum neystini eystanfyri (C-Havna- og vinnuøki), og staðsetingin við fjøruna talar fyri eini áseting, ið loyvir virksemi, sum hevur við sjógv at gera. Mælt verður til at halda fast í byggisamtyktarbroytingini, og víst verður á, at byggisamtyktarbroytingin ikki er til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.*

- **Víðka neystaøkið vestanfyri Býggjarstøð**

Vestanfyri neystini á Barkhellu er eitt óbygt neystastykkið, sum ikki er tikið við í neystaøkið, sambært uppskotinum. Økið verður sambært eigara leigað frá Búnaðarstovuni, men er ikki frámatrikulerað, og hoyrir tí til matr.nr. 49a. Mælt verður til, at hetta økið verður tikið við í økispart E, neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Neystaøkið fevnir um øki vestanfyri neystini á Barkhellu og part av matr.nr.49a. Tískil er ikki neyðugt at broyta uppskotið til tess at ganga ynskinum omanfyri á møti.*

- **Uppskot um staðseting av møguligari bygdalund**

Á tekning verður eitt økið leysliga markerað millum nýggju høllina og nýggju útstykkingina við vegnum á Kongsjørð. Sambært broytingaruppskotinum verður lendið sjáldan sligið, og er tað tí møguleiki at planta hetta økið við t.d. lægri trøum og runnum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***

*Í mun til byggisamtyktarbroytingar, er mest hóskandi ásetingin fyri eina møguliga bygdalund D1. Tað er torført at staðseta nágreiniligt mark millum bø og lund, áðrenn ein ítøkilig plantingarætlan og skipan av gøtum fyriliggur. Mælt verður til at varðveita økið í 4. grundumráði, men at staðfesta eina møguliga bygdalund í Kaldbak í byggisamtyktini og býarskipanini, tá ið ein ítøkilig verkætlan er komin longur ávegis.*

- **Tá bygt verður fram við vegnum niðan á Garðar, skal vera ávís frástøða frá húsum, garasjum o.ø.**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin mælir til, at viðkomandi økið, niðanfyri vegin Niðan á Garðar, í nýggjum uppskoti verður broytt frá sethúsaøki til 4. grundumráði. Tískil er fyribils ikki neyðugt at víðka veg ella áseta byggilinju.*

- **Fleiri økir eiga at leggjast afturat sum sethúsaøkir**

Víst verður á økir, sum sambært viðmerkingini ikki vera brúkt av bóndrum, og sum eru væl egnað til bústaðarendamál. Økini sum víst verður á, eru í leingjan av verandi býlingum í gomlu bygdini, og tískil verður hildið uppá tað gamla siðbundna byggimynstrið.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Vísandi til varðveitandi útgangstøðið í nýggjum uppskoti mælir umsitingin frá, at staðseta nýggj sethúsaøkir á bøi, áðrenn nýggj bygdaætlan staðfestir, hvussu ynskiligt er, at bygdin skal mennast. Harafturat er sambært nýggja uppskotinum pláss fyri omanfyri 10 bústøðum innanfyri A økini, harímillum nýggj útstykking á vegnum, Á Kongsjørð, og verður hetta mett at nøkta bústaðartørvin í nærmastu framtíð. Mælt verður til at taka støðu til eina møguliga víðkan av sethúsaøkjunum, eftir at nýggj bygdaætlan er dagførd fyri Kaldbak.

- **Matrikkul 19c (Við Á 25A) er ikki í bústaðarøki, hóast talan er um bústað**

Ynskið er, at matr. 19c verður broyttur til bústaðarøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Støddin á húsinum, grundøkinum og frástøðan frá bygdini er lík áðurnevnda Á Soylugðrum 50. Umsitingin mælir tí somuleiðis til at broyta grundøkið (matr. nr 19c) til bústaðarøki A1, og áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Øki við Byggjarstøð (støðna) kann takast við sum neystaøki**

Í broytingaruppskoti verður skotið upp at víðka neystaøki niðan í bøin við matr. nr. 49a, soleiðis at neystaøkið kann byggjast, partvíst undir bøi, í samráð við avvarðandi eigara.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í uppskotinum fylgir neystaøkið neyvt matrikkulmarkinum, og mælir umsitingin frá at víðka neystaøkið norður og tvørturum matrikkulmarkið millum matr. nr 49c og 49a.*

- **Búnaðarstovan ynskir at taka av byggilendinum**

Við grundgeving um týdningin at varðveita gott landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi í Føroyum, og at tryggja okkara eftirkomarum atgongd til hetta tilfeingið, verður víst á, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a skulu varðveitast sum landbúnaðarjørð ella broytast frá byggilendi til landbúnaðarjørð, svarandi til eitt øki omanfyri 12.500 $m^2$.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í nýggja uppskotinum gongur umsitingin viðmerkingini partvíst á møti, men letur framvegis part av matr nr 11a vera byggilendi, í samband við bygging av møguligum framtíðar stovni.*

At enda eru tvey byggisamtyktarmál, sum eru viðkomandi í samband við endurskoðan av byggisamytiktini fyri Kaldbak, men sum umsitingin ikki hevur móttikið sum beinleiðis viðmerking í hoyringartíðarskeiðnum.

1) Grótbrotið við Krossá (*mál nr. 21/00569*)

Við gamla grótbrotið við Krossá er áseting C-Vinnu- og havnaøki galdandi. Økið hevur innkoyring og verður í innanhýsis samskifti víst á, at økið møguliga í framtíðini kann nýtast sum sethúsaøki. Umsitingin mælir til at halda fast við verandi uppskot, har vinnu- og havnaøki verður økið broytt til 4. grundumráði. Mett verður, at hendan ásetingin er hóskandi fyri økið, ið hevur verið nýtt sum grótbrot, tyrving og til moldbreiðslu, og sum sambært nýggju ásetingini framyvir kann nytast sum landbúnaðarøki.

2) Møgulig víðkan av bústaðarøki í býlinginum Á Bø. (*mál nr. 25/05141)*

Eigari av matr. nr 89 hevur søkt Búnaðarstovuna um at keypa lendi frá matr. nr 49a, soleiðis at matr. nr 89 veksur úr 272 fermetrum uppí 400 fermetrar. Hetta er í sambandi við møguliga útbygging av húsunum. Mælt verður til at rætta byggisamtyktina eftir nýggjum møguligum marki, soleiðis at matr. nr 89 í framtíðini kann víðkast uppí 400 fermetrar, tí hetta er í samsvari við minst loyvdu grundstykkjavídd. Í nýggjum uppskoti verður mælt til at víðka bústaðarøki norðanfyri matr. nr 89, við umleið 130 $m^2$, soleiðis at viðkomandi grundøki kann víðkast samsvarandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

4) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
5) Upplýsingar til møguliga heildarætlanir eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
6) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3).

At enda viðmælti byggimálsdeildin, at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologisk fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Hendan viðmerkingin verður tikin við til eina seinni dagføring av byggisamtyktini.

**Nýggj skjøl:**
- *J.nr. 25/01096-13- Upprunaligt uppskot, 11.01.2024*
- *J.nr. 25/01096-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Almenna byggisamtyktin – Kaldbak – Við markeraðum broytingum*
- *J.nr. 25/01096-12 – Uppskot – Almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kaldbak - áðrenn og eftir broyting*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kaldbak sambært skjølunum *Uppskot – almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025* og *Kort – Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at tað eiga at vera fleiri økir afturat til bústaðarbygging.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 939<br>Forkvinnunnar merki: |

## 287/25 Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 89/25 | 25/08052-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 229/25 | 25/08052-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 287/25 | 25/08052-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/06231-2 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ætlaði íbúðarvegurin verður partur av verandi vegakervi hjá kommununi og framhald av málinum um útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging, vísandi til at tekniska nevnd hevur tikið undir við tilmælinum 10. juni 2025, at hava nýtt útboð fyri matr. nr. 51-203c.

Í hesum føri er ætlanin at fara undir vegarbeiðið fyrst.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 940<br>Forkvinnunnar merki: |

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 8175 | | | Útstykkingarvegur á matr. nr. 103c, Kollafjørður |

| Upphædd |
|---|
| 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | na |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 15.000 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) heimila umsitingini at fyrireika útbjóðingartilfar at prosjektera vegaætlanina at leggja fyri nevndina aftur.
2) játta kr. 200.000 av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir.
3) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

# 288/25 Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu - 23/03191

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 85/25 | 25/00557-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 230/25 | 25/00557-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 288/25 | 25/00557-1 |

**Upprunin til málið**

Málið er upprunaliga lýst í jnr. 23/03191 Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu, sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti:**

Arbeiðið at gera vendiplássið er liðugt, og verkætlanin L81052, Viðkan av vendiplássi á Reynstúni og Reynsgøtu, verður nú sambært játtanarreglunum løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð at loka.

Verkætlanin endar við einum halli á kr. 36.000, sum verður fíggjað av løgukarminum L81999, Vegaverkætlanir, undir kontu 8175, Vegir (íløgur).

**Skjøl**

jnr. 23/03191 Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81052 | Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu | | 36.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Kr. 1.536.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til,

- at verkætlanin L81052, Víðkan av vendipláss á Reynstún og Reynsgøtu, verður lokað.
- at hallið á kr. 36.000 verður fíggjað av løgukarminum LK81999, Vegaverkætlanir, bæði undir kontu 8175, Vegir (íløgur).

  og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 943<br>Forkvinnunnar merki: |

# 289/25 Útskifting av snildskeltum við vegamótið Sjúrðargøta/Varðagøta - 24/00113

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 83/25 | 25/09733-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 233/25 | 25/09733-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 289/25 | 25/09733-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 24/00113 Útskifting av snildskeltum við vegamótið Sjúrðargøta/Varðagøta, ið er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Ferðsluskeltini eru nú útskift við talgild skelti, ið eru á støðd við vanlig ferðsluskelti, og hesi eru betur hóskandi at standa í hesum umhvørvinum og eru minni viðbrekin enn tey, sum vóru áðrenn.

Arbeiðið er liðugt við einum samlaðum troti á kr. 94.873.

Nú arbeiðið er liðugt, verður verkætlanin sambært játtanarreglunum løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið at loka.

**Skjøl**
jnr. 24/00113 Útskifting av snild skeltum við vegamótið Sjúrðargøta/Varðagøta

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir (karmur) | 8175 | L81058 | Útskiftan av snildskeltum | | 94.873 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At trotið á verkætlanini L81058, Útskiftan av snildskeltum, kr. 94.873, verður fíggjað av løgukarminum LK81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175, Vegir (íløgur).
- At verkætlanin verður lokað.

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí rætting, at rætta upphæddin verður upplýst á býráðsfundinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 290/25 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin - 15/04352

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.09.2025 | 57/25 | 25/03255-10 |
| 2 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 82/25 | 25/03255-10 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 232/25 | 25/03255-10 |
| 4 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 290/25 | 25/03255-10 |

**Upprunin til málið**
Upprunaliga málslýsingin er í jnr. 15/04352-4, og er løgd við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Í framhaldi av býráðssamtykt frá 19.09.2024 hevur umsitingin móttikið fleiri kærur um ætlaðu vegatkomuna og gelendara á eystursíðuni á brekkuni millum Láarveg og Traðaveg. Av somu orsøk er ikki komið víðari í málinum, og ynskir umsitingin at loka verkætlanina, so leingi sum tað ikki fæst ein samlað niðurstøða frá íbúgvum í økinum.

**Skjøl**
jnr. 15/04352-4 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | L81999 | Dagføring av Traðabrekku | 8175 | LK81959 | Vegaverkætlanir (karmur) | | 350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at flyta tær kr. 350.000 kr. av L81999 "Dagføring av Traðabrekku" aftur á løgukarmin 8175-LK81999 Vegaverkætlanir (karmur), at loka verkætlanina og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. september 2025:** Tikið av skrá.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 946<br>Forkvinnunnar merki: |

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Feilur er í samtyktini frá 24. november 2025. Rætta upphæddin ið skal flytast aftur á løgukarm LK81999 er 286.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81059 | Dagføring av Traðabrekku | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | 286.000 kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at flyta tær kr. 286.000 kr. av verkætlanini, L81059 "Dagføring av Traðabrekku", aftur á løgukarmin 8175-LK81999 Vegaverkætlanir (karmur), at loka verkætlanina og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhemsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at loka verkætlanina.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at ikki at loka málið og ístaðin at gera ein tilbúgvingarveg. Broytingaruppsotið fall við fimm atkvøðum fyri og átta atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Atkvøtt varð síðani um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

| | Býráðsfundur<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 948 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 291/25 Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík - 22/01107

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 84/25 | 25/09957-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 234/25 | 25/09957-2 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 291/25 | 25/09957-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í jnr. 22/01107-2 Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík, ið er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Verkætlanin L68042, Nýggj reinsiverk á Mýrini, er liðug og verður sambært játtanarreglunum løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð at loka.

Verkætlanin endar við einum troti á kr. 7.000, sum verður fíggjað av Løgukarminum LK68999 Kloakkir undir kontu 6875, Kloakkir (íløgur).

**Skjøl**
22/01107 Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68042 | Nýggj reinsiverk á Mýrini | | Kr. 7.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Kr. 2.807.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til
- at verkætlanin L68042 "Nýggj reinsiverk á Mýrini" verður lokað.
- at trotið á kr. 7.000 verður fíggjað av Løgukarmi LK68999 undir konto 6875, Kloakkir (íløgur), og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 950<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

# 292/25 Asfaltering í Miðbýnum 2023 - 23/03610

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 86/25 | 25/00241-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 231/25 | 25/00241-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 292/25 | 25/00241-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er upprunaliga lýst í j.nr. 23/03610-1 Asfaltering í Miðbýnum 2023, sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Verkætlanin L81053, Asfaltering í miðbýnum 2023, er liðug og verður nú sambært játtanarreglunum løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð at loka.

Tá verkætlanin endar, er eitt avlop á kr. 593.000, og verða hesar fluttar aftur á løgukarmin LK81999, Vegaverkætlanir undir konto 8175 Vegir (íløgur).

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81053 | Asfaltering í miðbýnum 2023 | 8175 | LK81999 | Vegaverkætla nir | | Kr. 593.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Kr. 407.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til
- at verkætlanin L81053, Asfaltering í miðbýnum, verður lokað.
- at avlopið á kr. 593.000 verður flutt aftur á Løgukarmin LK81999, Vegaverkætlanir, undir kontu 8175, Vegir (íløgur).

  og beina málið í um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undi við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 952 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 293/25 Kloakkarbeiði á Heiðavegi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 35/25 | 25/05869-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 120/25 | 25/05869-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 170/25 | 25/05869-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 79/25 | 25/05869-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 235/25 | 25/05869-1 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 293/25 | 25/05869-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um fyrireiking til kloakkarbeiði á Heiðavegi.

Fyribils metingar fyri prosjektering og kloakkarbeiðið er uml. 1,75 mió.
Tíðarætlan: Ætlanin er at fara undir prosjektering og útbjóðing seinni í ár.

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
25/00417-1 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Kloakkarbeiði á Heiðavegi | 1.750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) Játta kr. 1.750.000,- av kto 6875 Kloakkir (íløgur) LK68999 Kloakkir, á nýggja verkætlan, Kloakkarbeiði á Heiðavegi, undir somu kto. fyri 2025 til at fyrireika útbjóðingartilfar til kloakkarbeiði á Heiðavegi og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Anja Weye var ikki við í viðgerðini av málinum.

| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 953<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, tó so at innkomnu tilboðini skulu leggjast aftur fyri fíggjarnevndina til endaliga støðutakan

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**Ískoyti**
Licitatión varð hildin 16.10.2025, innkomin boð vóru hesi:

- Við Sjógv kr. 2.507.368 (u/mvg)
- A.Berg kr. 2.705.150 (u/mvg)
- David Nordendal kr. 2.809.784 (u(mvg)
- Plan Avboð
- R. Brockie Onki boð
- Maskingrevstur Avboð

Kostnaðarmetingin fyri sjálvt kloakkarbeiðið var kr. 2.000.000 smb. skjali nr. 22 undir 25/05869-5

Orsøkin fyri at lægsta tilboð var hægri enn kostnaðarmetingin var, at upprunaliga metingin av asfaltarbeiðinum var ov lág. Við støði í lisitatiónsúrslitinum hevur umsitingin gjørt dagførda kostnaðarmeting álj. Kr. 3.100.000 sbr. skjal nr. 25/05869-24.

Higartil eru játtaðar kr. 1.750.000 til arbeiðið. Biðið verður tí um, innan fyri kto. 6875, Kloakkir (íløgur), at játta afturat kr. 1.350.000 av løgukarmi LK68999, Kloakkir, til verkætlan L68048 Kloakkarbeiði á Heiðavegi.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (Íløgur) | 6875 | L68048 | Kloakarbeiði á Heiðavegi | | Kr. 1.350.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Kr. 3.100.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | Kr. 1.750.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Skjøl**
Kostnaðarmeting: Jnr. 25/05869-5 Kloakkarbeiði á Heiðavegi

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1.350.000 av løgukarmi LK68999 kloakkir (Íløgur) á verkætlan L68048, Kloakkarbeiði á Heiðavegi, og beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 294/25 Innbjóðing frá Umhvørvismálaráðnum at søkja um stuðul til útbygging av landstreymi til skip við bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.03.2025 | 14/25 | 25/03822-2 |
| 2 Havnanevndin | 25.11.2025 | 53/25 | 25/03822-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 236/25 | 25/03822-2 |
| 4 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 294/25 | 25/03822-2 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá umhvørvismálaráðnum dagfest 27.02.2025

**Lýsing av málinum**
Umhvørvismálaráðið bjóðar í skrivi d.f. 27.02.2025 kommunum at søkja um stuðul til útbygging av landstreymi til skip við bryggju. Fortreytin fyri at søkja er,

- At kommunan og havnin hava ítøkiligar ætlanir um at gera íløgur í landstreym
- At farast kann undir arbeiðið í 2025 ella í seinasta lagi primo 2026 og
- At kommunan og havnin við svarskrivi innan 1. apríl vísa á áhuga fyri at søkja um stuðul og ítøkiliga ætlan fyri útbygging av landstreymi í einari ella fleiri havnum í kommununi.

Í samband við at landstreymur til skip alsamt gerst meiri viðkomandi fyri umhvørvið og vinnuna, hevur Tórahavnar havn í nøkur ár kanna ymsar landstreymsloysnir í Kollafirði og á Skansabryggjuni í Tórshavn, umframt at ymsar fyrireikingar eru gjørdar til landstreym, serliga á Skansabryggjuni. Loysnirnar eru í høvuðheitum:

<u>Skansabryggjan – fyrireiking til landstreym</u>
Tá ið nýggja Skansabryggjan varð bygd, vórðu fyrireikingar til komandi landsstreymskipanir gjørdar, við at leggja ymsar leiðingar niður í lendið:

- SEV hevur lagt háspenningskaðalar frá trafostøðunum og framvið bryggjukantunum
- Lágspenningskaðalar (8 stk. 240mm$^2$) eru lagdir frá trafostøðunum og framvið bryggjukantinum, hesir kunnu samanlagt føra upp til 2400 A ella uml. 1,6 MW av orku.
- Dragirør (2 x Ø110mm + 2x200mm) til elkaðalar eru løgd frá trafostøðunum og framvið bryggjukantinum.
- Eyka dragirør (6 x Ø150mm) eru løgd frá einari trafostøð og til 3 íbindingarstøð á C-linjuni í.s.v. verkætlanaruppskot til Eimskip/RAL (sí lýsing niðanfyri).

<u>Kollafjørður (2019):</u>
Loysn til at veita streym til landstreym til uppisjóvarskip, frystitrolarar og frystifarmaskip, sum landa/lossa til Faroe Pelagic og frystigoymsluna hjá Samskip. Talan er um eina skipan, ið kann veita lágspenning (400V–690V / 50/60 Hz). Loysnin kann uppbyggjast og samansetast á ymsan hátt, viðvíkjandi støða (veitingarmáttur 800kW – 1600kW), 1-3 íbindingarstøð, og 1-3 skip, sum kunnu fáa streym samstundis. Hesar ymsu loysnir vórðu í 2019 mettar at kosta frá 7 til 18 mió alt eftir hvussu loysnin var samansett.
Síðani hendan ætlanin var frammi, er virksemi í sambandi við Faroe Pelagic og frystigoymsluna minkað munandi og tí er tørvurin á landstreymi heldur ikki hin sami sum hann var í 2019.

<u>Skansabryggjan C-linjan (ABB verkætlanaruppskot Eimskip/RAL, 2021):</u>
Loysn at veita streym til nýggju bingjuskipini hjá Eimskip og Royal Arctic Line. Talan er eina skipan, ið kann veita háspenning (6,6kV við 60 Hz) á trimum íbindingarstøðum. Loysnin er samansett av tveimum byggistigum, har ið fyrsta stig veita 2,5 MW til 1 skip á 3 íbindingarstøðum, meðan annað stig 2 er ein

útbygging við 2,5 MW aftrat, soleiðis at 2 skip kunnu taka landstreym samstundis. ABB upplýsti í 2021 eina prísábending á uml 10 mió kr fyri eina slíka loysn, sum tó er uttan íbindingargjald til SEV, grevstur og annað ókent.

<u>Skansabryggjan, A-linjan (2022):</u>
Nakað av samskifti hevur verið við Smyril Line og SEV um eina landstreymsloysn til Norrønu á A-linjuni á Skansabryggjuni. Eitt uppskot frá PowerCon, ið SEV hevði latið gjørt til Bakkafrost, varð kannað, men málið steðgaði aftur. Sambært SEV og PowerCon kostaði en tílík loysn inni á Bakka umleið 10 mió kr íroknað íbindingargjald og grevstur.

<u>Vestara bryggja:</u>
Á vestaru bryggju er í dag ein minni skipan til landstreym, sum kann veita upp til 125 A til hvørt skip. Skipanin verður nógv brúkt av smærri fiskiskipum. Fleiri av skipunum, sum landa til Barðið, hava tó frystilast, sum krevur meiri streymi enn tað sum tøkt, og kunnu tey tí ikki binda í landstreym.
Í sambandi við, at Barðið skal byggja nýggja frystigoymslu vestanfyri Bacalao, hevur Tórshavnar havn arbeitt við at fyrirreika umlegging elveitingini til Bacalao, sum bæði er gomul og í ringum standi, men samstundis eisini rættiliga máttmikil (í streymstyrki). Í hesum sambandi er hugskot komið fram um at ein partur av el-veitingini hjá Bacalao møguliga kann umleggjast til landstreym til skip við vestaru bryggju, soleiðis at fleiri skip kunny binda í landstreym. Ein leyslig meting av kostnaðinum av eini tílíkari umlegging er uml 2 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at tann verkætlanin, ið ger mest gagn í mun til kostnaðin, er verkætlanin á vestaru bryggju. Íbúðarøkið úti á Reyni liggur í lutfalsligari stuttari fjarstøðu frá vestaru bryggju, og frystilínuskipini, ið landa til Barðið, larma nakað, tá ið frystilastin koyrir. Flestu klagur um larm frá skipum í Tórshavnar havn, koma eisini frá íbúgvum á Reyni.
Virksemi hjá Barðinum er í menning, og nú Barðið ætlar at byggja nýggja frystigoymslu, kann væntast, at enn fleiri skip fara at landa til Barðið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læттar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at Tórshavnar havn boðar Umhvørvismálaráðnum frá, at vit hava áhuga at søkja um stuðul til verkætlanina á vestaru bryggju, og at arbeitt verður víðari við at fyrireika verkætlanina og endaligu umsóknina.

**Havnanevndin 11. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tórshavnar havn sendi hin 5. mai 2025 inn umsókn til Umhvørvismálaráðið um stuðul til landstreymsskipan á vestaru bryggju (j.nr. 25/03822-8).

Verkætlanin er fyrireikað í samstarvi við el-installatørin P/F Install, sum eisini hevur projekterað og søkt SEV um góðkenning av umlegging av gomlu el-innleggingini á Bacalao, soleiðis at ein partur kann nýtast til hesa landstreymsskipan. Sum part av projekteringsarbeiðnum hevur Install eisini givið Tórshavnar havn tilboð upp á arbeiðið at gera landstreymsskipanina, áljóðandi kr 2,385 mió kr.

Umhvørvismálaráðið hevur í skrivi dagfest hin 19. november 2025 játtað Tórshavnar havn tilsøgn um stuðul áljóðandi 1,25 mió til hesa verkætlan. Fyri at fíggja verkætlanina krevst sostatt ein játtan av íløgum á uml 1,25 mió.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:
- At taka av tilboðnum frá P/F Install upp á landstreymsskipan áljóðandi 2,385 mió kr.
- At játtaðar verða 1,25 mió kr av íløgum hjá Tórshavnar havn, harav 1,0 mió verður tikin av verkætlanarnummar P33 «landstreymur» og 0,25 mió av íløgukarminum P00.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 25. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 295/25 Umsókn um at leiga vinnuøki á Oyrareingjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 04.11.2025 | 44/25 | 25/08712-2 |
| 2 Havnanevndin | 25.11.2025 | 52/25 | 25/08712-2 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 295/25 | 25/08712-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá HH Service v/Kjartan í Homrum.

**Lýsing av málinum**
HH Service er eitt felag í Kollafirði, sum veitir tænastur innan bátaviðlíkahald til privat- og vinnukundar. Felagið søkir í skrivi dagfest 13. juni 2025 um at leiga eitt øki á Oyrareingjum til viðlíkahald og umvæling av bátum. HH Service ynskir eitt øki á umleið 3000 $m^2$, men eru eisini til reiðar at laga seg til eina stigvísa loysn, sum kann gera ætlanina lættari at fremja. Økið skal nýtast til:

- At taka bátar upp
- Arbeiða við viðlíkahaldi og goymslu
- Møguliga framtíðarbyggja eina beding til arbeiðið
- Byggja eina høll á uml. 1500 $m^2$ til arbeiði og goymslu

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Soleiðis, sum økið á Oyrareingjum liggur í løtuni, verður torført at finna eina góða loysn har. Asfalteraða kajøkið er útleigað til flutningsvirksemi (salt og pakkitilfar), og ov lítið pláss er eftir til virksemið við viðlíkahald av bátum, og tað hóskar heldur ikki saman. Sunnari (innari) partur av økinum er sum kunnugt ikki planerað og liðugtgjørt enn, og so leingi ætlanir eru um at fara undir tað arbeiðið, ber illa til byrja nýtt virksemi har.
Umsitingin hevur sum eina alternativa loysn víst á eitt annað økið innast á havnalagnum á Langasandi (vestanfyri goymslubygningin hjá Bakkafrost). Hetta økið er ikki útleigað í løtuni og verður mest brúkt til parkering av stórum akførum og vognum, og sostatt ikki til havnarelaterað virksemi.
Tórshavnar havn metir tískil, at tað er ein fyrimunur, at økið verður skipað og aktiverað til virksemi, sum hevur samband við sjóvinnu- og havnavirksemi, heldur enn at verða brúkt til parkering av vognum o.t.

Á økinum, sm er um. 900 $m^2$, er pláss at byggja eina høll á uml. 600 $m^2$ og til eitt uttandura øki á uml. 300 $m^2$ til at seta bátar á.

HH Service hevur (munnliga) váttað, at felagið tekur undir við uppskotinum til loysn á Langasandi, sum teir eisini eru væl nøgdir við. Uppá longri sigt umhugsar felagið tó at søkja um størri leiguøki á Oyrareingjum, tá ið vinnuøkið er liðugt, og har ið til ber at byggja eina beding.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☒    Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at HH Service fær bjóðað eitt øki á 900 m² á Langasandi til leigu sum víst á viðløgdu tekning, og at uppskot til leigusáttmála verður gjørt at leggja fyri havnanevndina og býráðið til støðutakan.

**Havnanevndin 04. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
HH Service hevur í telduposti dagfestur 4. november boðað frá, at teir taka av tilboðnum um at leiga økið á 900 $m^2$ á Langasandi.
Uppskot til 10 ára leigusáttmála (j.nr. 25/08712-9) er gjørt, ið HH Service tekur undir við.

**Skjøl**
J.Nr. 25/08712- : Leigusáttmáli.

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at taka undir við uppksotinum til leigusáttmála, og at beina málið í býráðið.

**Havnanevndin 25. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 296/25 Útskiftan av sløkkiliðsbilum - 24/08064

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin | 25.09.2025 | 6/25 | 25/08886-1 |
| 2 Tilbúgvingarnevndin | 26.11.2025 | 9/25 | 25/08886-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 237/25 | 25/08886-1 |
| 4 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 296/25 | 25/08886-1 |

**Upprunin til málið**
Útskiftan av sløkkiliðsbilum mál nr. 24/08064

**Lýsing av málinum**
Nú fleiri av okkara sløkkiliðsbilum standa fyri útskiftan, er neyðugt at byrja arbeiðið við at fáa inn konkret tilboð.

Havi gjørt eina raðfesting av útskifting, og er hon gjørd yvir árini 2027-2029.

1. Sløkkiliðsbilur setast í ordra í oktober 2025 og kann leverast mars. 2027
2. Tangabilur setast í ordra í oktober 2025 og kann leverast mars. 2027
3. Sløkkiliðsbilur setast í ordra í oktober 2025 til levering mars. 2028
4. Tangabilur setast í ordra í oktober 2025 til levering mars. 2028
5. Sløkkiliðsbilur setast í ordra í oktober 2025 til leveringlevering mars. 2029

Ein stórur fyrimunur er at bíleggja bilarnar undir einum, hettar eisini fyri at bilarnir eru so líkir sum til ber, eisini tá hugsað verður um eykadeilir, sum kunnu havast á goymslu her.

Tað er ætlanin at halda okkum til RK Brand og Teknik, sum er veitari at Rosenbauer Sløkkiliðsbilum, og hevur størsta partin av sløkkiliðsbilunum í landinum, tí kunnu tey eisini veita service og viðlíkahald her hjá okkum, hettar er sera umráðandi at vit kunnu fáa eina sterka fakliga service, tá vit eru so langt frá meginlandinum.

Tað eru 18 mánaðar leveringstíð, og tí er tað átrokandi, at vit kunnu seta hettar arbeiðið í verk, og fáa gjørt eina bílegging uppá hesar sløkkiliðsbilar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☐**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 961 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
24/08064 Útskiftan av sløkkiliðsbilum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og Sløkkiliðsstjórin mæla til at seta arbeiði í gongd við fáa tilboð inn frá RK Brand og Teknik sum er veitari av Rosenbauer, og at ca. 8 milliónir vera settar av í 2027, ca. 8 milliónir vera settar av í 2028 og 4,5 milliónir vera settar av í 2029 til keyp av nýggjum sløkkiliðsbilum.

**Tilbúgvingarnevndin 25. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg og Heðin Mortensen samtykti at taka undir við at seta arbeiðið í gongd við at fáa tilboð inn frá RK Brand og Teknik, sum er veitari av Rosenbauer og at samlaða nýkeypið verður tikið upp á komandi fundi.

Ein minniluti,Tróndur Sigurðsson tekur undir við tilmælinum.

**Tilbúgvingarnevndin 26. november 2025:** Samtykt, at bíleggingaravtala við RK Brand & Teknik verður undirskrivað í 2025 á kr. 810.000, at sløkkiliðsbilarnir verða fíggjaðir í 2026 og 2027 við lutfallinum ávikavist 50%, sum svarar til áleið kr. 4 mió í 2026, og 40% í 2027, sum svarar til áleið kr. 4 mió, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið. Tilbúgvingarnevndin biður eisini um, at nýggir sløkkiliðsbilar framyvir verða í leiguskipanini.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av samtyktini í Tilbúgvingarnevndini tann 26. november 2025 er nágreining gjørd til tess at lýsa fíggingina av keypinum av tveimum bilum til sløkkiliðið.

Fyri at tryggja regluliga útskifting av bilum undir sløkkiliðnum/tilbúgvingini so hesir bilar eru í støðugt nøktandi standi og støði, og at útskiftingin ikki skal verða knýtt at íløguætlanunum hjá kommununi annars, er alneyðugt at hesi akfør koma inn undir leiguskipanina hjá Verkstaðnum. Á henda hátt kemur rakstur, viðlíkahald og útskifting at hvíla í sær sjálvum.

Uppskot til rammuavtalu um keypa av einum sproytubili og einum tangabili við, og optión til at keypa upp til tveir sproytubilar afturat og 1 tangabil til handan í 2028 og 2029 er gjørt. Hendan viðgerð umfatar tó einans keyp av einum sproytubili og einum tangabili.

Higartil hava akførini hjá Sløkkiliðnum ikki verið partur av leiguskipanini, men stovnurin hevur átt akførini, og soleiðis hevur stovnurin sjálvur staðið fyri øllum útreiðslum í samband við rakstur, viðlíkahald og útskifting av akførunum. Hetta hevur viðført avbjóðingar, tá neyðugt hevur verið at skift akførini út, og hetta ikki hevur verið raðfest fíggjarliga. Í løtuni eru tveir tangabilar og tveir sproytubilar frá 2007. Ein minni brandbilur í Kollafirði er frá 2003. Tað vil siga, at hesi tilbúgvingarakførini eru millum 18 og 22 ár. Vanliga

verður mett, at slík akfør eiga at verða útskift tá tey eru uml. 15 ára gomul. Av tí at einans ein brandbilur er útskiftur seinast í 2018 og eingin síðani, standa øll akførini nú til at skula skiftast út. Hetta er tilsamans íløga fyri uml. 19 – 20 mió kr. Um akførini verða, sum tað er neyðugt, skift út nú innan stutt tíðarskeið, uttan at hesi akfør koma undir leiguskipanina, viðførir hetta at tørvur er aftur um 15 ár á líknandi íløgu, sum hædd tá aftur skal takast fyri í fíggjarætlanum tá. Í leiguskipanini er størri fleksibilitetur fyri at útskiftingin kann fremjast í stigum, soleiðis at skilja, at bilar kunnu skiftast út áðrenn 15 ár – møguliga tá teir eru 5 ár – og soleiðis kann aldurin á akførum hjá Sløkkiliðnum spjaðast meira út.

Við at leggja bilarnar hjá sløkkiliðnum inn undir leiguskipanina økist fasti raksturin hjá stovninum við leigukostnaðinum, samstundis sum raksturin vegna umvælingar minkar. Leigukostnaðurin fyri ein nýggjan bil hjá sløkkiliðnum verður mettur við støði í, at viðlíkahalds og rakstrarkostnaður, undantikið brennievni, yvir 15 ár er 50% av nýprísinum. Sostatt skal leigan endurrinda 1,5 ferðir nýprísin av íløguni, frároknað endursøluvirði eftir 15 ár á 0,5 mió kr. Harumframt skal rindast 5% av mánaðarliga leigukostnaðinum til umsiting hjá verkstaðnum. Fyri ein bil við nývirði á 4 mió kr. verður tí roknað við, at leigan er 385.000 kr. Í 2024 brúkti sløkkiliðið uml. 1,1 mió til umvæling, umsiting og trygging av akførum og til billutir. Væntað er, at uml. 150 tkr. eru útreiðslur, sum raksturin tí kann tilsvarandi minkast við tá ein bilur við nývirði á 4 mió fer undir leiguskipanina. Netto er tí talan um eina øking í rakstrinum á uml. 235.000 kr. við at leggja ein slíkan bil undir leiguskipanina. Verða tveir bilar bílagdir, sum samtykt í Tilbúgvingarnevndini koma hesir ikki í rakstur fyrr enn í 2027. Tá má rakstrarjáttanin til konto 7210 Brandstøðin tillagast tilsvarandi.

Vegna langa veitingartíð og skipanina við rammuavtalum av hesum slag verður keypið fíggjarliga skipað, sum játtan av 8375 Rakstrargøgn (íløgur) á kr. 810.000,- (10% av samlaða kostnaðinum) í 2025 tá rammuavtalan verður undirskrivað, kr. 4.050.000,- (50% av samlaða kostnaðinum) verða goldnar í 2026 av somu konto í samband við at bilarnir verða settir í ordra. Hetta verður fíggjað sum partur av játtan á 8.500.000,- frá meirinntøkum í 2025 inn á kt. 8375 Rakstargøgn (íløgur). Tey seinastu 40 prosentini (kr. 3.240.000,-) verða goldin í 2027 við handan av akførunum. Hetta verður at játta av kt. 8375 Rakstargøgn (íløgur) í 2027.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8375 | LK83001 | Rakstrargøgn | 8375 | | | Nýggir bilar til sløkkiliðið 2025-2027 | 4.860.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 8.100.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kr. 470.000 á kt. 7210 frá 2027 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Sløkkiliðnum mæla fíggjarnevndini til at:

- Tikið verður undir við samtyktini frá Tilbúgvingarnevndini 26. november 2025,
- Heimilað verður at gera rammusáttmála við RK Brand & Teknik um keyp av einum sproytubili og einum tangabili í 2025 til handan í 2027
- Játtaðar verða kr. 4.860.000,- av konto 8375 Rakstrargøgn (íløgur) til at gjalda í samband við undirritan av omanfyri nevnda rammusáttmála í 2025 og við bíleggingarváttan í 2026
- At bilarnir skulu fara undir leiguskipanina hjá Verkstaðnum og raksturin hjá kt. 7210 skal tillagast tilsvarandi í 2027, tá bilarnir koma í rakstur.
- At málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

## 297/25 Eykajáttan av meirinntøkum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 215/25 | 25/09786-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 258/25 | 25/09786-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 297/25 | 25/09786-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin ger á hvørjum ári dagførda inntøkumeting, sum verður løgd fyri býráðið við uppskoti um at raðfesta partar av møguligu meirinntøkunum til ymsar kontur, ið mettar vera at enda við meirnýstslu, sum ikki kann fíggjast á annan hátt, tá ið árið er úti.

**Lýsing av málinum**
Dagførda inntøkumetingin í november 2025, vísir, at samlaðu meirinntøkunar hjá Tórshavnar kommunu í 2025 vera umleið 80 mió. kr. hægri enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini hjá kommununi.

Mettu meirinntøkurnar í 2025 stava serliga frá hægri kommunuskatti, hægri felagsskatti og hægri skatti av eftirlønargjaldum.

Av meirinntøkunum á 80 mió. kr. er býráðið samt um at brúka tilsamans 52,5 mió. kr. av meirinntøkunum sum víst í talvuni niðanfyri. Hetta merkir samstundis, at Tórshavnar kommuna ikki fer at brúka tilsøgnina, um at taka lán fyri 17,2 mió. kr.

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000.000 kr |
| 2775 | Ellisheimið, dagføring | 1.000.000 kr |
| 2775 | Dagføringar á eldraøkinum | 2.000.000 kr |
| 3175 | Náttúruspælipláss, Amerika | 1.300.000 kr |
| 4175 | Útbygging á skúlaøkinum | 5.000.000 kr |
| 5475 | Listasavnið, útbygging | 2.500.000 kr |
| 5775 | Oyggjaleikir, fjallasúklubreyt | 2.000.000 kr |
| 5775 | Oyggjaleikir, Tórsbreyt | 1.000.000 kr |
| 5775 | Svimjihøllin dagføring | 4.000.000 kr |
| 5370 | Knørrur | 5.500.000 kr |
| 7317 | Talgilding til borgaran | 1.400.000 kr |
| 6110 | Dagføring av bygningum | 6.600.000 kr |
| | Fíggjarligan lætta til barnafamiljur | 4.200.000 kr |
| 6575 | Kirkjugarðar | 4.500.000 kr |
| 6775 | Vatnveiting Eysturbýurin | 2.000.000 kr |
| 8375 | Brandbil og størri maskinur | 8.500.000 kr |
| | | **52.500.000 kr** |

**2375 Tannlæknamiðstøð:** Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til at gera byggiskrá til nýggja tannlæknamiðstøð.

**2775 Ellisheimið**: Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til dagføringar á Ellisheiminum.

**2775 Dagføringar á eldraøkinum:** Mælt verður til at játta 2 mió. kr. til tillagingar á Lágargarði. Av hesum fer 1,2 mió. kr. til konto 2775 L27015 Køkurin á Lágargarði, og góðar 800 tús. kr. fara til átøk at gera demensdeildirnar á Lágargarði meira demensvinarligar.

**3175 Náttúruspælipláss:** Mælt verður til at játta 1,3 mió. kr. til spælipláss í viðarlundini, sum verður brúkt av skúla, barnagørðum og familjum.

**4175 Útbygging á skúlaøkinum:** Tørvur er á útbýggingum á skúlaøkinum til komandi skúlaár, og mælt verður til at játta 5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025 til hesar útbyggingar.

**5575 Listasavnið:** Mælt verður til at játta 2,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025 til útbyggingar av listasavninum.

**5775 Oyggjaleikir:** Mælt verður til at játta tilsamans 2 mió. kr. til fjallasúklubreyt umframt útbyggingar og tillagingar á Tórsbreyt til oyggjaleikirnar í 2027 av meirinntøkunum 2025.

**5775 Svimjihøllin:** Mælt verður til at játta 4 mió. kr. til at keypa nýggja reinsiskipan. Verandi skipan er gomul og slitin, hon megnar ikki at reinsa vatni í barnahylinum og halda hitan samstundis. Tí eru hyljarnir kaldari enn teir eiga at vera. Nýggj skipan skal tryggja, at vatni verður reinsað og heldur hitan. Hetta er fyrsta stigi av trimum at skifta reinsiskipan í gomlu hyljunum.

**5370 Stuðul til íløgur, Knørrur:** Fíggjarnevndin hevur samtykt at mæla býráðnum til at játta róðrarfelagnum Knørrur tilsamans 10, 8 mió. kr. í stuðli yvir tvey ár, sí mál nr. 25/02131 Umsókn um mentanarstuðul til róðrarfelagið Knørrur. Mælt verður til at stuðla Knørri við 5,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025.

**6110 Dagføring av bygningum:** Mælt verður til at játta 6,6 mió. kr. til dagføringar av kommunalum bygningum av meirinntøkunum 2025. henda játtanin verður býtt soleiðis:
- Sosialar íbúðir 1 mió. kr.
- Majaríið dagføringar 2,5 mió. kr.
- Vesið á vaglinum 1 mió. kr.
- Býlingshúsið í NH 1,1 mió.kr.
- Skúlar – matarskipan 1 mió. kr.

**xxxx Fíggjarligur lætti til barnafamiljur:** Mælt verður til, at barnafamiljur í Tórshavnar kommunu sleppa undan vøggu-, barnagarðs- og frítíðarskúlagjaldið í desember. Hetta verður mett at kosta kommununi 4,2 mió. kr., sum mælt verður til at fíggja av meirinntøkunum 2025.

**6575 Kirkjugarðar:** Mælt verður til at játta 4,5 mió. kr. til kirkjugarðar. Umleið 3,5 mió. kr. fer til at seta í verk víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði og 1 mió. kr. fer til at umgrava niðasta partin av nýggjast víðkanini av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin. Her er tilfarið og tætt og leirkent. Neyðugt verður við nýggjum tilfari, sum er drenandi.

**6775 Vatnveiting:** Mælt verður til at játta 2 mió. kr. til minka um lekar og rust í rørunum til drekkivatn.

**8375 Rakstrargøgn:** Brandbilarnir og fleiri størri maskinur í Tórshavnar kommunu eru vorðnar rættiliga gamlar og dýrar í viðlíkahaldi. Ætlanin er at fara í holt við eina tilgongd at skifta út brandbilar og størri maskinur hesi komandi árini. Mælt verður til at uppraðfesta játtanina til rakstrargøgn við 8,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025, soleiðis at fyrstu bilrarnir kunnu bíleggjast nú. Ætlanin er at bíleggja ein nýggjan brandbil og ein nýggjan krókabil til brennistøðina beinanvegin.

**7317 Talgilding til borgaran:** Mælt verður til at játta 1,4 mió. kr. til KT-loysnir til byggimálsviðgerð. Verkætlanin snýr seg um at fara í holt við at nýta vitlíki í kommunalu málsviðgerðini. Verkætlnarfólk verður sett at eygleiða og greina málsviðerð innan byggimálsdeildina sum arbeiðsdømi, við atliti at

fyrireika menning og íverksetan av vitlíki sum amboð í byggimálsviðgerð, ið síðan kann mennast víðari til málsviðgerð sum heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/02131 Umsókn um mentanarstuðul til róðrarfelagið Knørrur
25/09594 Fjallasúkklubreyt til oyggjaleikir 2027

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: Deild | | Navn | Játtast á: Deild | | Navn | | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Meirinntøkur 2025 | 2375 | | Tannrøkt | | 1.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 2775 | | Eldrarøkt | | 3.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3175 | | Barnaansing | | 1.300.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 4175 | | Dagføring av skúlum | | 5.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5575 | | Søvn og mentunararvur | | 9.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5370 | | Knørrur | | 5.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6110 | | Røkt og umvæling av bygningum | | 6.600.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | xxxx | | Barnafamiljur | | 4.200.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6575 | | Kirkjugarðar | | 4.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6775 | | Vatnveiting | | 2.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 8375 | | Rakstrargøgn | | 8.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 7317 | | Talgilding til borgaran | | 1.400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** |
|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 967 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, atkvøður blankt og tekur støðu, tá málið kemur fyri býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Elsa Berg legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at 5 mió. kr.av meirinntøkunum 2025 verða lagdar afturat verkætlanini um útbygging á skúlaøkinum við lonum á skúlanum á Fløtum og skúlanum á Argjahamri.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um málið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

# 298/25 Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024 - 24/08061

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 203/25 | 25/10008-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 257/25 | 25/10008-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 298/25 | 25/10008-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur góðar 13 mió. kr. eftir av meirinntøkum frá 2024.

**Lýsing av málinum**
Mælt verður til at brúka tær góðar 13 mió. kr. av meirinntøkunum frá 2024, sum enn ikki eru brúktar, soleiðis:

**1110 Tænastumannaeftirlønir:** Útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir eru ov lágt mettar í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, at tað mangla 655 tús. kr. í fyri at halda játtanina í ár.

**2810 Fíggjarligt frípláss:** Útreiðslurnar til fíggjarligt frípláss eru ov lágt mettar í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, at tað mangla 492 tús. kr. í fyri at halda játtanina í ár.

**3215 Forledragjaldið lækkað úr 27% niður í 25%:** Á býráðsfundin, 25. januar 2025, varð samtykt at lækka vøggustovugjaldið úr 27% niður í 25%. Kostnaðurin av at lækka vøggustovugjaldið varð mettur til 1,8 mió. kr., ið skuldi játtast sum eykajáttan á konto 3215 seinni í árinum, sí mál nr. 25/02002 Foreldragjaldið á dagstovnaøkinum.

**3212 Tímar vegna serligan tørv:** Gongdin seinastu árini hevur verið, at alsamt fleiri børn fáa játtan úr tímagrunninum.

**3218 Serstovur:** Lønarútreiðslurnar eru munandi øktar vegna stórar lønarhækkingar og lønarlyft.

**5110 Musikkskúlin:** Musikkskúlin hevur í nøkur ár drigið eitt rakstrarhall við sær yvir ár. Mælt verður til at dagføra játtanina, soleiðis at hetta hallið ikki verður flutt fram til 2026.

**5410 Býarbókasavnið:** Nýggja lógin um bókasøvn hevur við sær, at stuðulin frá landinum til kommunal bókasøvn fellur burtur. Tí koma 630 tús. kr. at mangla í rakstrinum hjá býarbókasavninum í ár.

**5610: Svimjihøllin:** Tað vísir seg nú, at kostnaðurin av at reka langhylin og alt tað nýggja virksemið í svimjihøllini var undirmettur í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, nú ikki so nógv er eftir av árinum 2025, at kostnaðurin helst fer at vera umleið 800 tús. kr. hægri enn upprunaliga mett.

**6110 Fyribils flyting av starvsfólkunum í Steinatúni:** Mett verður, at tað kemur at kosta umleið 900 tús. kr. at flyta øll staarvsfólkini úr Steinatúni út í Mullers pakkhús og Sjóvinnuhúsið í ár. Her er leiga fyri hálvanannan mánaða til Tórshavnar Havn fyri 2. hædd av Sjóvinnuhúsinum í 2025 íroknað.

**8210 Feliri gøtuljós til innkomuvegin og tunnil:** Meir útreiðslur til gøtuljós og ljós til nýggja innkomuvegin og húsareynstunnilin verða mettar at kosta kontuni fyri gøtuljós umleið 500 tús. kr. meira í ár enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025.

**20910 Meirinntøkur:** Mælt verður til at játta tilsamans 3,7 mió. kr. av meirinntøkum yvir á konto 20910 Aðrar inntøkur. Samlaða upphæddin á 3,7 mió. kr. er býtt sum í talvuni omanfyri. Víst verður til málini undir punktinum niðanfyri: “Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið”

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 1110 | Tænastumannaeftirlønir | 655.000 kr |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | 492.000 kr |
| 3215 | Foreldragjaldið lækkað niður í 25% | 1.800.000 kr |
| 3212 | Tímar vegna serligan tørv | 3.500.000 kr |
| 3218 | Serstovur | 800.000 kr |
| 5110 | Musikkskúlin | 400.000 kr |
| 5410 | Býarbókasavnið | 630.000 kr |
| 5610 | Svimjihøllin | 800.000 kr |
| 6110 | Fyribils flyting av starvsfólkunum í Steinatúni | 900.000 kr |
| 8210 | Fleiri gøtuljós til innkomuvegin og tunnil | 500.000 kr |
| 20910 | Skuld hjá sersambondum til ítróttaranlegg | 765.000 kr |
| 20910 | Rætting fíggjarviðurskifti hjá Ítróttaranlegg 2025 | 126.000 kr |
| 20910 | Niðurtøka av matr. nr. 192e í Kollafirði | 800.000 kr |
| 20919 | Avstemman av kreditorum | 800.000 kr |
| 20910 | Skuld Havnar Svimjifelag | 78.000 kr |
| | | **13.046.000 kr** |

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/02002 Foreldragjaldið á dagstovnaøkinum
25/08183 Skuld hjá sersambonum til ítróttaranlegg
25/05833 Fíggjarviðurskifti hjá ítróttaranlegg
25/09734 Fíggjarviðurskifti Svimjihøllin
25/08913 Sakarmál um ólógiliga bygging
25/09097 Hølisviðurskifti hjá fyrisitingini í Tórshavnar kommunu
25/09082 Avstemman av kreditorum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
24/08061-1 Umbøn um eykajátta av meirinntøkum 2024
Meirinntøkur 30.09.2024
Yvirlit yvir játtan meirinntøkur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 970<br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☒ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** | **Deild** | | **Navn** | | **Upphædd** |
| | | Meirinntøkur 2025 | 1110 | | Tænastumannaeftirlønir | | 655.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 2810 | | Fíggajrligt frípláss | | 492.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3215 | | Aðrar útreiðlsur | | 1.800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3212 | | Tímar til børn við serligum tørvi | | 3.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3218 | | Serstovur | | 800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5110 | | Musikkskúlin | | 400.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5410 | | Býarbókasavnið | | 630.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5610 | | Svimjihøllin | | 800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6110 | | Røkt og umvæling av bygningum | | 900.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 8210 | | Gøuljós | | 500.000 |
| | | Meriinntøkur 2025 | 20910 | | Aðrar inntøkur | | 2.570.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum við broyting um at 2,57 mió. kr. verða settar av til konto 20910 aðrar inntøkur.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** atkvøtt vað um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 299/25 Umsókn um mentanarstuðul, umsøkjari: Jógvan Elias Jakobsen vegna: Róðrarfelagið Knørrur - 24/08260

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 02.04.2025 | 54/25 | 25/02131-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 126/25 | 25/02131-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 183/25 | 25/02131-6 |
| 4 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 299/25 | 25/02131-6 |

**Upprunin til málið**

Umsókn um íløgustuðul á 10.815.317 kr.

**Lýsing av málinum**

10. oktober 2024 sendi Róðrarfelagið inn umsókn um íløgustuðul á á 10.815.317 kr. til nýtt neyst í Álakeri.

Sbrt. umsøkjaranum er málsgongdin hendan:

**2020-2022**

- Leigusáttmáli um grundstykki á 750 m2 í Álakeri verður undirskrivaður
- Prosjekt verður innsent saman við umsókn um byggiloyvi, og byggiloyvi verður givið
- Leigusáttmáli verður inndrigin og umgjørdur til grundstykki á sama stað, nú 600 m2

**2023-2024**

- Gjørt verður nýtt prosjekt í samsvari við broyttar umstøður
- Umsókn um mentanarstuðul til prosjekt verður send Tórshavnar Kommunu

**Fígging:**

Sbrt. umsøkjaranum, so eru útreiðslurnar 36.051.057 kr. og hevur felagið sjálvt eina eginfígging á 1.290.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.
Sbrt. § 3, stk. 3 í "Leiðreglunum fyri stuðul til íløgur", kann stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 973 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla frá at játta íløgustuðul á hesum sinni, við teirri grundgeving, at fíggjarætlanin ikki hevur lagt upp fyri so stórum upphæddum til íløgustuðul.

Samstundis verður mælt til, at íløgustuðul til kappróðrarneystið, verður tikin við í fíggjarætlanararbeiðið 2026.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið er ynskt at koma á skrá aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta stuðulsupphæddina sum Knørrur søkir, men hon skal verða býtt yvir 2 fíggjarár. Kr. 5.407.658,50 fyri 2026 og kr. 5.407.658,50 fyri 2027.

Hetta er við teirri treyt, at upphæddirnar verða settar av á fíggjarætlanini fyri 2026 og 2027, og at felagið hevur fingið til vega øll neyðug loyvi til byggingina.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen og Heðin Mortensen samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, tó vilja teir viðmerkja at teir kenna ikki íløgukarmin fyri 2026 og taka fyrivarni fyri tí.

At beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Heðin Mortensen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti 4. desember 2025**
Sbrt. mál 25/09786 (Eykajáttan av meirinntøkum 2025) eru 5.500.000 kr. settar av til nýtt kappróðrarneyst hjá Róðrarfelagnum Knørrur.

**Tilmæli**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 974<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- At geva Róðrarfelagnum Knørri tilsøgn upp á kr. 5.500.000 í 2025 til nýtt kappróðrarneyst. Upphæddin verður játtað av 5370 Stuðul til íløgur.
- At leggja málið fyri aftur, at geva felagnum tilsøgn upp á restupphæddina kr.5.500.000, tá játtan er tøk til endamálið á konto 5370 Stuðul til íløgur.
- Stuðulin og tilsøgnin er treytað av, at øll neyðug loyvi eru fingin til vega.
- At beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

# 300/25 Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 121/25 | 25/09594-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 211/25 | 25/09594-2 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 300/25 | 25/09594-2 |
| 4 Mentamálanevndin | | | 25/09594-2 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST), at byggja eina altjóða góðkenda fjallasúkklubreyt í Flatnahaga/vesturvarða, í sambandi við Oyl 2027.

**Lýsing av málinum**
Tann 21.10.2025 var SST á fundi við TK viðv. nýggja fjallasúkklubreyt. Umframt at fjallasúkklubreyt er týdningarmikið fyri Oyl 2027, so hevur slík breyt, sbrt. SST, eisini **stóran trivnaðar- og samfelagsligan týdning:**

1. Skúlar kundu brúkt hana sum eitt náttúrligt og trygt læruumhvørvi fyri børn og ung at lært at handfara súkklu.
2. Hon hevði kunnað styrkt **súkklutrygdina**, við at børn og ung læra at súkkla undir tryggum og skipaðum umstøðum – vekk frá ferðsluni og vekk frá gongubreytum.
3. Breytin hevði gjørt tað møguligt hjá bæði børnum og vaksnum at spæla, venja og læra súkkling í einum umhvørvi, sum er bæði sunt og fjølbroytt.

Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina er 9.459.901 kr uttan MVG. Hetta er við projektering, ráðgeving frá Kanadiskum serfrøðingi, útinning og 10% í óvæntaðum.

SST hevur boðað TK frá, at tey hava fingið 500.000 kr. í stuðli frá føroyskari fyritøku til fjallasúkklubreytina. SST boðar frá, at partur av hesari upphæddini skal brúkast til projektering. Harumframt hevur SST køn fólk, sum fara at søkja út útlendskum fondum. Fleiri freistir eru um árskiftið 2025/26. Í samband við hetta arbeiðið krevst ein tilsøgn um fíggjarligan stuðul frá TK. SST leggur upp til eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027.

Vísandi til skjal 25/09594-1 SST leggur upp til fylgjandi leist:

Stig 1) Projektera og gera part av fjallasúkklubreytini oyggjaleikaklára. Kostnaður 4 mió kr. TK gevur eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027
Stig 2) Gera eitt felagshús við startmálið á við gomlu ríðingabreytini á Marknagilið. Kostnaðurin er mettur at verða 2 mió kr.
Stig 3) Gera restina av verkætlanini klára.

Í oyggjaleikahøpi brúkar man hugtakið "Legacy of the game". Tvs. hvat liggur eftir í samfelagnum eftir einar oyggjaleikir. Innan oyggjaleikirnar í 1989, høvdu Føroyar onga rennibreyt, og tí íðkaðu vit ikki frælsan ítrótt, sum vit síggja í dag. SST ynskir at ein altjóða fjallasúkklubreyt verður "Legacy of the games" í 2027.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva SST eina tilsøgn upp á samanlagt kr. 2.000.000 kr. komandi ár, treytað av, at upphæddin verður sett av á fíggjarætlanini 2026.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, um tilsøgnina á 2.000.000 og beina málið í fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin setur sum treyt at ein nýggj staðseting verður funnin, um ikki verandi uppskot kann tillagast, soleiðis at nevndin kann taka undir við staðsetingini. Partar, sum hava virksemi í økinum skulu hoyrast og atlit má takast til ávirkanina í náttúruni.

At leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 4. desember 2025**
Sbrt. mál 25/09786 (Eykajáttan av meirinntøkum 2025) eru 2.000.000 kr. settar av til nýggja fjallasúkklubreyt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- At geva Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST) tilsøgn upp á kr. 2.000.000 í 2025 til nýggja fjallasúkklubreyt. Upphæddin verður játtað av 5370 Stuðul til íløgur.
- Stuðulin og tilsøgnin er treytað av, at øll neyðug loyvi eru fingin til vega.
- At beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Borgarstjórin legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum um at geva tilsøgn um stuðul kr. 2 mió av 5370 og at uppskot um staðseting av súkklubreyt verður lagt aftur fyri mentamálanevndina til góðkenningar.

Atkvøtt varð fyri broytingaruppskotinum, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.
.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein

Atkvøddu blankt: Kári Johansen

# 301/25 Tænastugjald á tóm býli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 239/25 | 25/10079-1 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 301/25 | 25/10079-1 |

**Upprunin til málið**
Løgtingið hevur við løgtingslóg nr. 80 frá 2. mai 2025 um tænastugjald á tóm býli samtykt, at geva føroysku kommununum heimild at áseta tænastugjald á býli, sum standa tóm í kommununum.

**Lýsing av málinum**
Sambært lógaruppskotinum so skal tænastugjaldið roknast sum "miðalupphæddin av samlaðu útreiðslunum, sum kommunan hevur havt tey seinastu 5 árini til renovasjón, vatnveiting, kloakkir og sløkkilið, deild við talinum av bygningseindum í kommununi.

Hetta eru roknskapartølini fyri Tórshavnar kommunu:

| Høvuðskonta | Heiti | R 2020 | R 2021 | R 2022 | R 2023 | R 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3021110 | Vatnveiting (RKST) | 7.549 | 8.253 | 7.344 | 8.346 | 8.140 |
| 3021111 | Vatnveiting (LØGU) | 0 | 3.714 | 388 | 901 | 0 |
| 3041110 | Kloakkir (RKST) | 13.586 | 12.918 | 11.415 | 10.525 | 11.437 |
| 3041111 | Kloakkir (LØGU) | 1.662 | 7.439 | 5.553 | 8.586 | 3.608 |
| 3042110 | Renovatión (RKST) | 27.135 | 22.811 | 33.509 | 26.136 | 42.230 |
| 3042111 | Renovasjón (LØGU) | 0 | 0 | 63 | 578 | 0 |
| 3111110 | Sløkkiliðið (RKST) | 11.760 | 11.121 | 11.569 | 11.078 | 12.526 |
| | **Tilsamans** | **61.692** | **66.256** | **69.841** | **66.150** | **77.941** |

Tað vil siga, at árligi miðalkostnaðurin seinastu 5 árini er 68.376.000 kr.

Í fyrstu syftu hava kommunurnar brúkt tøl um bygningseindir og tóm býli frá Umhvørvisstovuni sum grundarlag fyri at rokna út tænastugjaldið, men tølini hjá Umhvørvisstovuni eru ikki dagførd, og skulu tí takast við neyðugum fyrivarni.

Tórshavnar kommuna hevur sambært Umhvørvisstovuni 10.915 bygningseindir. Hugtakið bygningseindir fevnir í hesum høpi um tali av býlum og virksemiseindum. Í íbúðarblokkum telur hvør íbúð sum eitt býli. Við býli verður hugsað um bæði vanlig sethús, tvíhús, raðhús og hús, sum millum manna verða nevnd summarhús, men eisini um íbúðir í íbúðablokkum og íbúðir í t.d. virkisbygningum og á neystaloftum. Íbúð í húsi, har eigarin sjálvur býr, og har íbúðin ikki er frámatrikulerað sum sjálvstøðug íbúð, er ikki fevnd av lógaruppskotinum.

Hugtakið býli merkir hús, íbúð o.tíl., sum er egnað at vera nýtt til bústað. Eitt býli er m.a. eyðkent við, at vatn er lagt inn og kloakk er bundin í býli. Smærri bygningar úthús, bilhús, hjallar, neyst o.tíl., sum ikki eru egnaðir at búgva í, eru ikki fevndir av hugtakinum bygningseind í hesum høpi.

Tað vil siga, at tænastugjaldið verður (68.376.000/10.915) = 6.264 kr., í 2026, um tølini hjá Umhvørvisstovuni verða brúkt sum grundarlag.

Tórshavnar kommuna liggur sostatt niðanfyri hámarkið á 7.942 kr., og kann tí krevja fulla upphædd á 6.264 kr. um árið í tænsastugjaldi.

Sambært tølum frá Umhvørvisstovuni, so verður mett, at tað eru 477 tóm býli í Tórshavnar kommunu. Út frá hesum gevur tænastugjaldið á tóm býli Tórshavnar kommunu (6.264x477) = 2.988 tús. kr. árliga.

Eitt tómt býli í hesum høpi er eitt býli, har eingin er skrásettur at búgva sambært Landsfólkayvirlitinum. Tað er ikki nágreina nærri í viðmerkingunum til lógina hvussu leingi eitt býli skal standa tómt fyri at verða definerað sum eitt tómt býli.

Tekniska fyrisitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur eisini eina meting av, hvussu nógvar bygningseindir eru í kommununi og hvussu nógv býli standa tóm. Tekniska fyrisitingin metir, at tað eru 9.111 bygningseindir í Tórshavnar kommunu harav 824 tóm býli. Við hesum tølunum, sum grundarlag, hevði tænastugjaldið givið Tórshavnar kommunu (68.376.000/9.111) = 7.505 kr. x 824 = 6.184 tús. kr. árliga.

Tølini frá Umhvørvisstovuni eru ikki dagførd tøl og tølini frá Tórshavnar kommunu skulu eisini takast við fyrivarni, men mett verður, at at tænastugjaldið fer at geva Tórshavnar kommunu einastaðni millum smáar 3 mió. kr. og góðar 6 mió kr. í inntøkum av tænastugjaldinum á tóm býli um árið.

Kommunan skal sjálv krevja inn tænastugjaldið (TAKS hevur ongan leiklut). Í kravinum skal vera tilskilað, hvørjar tænastur kravið er fyri, hvussu komið er fram til upphæddina í kravinum, og nær kravið fellur til gjaldingar.

Kommunan ger sjálv av, um tænastugjaldið verður kravt inn mánaðarliga, hvønn ársfjórðing, hálvárliga ella árliga.

Kravið verður sent eigaranum av býlinum. Eru fleiri eigarar, bera teir samábyrgd fyri upphæddini.

Tað fer tí at krevja nakað av útreiðslum hjá Tórshavnar kommunu at fyrireika tænastugjaldið, seta tað í verk og at umsita tænastugjaldið frameftir. Fyrst skal kommunan gera ein lista av bygningseindum og tómum býlum, sum skal brúkast til útrokningar- og faktureringsgrundarlag. Hetta verður gjørt við útgangsstøði í bygningsskránni og Fólkayvirlitinum. Síðan skal listin við millum 477 og 824 býlum góðskutryggjast sambært Tingbókini hjá Tinglýsingini og helst eisini vinnuskránni.

Tá ið listin er góðskutryggjaður og góðkendur verður tænastugjaldið fakturerað, í fyrsta umfarið hálvárliga. Talan verður um millum 477 og 824 nýggjar skuldarar.

Tað er trupult neyvt at meta um, hvussu nógva orku nýggja tænastugjaldið fer at krevja av kommununi, men helst verður neyðugt at seta eitt ella fleiri fólk til at umsita nýggja tænastugjaldið. Tórshavnar kommunu hevur fyrra hálvár í 2026 til at fyrireika nýggja tænastugjaldið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-Løgtingslóg nr. 80 frá 2. mai 2025 um tænastugjald á tóm býli.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

| | Blað nr.: 980 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Forkvinnunnar merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
-Notat TK tænastugjald á tóm býli
-TK Tænastugjald á tóm býli dømi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | |
| § 20 | 20.52.23.110. | Tænastugjald á tóm býli | |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.900.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til tænastugjald á tóm býli í Tórshavnar kommunu og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at heitt verður á fyristingina um at gera uppskot til innheintingarskipan, sum er løtt at umsita.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini, og málið bleiv samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 982<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 302/25 Hækkan av hýruvognsloyvum frá 37 upp í 40 loyvir fyri hvørja bilstøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.12.2025 | 40/25 | 25/10427-2 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 302/25 | 25/10427-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er komin frá AUTO og frá Bil Mini-Taxa um at hækka talið á hýruvognsloyvum.

**Lýsing av málinum**
P/F Auto og Bil Mini-taxa ynskja at hækka síni galdandi 37 hýruvognsloyvi upp til 40 loyvi.

Tórshavnar kommuna er í stórum vøkstri, og tískil verður tað frá bilstøðunum mett neyðugt at hækka talið á hýruvognsloyvum fyri at nøkta økta tørvin á hýruvognum í kommununi. Hetta sæst serliga aftur í einum øktum tørvi í háferðslutíð og í vikuskiftis náttartíðum.

Talið á borgarum í Tórshavnar kommunu er hækkað nógv. Eisini er virksemi í miðbýnum í Havn voksið við fleiri nýggjum skeinkistøðum, matstovum og líknandi. Eisini er tørvurin á bygd vorðin størri við vaksandi fólkatalinum.

Mett verður, at talið á loyvum kann hækkað við heimild í reglugerðini fyri hýruvognsloyvi í Tórshavnar kommunu, §2, stk.3.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Hýruvognsreglugerð fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/10427 Umsókn um at hækka Taxa loyvini frá 37 uppí 40 loyvi
25/10670 Umsókn um at hækka hýruvognsloyvini frá 37 upp í 40 loyvi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| Býráðsfundur<br>11. desember 2025 | Blað nr.: 983 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til at góðkenna umsóknunum frá Auto og frá Bil Mini-Taxa við trimum loyvum fyri hvørja bilstøð.

**Vinnunevndin 05. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

## 303/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 166/25 | 25/00161-1 |
| 11 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 209/25 | 25/00161-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 236/25 | 25/00161-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 208/25 | 25/00161-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 260/25 | 25/00161-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 245/25 | 25/00161-1 |
| 16 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 303/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Mánaðarroknskapurin fyri august 2025 er um teldupost 18. september 2025 sendur fíggjarnevndarlimunum til góðkenningar.

Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen hava góðkent roknskapin.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Framlagt.

# 304/25 Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 304/25 | 25/09621-1 |

**Málslýsing**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2026 kl. 16:00 í býráðssalinum:

29. januar
26. februar
26. mars
30. apríl
21. mai
18. juni
17. september
22. oktober
19. november
10. desember

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 305/25 Umsókn um eitt ikoniskt listaverk á Boðanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 305/25 | 25/06140-7 |

**Upprunin til málið**
Tróndur Sigurðsson krevur málið fyri býráðið til fundin 11. desember 2025, til umrøðu og støðutakan.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Borgarstjórin setir til atkvøðugreiðslu um málið skal viðgerast.

Málið fall við átta atkvøðum ímóti og fimm atkvøðum fyri.

Fyri ímóti: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

**FUNDURIN LOKIN KL. 23:59**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Rúni Reginsson Hammer | |